**INNIHALDSYVIRLIT:**

**INNGANGUR** ..... **3**

**1. OGN FØROYA FÓLKS** ..... **8**

**2. BURÐARDYGG GAGNNÝTSLA** ..... **10**

2.1. FRÁGREIÐING HJÁ SKIPANARNEVNDINI 1999/2000 ..... 11
*2. 1.1 Er veiðan lívfrøðiliga burðardygg?* ..... *11*
*2. 1.2 Fyrivarnisreglan og samanbering við støðuna í Íslandi* ..... *11*
*2.1.3. Íslendska veiðireglan* ..... *12*
2.2 FYRIVARNISREGLAN ..... 14

**3. VERANDI LOYVISSKIPAN** ..... **16**

3.1. VEIÐILOYVI ..... 16
*3.1.1 Veiðiloyvi til fiskiskap uttanfyri fiskidagaskipan* ..... *18*
*3.1.2 Onnur loyvir til at veiða* ..... *18*
3.2 FISKILOYVI ..... 19
3.3 RÆÐI Á KVOTUM OG FISKIDØGUM ..... 20
*3.3.1 Fiskidagar og kvotur* ..... *22*
3.4. AÐRIR SPURNINGAR VIÐV. LOYVUM ..... 22
*3.4.1 Loyvir - tá skip ganga burtur* ..... *22*
*3.4.2 Loyvir - tá skip vera seld á tvingsilssølu* ..... *23*
*3.4.3 Loyvir – tá skip vera leiguskrásett – skráseting undir fremmandum flaggi* ..... *24*
*3.4.4 Brúksskylda og loyvir* ..... *25*
3.5 TÍÐARAVMARKINGAR TIL VEIÐI- OG FISKILOYVI ..... 25
*3.5.1 Ognartøka av fiskirættindum* ..... *28*

**4. FISKIRÆTTINDI – AVHENDING, SAMANLEGGING V.M.** ..... **29**

4.1 SAMANLEGGING OG FLYTAN AV LOYVUM ..... 29
*4.1.1 Trupulleikin – fiskiorka!* ..... *30*
*4.1.2 Avmarkingar* ..... *30*
4.2 AVHENDING AV FISKIRÆTTINDUM ..... 30
*4.2.1 Avhending av fiskidøgum* ..... *31*
*4.2.2 Avhending av kvotuparti við meira* ..... *34*
4.3 VEIÐILOYVI, FISKIRÆTTINDI OG AVHENDING Í HESUM SAMBANDI ..... 34
*4.3.1 Fyrimunir og vansar við mest loyvda tali á veiðiloyvum* ..... *35*
*4.3.2 Tal á loyvum* ..... *36*
*4.3.3 Støðan har ríkiligt er til av fiskidøgum* ..... *36*
*4.3.4 Ásetingar í veiðiloyvum og fiskiloyvum* ..... *37*
*4.3.5 Avhending í kvotuskipan* ..... *37*
*4.3.6 Avhending í fiskisdagaskipan* ..... *38*

**5. UM TILFEINGISRENTU** ..... **38**

5.1 HUGTAKIÐ ..... 38
*5.1.1 Søguligt* ..... *39*
*5.1.2 Prísáseting* ..... *40*
5.2 HVUSSU KANN TILFEINGISRENTA FÁAST TIL HØLDAR? ..... 40
*5.2.1 Gjøld* ..... *41*
*5.2.2 Rættindamarknaður* ..... *43*
*5.2.3 Nøkur landadømi* ..... *44*
5.3 SAMANBERING AV FÍGGJARLIGUM ÚRSLITUM ..... 45
5.4 UPPSKOT TIL SKIPAN ..... 46
*5.4.1 Veiðigjald* ..... *47*
*5.4.2 Útrokningin av veiðigjaldinum* ..... *49*
*5.4.3. Prosenttalið* ..... *50*
*5.4.4 Fyrimunir og vansar* ..... *50*

**6. SKIPAN FYRI ÚTRÓÐRARBÁTAR** ..... **51**

6.1 VERANDI SKIPAN ..... 52
*6.1.1 Almennar ásetingar* ..... *53*
6.2 LÝSING AV BÓLKI 5 ..... 54
*6.2.1 Bólkur 5A og 5B* ..... *54*
6.3 EIN NÝGGJ SKIPAN ..... 58
*6.3.1 Eitt annað uppskot* ..... *59*

**7. FISKIORKA ..... 60**

7.1 FYRIMUNIR OG VANSAR VIÐ BT ..... 61
*7.1.1 Nøkur orð um uppmáting* ..... *61*
7.3 VEIÐIEVNI ..... 62
7.4 FISKIORKA ..... 65
7.5 ONNUR VIÐURSKIFTI ..... 65
7.6 TILMÆLI TIL EINA NÝGGJA LÓG: ..... 66

**8. RÁVØRUR TIL HJÁFRAMLEIÐSLUR ..... 67**

**9. OGNARVIÐURSKIFTI ..... 69**

**10. ANNAÐ HAVTILFEINGI ..... 70**

10.1 NØKUR DØMI ..... 71
10.2 ONNUR LÓGGÁVA OG FØRLEIKAR ..... 71
10.3 UM ÁSETINGARNAR Í LÓGARUPPSKOTINUM ..... 72

**11. KÆRUMØGULEIKI ..... 73**

**12. ONNUR VIÐURSKIFTI ..... 74**

12.1 GJØGNUMSKYGNI ..... 74
12.2 SKRÁSETING ..... 75

**13. YVIRLIT YVIR FYLGISKJØL ..... 75**

# Inngangur

Lógin um vinnuligan fiskiskap, løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994, er høvuðslógarverkið undir allari føroyskari fiskiveiðu. Síðani lógin kom í gildi, er hon broytt fleiri ferðir, og ágangurin á lógina hevur tíðum verið stórur.

11. desember 2002 løgdu tingmenninir Henrik Old og Gerhard Lognberg fram uppskot til samtyktar um, at sett varð ein nevnd at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap. Undir viðgerðini í Løgtinginum var hetta broytt til, at nevndin skuldi ”gera eina lógartekniska endurskoðan og foreinkling av løgtingslógini”, og var henda broyting samtykt við 2. viðgerð 21. februar 2003.

Á heysti 2003 var heitt á Alfred Petersen og Hjalmar Hansen um, saman við umsitingini í Fiskimálaráðnum, at gera hetta arbeiðið. Men eftir løgtingsvalið í januar 2004, var arbeiðið umskipað. Arbeiðssetningurin bleiv broyttur, sí niðanfyri, og nevndin umskipað.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, heitti á hesar persónar, um at gera hetta arbeiðið: Jákup Andraesen, Frits Thomsen, Alfred Petersen, Hjalmar Hansen, Andras Kristiansen og Sólju í Ólavsstovu. Formaður í nevndini var Sólja í Ólavsstovu, og Hjalmar Hansen hevur verið skrivari. Á vári 2006 fór Sólja í Ólavsstovu í starv sum løgtingsins umboðsmaður, og segði hon seg í hesum sambandi úr nevndini. Í hennara stað kom Rógvi Reinert, aðalstjóri, sum tók við sum formaður og Marjun Magnussen.

Nevndin hevur havt 21 fundir (íroknað 3 ferðir 2 dags fundir), verið á vitjan í Norra og Íslandi og havt viðtalu við ymiskar áhugabólkar í fiskivinnuni.

Endurskoðanararbeiðið var skipað við einum fylgibólki, har vinnan og onnur við tilkýti til fiskivinnuna vóru umboðað. Í fylgibólkinum hava sitið: Óli Jacobsen, Føroya Fiskimannafelag, Marita Rasmussen, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Jóhannus Olsen, Føroya Ráfiskaseljarafelag, Jógvan Norðbúð/Jákup Sólstein, Føroya Reiðarafelag, Auðunn Konráðsson, Meginfelag Útróðrarmanna og Jákup Reinert, Fiskirannsóknarstovan. Nevndin og fylgibólkurin hava havt 4 fundir saman.

Nevndin, sum var sett av Bjørn Kalsø, landssstýrismanni, hevur sett tveir arbeiðsbólkar til at arbeiða við ávísum spurningum. Annar bólkurin arbeiddi við spurninginum um fiskiorku, og var hesin mannaður við: Frits Thomsen, Kristin Rasmussen, Jón Magnussen, Petur Steingrund og Hjalmar Hansen. Hin bólkurin hevur viðgjørt spurningin um annað havtilfeingi, og var hesin mannaður við: Jákup Mørkøre, Pál Weihe, Hannis Gislason, Petur Steingrund og Hjalmar Hansen.

Nevndin hevur evnað til 4 lógaruppskot og gjørt annað kunnandi tilfar í hesum sambandi. Tey økir og mál, nevndin hevur arbeitt við, eru rokkin við felags niðurstøðum. Hetta er tó ikki galdandi, tá talan er um bólk 5, og tí hevur lógaruppskotið um fyrisiting av havfeingi 2 ymisk uppskot viðvíkjandi bólki 5.

Úrslitið av arbeiði nevndarinnar verður við hesum latið landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Tórshavn, 27. august 2007

| | | |
|---|---|---|
| Rógvi Reinert<br>Formaður | Jákup Andreassen | Alfred Petersen |
| Andras Kristiansen | Frits Thomsen | Marjun Magnussen |

Hjalmar Hansen
skrivari

## Arbeiðssetningur

Nevndin hevur arbeitt út frá hesum arbeiðssetningi:

**Arbeiðssetningur, at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, givin nevndarlimunum 3. februar 2005.**

*Bakstøði*
Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur verið í gildi í 10 ár, og er hon broytt fleiri ferðir. Eitt ótal av smærri og eisini fleiri víðfevndum broytingum hava elvt til eina fløkta lóggávu fyri høvuðsvinnuna. Eisini grundleggjandi hugsjónarligar broytingar eru framdar.

**S**amgongan hevur tí sett sær fyri at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap. Málið er at hava eina lóg, sum setir greiðar karmar um, hvussu høvuðsvinnan verður skipað og umsitin**.**

*Fortreytir*
Støði skal takast í, at livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, sum Føroyar við samráðingum hava rokkið ella eftir altjóða rætti eiga uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn landsins.

Dentur skal leggjast á at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt, lívfrøðiliga og búskaparliga við virðing fyri sambandinum millum ymisku djóra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni. Skipanin við fiskidøgum umframt økis- og gýtingarfriðingum verður framhaldandi støðið undir umsitingini av botnfiskatilfeinginum í føroyskum sjógvi.

*Setningur*
Við frammanfyri nevndu fortreytum í huga skal arbeiðsbólkurin:

1. Ganga alla loyvisskipanina ígjøgnum og koma við uppskoti um neyðugar broytingar. Her skal m.a. metast um:
   a) løgfrøðiliga grundarlagið undir verandi loyvum,
   b) møguligar treytir fyri uppsøgn av verandi loyvum,
   c) hvørji loyvi skulu krevjast frameftir (veiðiloyvi, fiskiloyvi o.s.fr.),
   d) hvussu skulu nýggj loyvi útskrivast (verandi loyvishavarum, auktión e.a.),
   e) hvørjar treytir skulu setast í fiskiloyvum, og
   f) hvørjar treytir skulu setast í lógum/kunngerðum.

2. Meta um reglurnar, sum galda fyri at avhenda fiskirættindi umframt reglurnar um samanleggingar fyri fiskifør 15 tons og størri. Her skal m.a. mælast til:
   a) hvørjar treytir frameftir eiga at galda fyri avhending,
   b) hvørjar treytir frameftir eiga at galda fyri samanlegging,
   c) hvør kann avhenda til hvønn (partarnir sínámillum, loyvisgevarin sum millumlið e.a.)
   d) um avhending frameftir skal vera loyvd millum bólkar.

3. Meta um reglurnar, sum galda fyri avhending av fiskidøgum. Her skal støða m.a. takast til, um eitt lægsta dagatal skal ásetast fyri, at fiskifar í ávísum skipabólki kann varðveita veiði- ella fiskiloyvi.

4. Meta um verandi skipabólkar skulu varðveitast, og um allir skipabólkar, sum fiska botnfisk, skulu vera undir somu skipan.

5. Tryggja at reglurnar frameftir vera soleiðis háttaðar, at brúksskylda fylgir við brúksrættindum til fiskatilfeingið.

6. Tryggja fult gjøgnumskygni við fiskirættindum umframt forða fyri spekulatión við fiskirættindum.

7. Meta um, hvussu lógarverkið fyri høvuðsvinnuna kann tryggja, at vinnan frameftir verður fíggjarliga burðardygg, samstundis sum hon gevur avkast til samfelagið. Í hesum sambandi skal m.a. metast um, hvørji gjøld møguliga eiga at verða løgd á loyvishavarar (tilfeingisrenta).

8. Kanna reglurnar um eigara- og avgerðarrætt. Í hesum sambandi skal m.a. metast um, hvønn eigaralut útlendingar kunnu hava í feløgum, sum eiga veiði- ella fiskiloyvi frá føroyskum myndugleikum.

9. Gera reglur um, hvussu og í hvønn mun óbrúkt fiskirættindi og fiskirættindi tikin aftur í revsitiltøkum kunnu latast øðrum.

10. Meta um, hvat skal henda við fiskirættindum, tá fiskifar verður selt á tvingsilssølu.

11. Meta um, hvussu lógarverkið frameftir tryggjar, at allur fiskur og alt av fiski kemur til høldar, soleiðis at nýggjar framleiðslur kunnu mennast burturúr tilfeinginum.

12. Meta um serloyvi kunnu veitast til veiðu eftir botnfiskasløgum, sum vanliga ikki verða veidd av skipum í fiskidagaskipan.

13. Áseta treytir um fiskiorku í sambandi við útskifting av fiskiførum, soleiðis at lagt verður upp fyri áhaldandi tøkniligum broytingum hjá flotanum.

14. Áseta greiðar reglur fyri, hvørjar fyrisitingarligar avgerðir kunnu takast, um treytir fyri fiskiloyvi/fiskiskapi ikki vera hildnar (fyrisitingarlig bót, afturtøka, niðursett dagatal ella niðursett kvota o.s.fr.).

15. Evna til greiðar reglur at kæra fyrisitingarligar avgerðir, soleiðis at óheft kærunevnd fer at viðgera kærur um fiskiloyvi, fiskiorku, innflutningsloyvi, samanleggingar o.l.

*Skipan av lóggávuni*
Fyri at fáa eina so greiða og einfalda lóggávu sum gjørligt, verður arbeiðsbólkurin biðin um at umhugsa, um tað eru fyrimunir við at skipa fiskivinnulóggávuna í fleiri serstakar lógir. Lógarverkið kundi t.d. verið býtt sundur í eina *umsitingarlóg*, har reglur um loyvi, avhending, gjøld o.l. eru at finna, eina *skipanarlóg*, ið hevur reglur um t.d. økisfriðingar og reiðskap, eina *eftirlitslóg*, sum

ásetir reglurnar um fiskiveiðieftirlit, hagtøl o.l., eina lóg um *fiskirannsóknir og vísindaligar kanningar* umframt eina lóg um *stýring av veiðuni*, har ásetingarnar, ið javnan verða broyttar t.d. fiskidagar, kvotur o.l., eru at finna.

*Arbeiðsháttur*
Settur verður ein fylgibólkur við umboðum frá vinnuni og øðrum týðandi samstarvspørtum, sum arbeiðsbólkurin skal ráðføra seg við um øll týdningarmikil mál, áðrenn endaligt uppskot til ásetingar verður tilevnað.

Landsstýrismaðurin skal javnan kunnast um, hvussu arbeiðið hjá bólkinum gongur, og hvørji útlit eru fyri, at tann lagda tíðarætlanin kemur at halda.

Arbeiðsbólkurin verður biðin um at raðfesta arbeiðsuppgávuna og koma við uppskoti til landsstýrismannin um raðfylgjuna, ið tær einstøku ásetingarnar kunnu leggjast fyri Løgtingið. Arbeiðsbólkurin kann biðja sær serkøna hjálp til at koma við uppskoti til serstakar loysnir ella skipanir.

Arbeiðsbólkurin skal leggja uppskotið til nýggja fiskiveiðilóggávu fram seinast 1. apríl 2006, soleiðis at lógaruppskot kann leggjast fyri Løgtingið á ólavsøku 2006.

# 1. Ogn Føroya fólks

*”Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, sum Føroyar við samráðingum hava rokkið ella eftir altjóða rætti eiga uttan fyri føroysku landleiðinar, eru ogn landsins”*

Soleiðis sigur orðingin í arbeiðssetninginum. Sum øllum kunnugt hevur lógin í dag eina orðing um ”ogn Føroya fólks”, og hevur hendan orðing givið mongum høvuðbrýggj. Fyri at sleppa undan fleiri ivamálum og at sleppa undan óneyðugum kjaki av hesum evni í framtíðini, er skilagott, at nevndin kemur ásamt um nakrar orðingar, sum kunnu standa sum viðmerkingar í lógini. Umframt hetta kann nevndin leggja eina meginregluliga tulking í orðingina, serliga við atliti at, hvussu rættindini skulu býtast til íbúgvar landsins.

Tann fyrsti spurningurin, sum kann viðgerast, er, hvør orðing skal brúkast? Ogn Føroya fólks. Ogn landsins. … hoyrir Føroya landi til. Hendan seinasta orðingin verður nýtt í lógini um kolvetnisvirksemi.

Tann næsti spurningurin er so at fastleggja, hvat meinast við tað, sum her verður sagt.

Orðingin ”Ogn Føroya fólks” er uttan iva komin við inn í føroysku lógina við íblástri úr Íslandi, har teirra lóggáva hevur somu orðing. Í politiska og almenna orðaskiftinum hevur hetta evnið javnan verið frammi: Hvør eigur fiskatilfeingið? Hvør hevur ognarrættindini til hetta tilfeingið? Lógin um vinnuligan fiskiskap sigur greitt, at hetta er ogn hjá føroyska fólkinum – um ein orðaljóðstulking verður nýtt. Men hóast hesa greiðu tulking, so hevur ásetingin verið orsøk til støðugt orðaskifti eisini um atgongdina til tilfeingið.

Sambært vanligari løgfrøðiligari fatan av ognarrættindum, so er tað tann, sum hevur ognarrættin, sum eisini hevur heimild til at ráða yvir góðgripinum. T.d. verður sagt: *”… som betegnelse for en rettighedstype, der er karakteriseret ved, at dens indehaver er berettiget til at råde i enhver henseende, hvor ikke ved lovgivning eller privat viljeserklæring er fastsat særlige begrænsninger herfor*[1]*.”* Men hvussu skal tað føroyska fólkið umsita sítt ræði yvir hesum góðgripi – sum einstaklinga- ella sum samfelagsrættindi?

Trupulleikin kann tó eisini síggjast úr øðrum sjónarhornum. Partvíst um tað í heila tikið er rætt at geva eigaraviðurskiftunum slíkan ans? Í grundini er tað líkamikið, hvør er formellur eigari. Tað sum hevur størri týdning er, hvør og hvussu tilfeingið kann gagnnýtast. Við øðrum orðum: Hvørjar heimildir hava ávís rættindi. Og partvíst um ásetingin um fólksins felags ognarrætt ikki bert er ein endamálsorðing, sum er uttan løgfrøðiligan týdning. Er bert ein politisk yvirlýsing!

Verður hugt í løgfrøðiligar bókmentir, kann støði takast í skilnaðinum rómarrætturin gjørdi á tí, sum eingin átti og tað, sum øll áttu. Fr. Vinding Kruse skrivar, at havið uttan fyri sjómarkið hoyrir ikki til nakran, men heldur ikki tað, sum liggur innan fyri sjómarkið er ogn hjá nøkrum, heldur ikki hjá statinum. Staturin hevur tó samsvarandi sínum yvirvaldsrætti, myndugleika til at taka regulerandi avgerðir. Hann heldur fram: *”Efter 1848 kan ingen, hverken ved hævd eller på anden maade, vinde*

---

[1] Elmer & Skovby, side 13 (1995).

*særskilt ret over nogen del af søterritoriet til udelukkelse af andre, hverken fuldstændig ejendomsret eller en brugsret eller servitut, f.eks. til fiskeri.*[2] *”*

Kaare Bangert, ið hevur skrivað doktararitgerð um sjómark, sigur, at ásetingin av sjómarki hongur saman við stovnsetan av einarætti til at reka fiskiskap[3]. Hann skrivar ikki, at nakar ognarrættur verður stovnaður, men nýtir yvirvaldsrættin á sama hátt sum Vinding Kruse.

Hinvegin setir Peter Pragh fram tað sjónarmið, at tað fylgir eini fólkarættarligari meginreglu, at tað tilfeingi, sum fyrr ikki hoyrdi til nakran, kann við 200 sjómíls búskaparligu sonuni gerast statslig ogn. Hetta sjónarmið er grundað á ”Principle on Permanent Sovereignty over Natural Resourses” hjá ST[4].

Vinding Kruse førir fram, at tað er ein meginregla, at tey virðir í náttúruni, sum ikki eru til orsakað av privatum arbeiðsíløgum hoyrir samfelagnum til. Henda meginregla samsvarar við ta orðing, ið er nýtt í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið í 1994, har orðingin felags samfelagsogn verður nýtt um fiskatilfeingið. Út frá hesum má metast, at tað eru samfelagsins áhugamál, sum koma í fremstu røð.

Aðrastaðni í viðmerkingunum til lógina frá 1994 verður eisini týðiliga skilt ímillum ognarrætt og brúksrætt. Fiskirættindi veita ikki ognarrætt, men brúksrætt.

Løgfrøðiligu bókmentirnar hava ikki eitt eintýðugt svar til spurningin um ognarrættin til eitt tilfeingi sum fiskur, men tann tulkingin, at samfelagsrættindi koma fram um einstaklingarættindi, tá talan er um slíkt tilfeingi, hómast tó greidliga. Sagt á annan hátt kunnu einstaklingarættindi ikki tránýtast soleiðis, at hetta skaðar samfelagsins áhugamál. Fiskiskapur, sum skaðar langtíðarjavnvágina hjá einum fiskastovni, kann tí ikki góðtakast, sjálvt um hetta viðførir, at einstaklingarættindi missa sínar fyrimunir.

**Grundlógarnevndin,** sum varð sett seinast í 90-unum, hevur eisini viðgjørt spurningin um tilfeingi. Í fyrra flaggdagsálitinum verður sagt í § 45:

1. Landsins stovnar varða um tilfeingi landsins.
2. Er ætlanin at vinna úr tilfeingi, tá skal landið krevja gjøld ella tryggja øllum vinnurætt.

Víðari verður sagt her, at ”tilfeingi landsins er tílíkt tilfeingi, ið ikki er ogn ella sambært búrættindunum er rættindi hjá tí einstaka. ….. seinna stykkið skipar mannagongd, tá tilfeingið skal gagnnýtast. Landið skal antin lata øll søkja um loyvi, kvotu ella onnur rættindi á jøvnum føti ella krevja gjøld, ið falla til tað almenna”

Nevndin er samd um, at í lógaruppskotinum verður orðingin ”ogn landsins” nýtt. Í viðmerkingunum til greinina í lógini er neyvari greitt frá hesum, og har verður eisini lagt fast, hvønn týdning orðingin hevur.

---

[2] Vinding Kruse, side 274. (1929).
[3] Bangert, side 49 og 53 (1999).
[4] Pagh, side 160 (1998).

## 2. Burðardygg gagnnýtsla

*Tilfeingið skal troytast og gagnnýtast lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygt.*

Í hesi reglu vera tvey mál orða: lívfrøðiliga burðardygt og búskaparliga burðardygt. Lóggávan á økinum kann so hava nøkur "amboð", sum gera tað møguligt at náa hesum málum.

Tá tosað verður um **búskaparligt burðardygni**, verður í dagligari talu oftast bert meint við, at – tað skal loysa seg – ikki geva undirskot. Hetta er ein háttur at tulka útsøgninga "burðardygt", men til ber at síggja hugtakið í einum breiðari týdningi, har fyrilit verður tikið fyri samfelags-búskaparligum sjónarmiðum (soleiðis sum núverandi § 2 eisini sigur).

Verður tosað um, at nakað skal vera burðardygt, eigur at vera havt í huga eitt samspæl millum menniskju og náttúruna og millum núverandi og komandi ættarlið. Búskaparlig burðardygg gagnnýtsla er, at við framtíðini í huga so skal virðið á einum tilfeingi (kapitali) ikki minka. Verður tosað um natúrligt tilfeingi, sum t.d. fiskur, verður so aftur skilt millum náttúrukapital og fysiskan kapital. Avgerandi er, at eitt fall í náttúrukapitalinum verður uppvigað av øking í fysiska kapitalinum, og at tað búskaparliga avkastið, tilfeingið kann geva, ikki verður tveitt burtur, men kemur samfelagnum til góðar.

Um vit síggja eina búskaparliga burðardygga skipan sum um, at skipanin er góð nokk, um skipini klára seg, so er tað ein einføld skipan, vit hava við at gera. Í umsitingini av tilfeinginum kemur denturin at vera lagdur á at fáa størri og effektivari eindir, til tess at hesi kunnu geva besta úrslitið fyri einstaku eindina. Er tað hinvegin ein breiðari samfelagsbúskaparligur týdningur lagdur verður í hugtakið, eigur eisini dentur at vera lagdur á sjálvt tilfeingið og tað avkast, tilfeingið gevur.

**Lívfrøðiliga burðardygt** má í stuttum merkja, at stovnurin er førur fyri at endurnýggja seg sjálvan. Herundir sambandið millum tilgongd og fiskideyða.

Í fiskifrøðini verður arbeitt við nøkrum ávísum tilvísingarmørkum. Fiskifrøðin (ICES) hevur fyri hvønn fiskastovn, sum metingarnar eru um, roknað tilvísingarmørk, ið kunnu nýtast til eina trygga umsiting av avvarðandi stovni. Hesi eru at rokna sum ávaringarskelti, ið mæla til at tátta í ferðina ella heilt at steðga. Eitt av hesum er tað minsta, gýtingarstovnurin kann vera, áðrenn fiskiskapurin má halda uppat ($B_{lim}$). Hetta verður vanliga sett til tað minsta, gýtingarstovnurin hevur verið roknaður til nakrantíð í stovnsmetingunum. Eitt annað er, tá gýtingarstovnurin er mettur so lítil, at óvissan í stovnsmetingunum ger, at hann kann vera í vanda ($B_{pa}$). Í hesi støðu verður mælt til fyrivarni við at tátta í fiskiskapin, og at leggja eina ætlan fyri at menna gýtingarstovnin aftur yvir nøkur ár. Eitt triðja mark er um veiðitrýstið ($F_{lim}$). Hetta sigur, út frá søguligu gongdini, hvussu hart tað ber til at troyta stovnin, uttan at møguleikin verður ov stórur fyri, at gýtingarstovnurin verður minni enn $B_{pa.}$[5].

[5] Frágreiðing um fiskivinnupolitik frá 2000

Í fiskivinnureglugerðini hjá ES verður burðardygg gagnnýtsla lýst soleiðis: ”udnyttelse af en bestand på en sådan måde, at den fremtidige udnyttelse af bestanden ikki bringes i fare, og således, at den ikke har negativ indvirkning på de marine økosystemer”[6].

Nevndin hevur ikki viðgjørt spurningin, um lógin tryggjar eina burðardygga veiðu. Nevndin hevur hinvegin viðgjørt, um lógin tryggjar karmarnar fyri, at ein burðardygg veiða kann fara fram, t.v.s., at lógin ikki forðar fyri hesum, men heldur eggjar til eina burðardygga veiðu. At skipa eina burðardygga veiðu verður gjørt við teimum amboðum, lógarverkið gevur, og tey, sum hava størsta týdningin, eru: áseting av fiskidøgum, áseting av kvotum og friðaðar/stongdar leiðir. Hesi amboð hava myndugleikarnir. Tey amboð sum vinnan sjálv hevur er, at gjørligt er at tillaga vinnuna til tilfeingið. Umhugsað hevur verið at hava mekanismur í lógini, sum kunnu gera seg galdandi, tá veiðan (fiskidagarnir) skal ásetast, og sum kunnu taka hædd fyri eini lívfrøðiligari burðardyggari veiðu. Tó er eingin slík skipan gjørd í lógaruppskotinum. Nevndin vil tó vísa á, at hesin spurningur er ikki nýggjur, og verður í brotinum niðanfyri endurgivið úr frágreiðingini frá Skipanarnevndini 1999/2000.

## *2.1. Frágreiðing hjá Skipanarnevndini 1999/2000*

Hetta brotið 2.1 er úr frágreiðingini hjá Skipanarnevndini 1999/2000.

### 2. 1.1 Er veiðan lívfrøðiliga burðardygg?

Einki bendir á, at núverandi skipanin ikki kann tryggja lívfrøðiliga burðardygga veiðu undir Føroyum, ella at hon ikki hevur livað upp til síni endamál. Minkandi talið á veiðiloyvum, talið á fiskidøgum og tær stongdu leiðirnar eiga at kunna halda veiðitrýstið á øllum trimum botnfiskastovnum innan rímilig mørk.

Fyri at kanna, um teir tankar, sum eru frammi um at tryggja burðardyggari veiðu við sonevndu fyrivarnisregluni, hevur nevndin samanborið úrslitini av fiskidagaskipanini undir Føroyum við skipanina fyri toskaveiðu undir Íslandi.

### 2. 1.2 Fyrivarnisreglan og samanbering við støðuna í Íslandi

Tilmælið hjá Fiskirannsóknarstovuni er aftur í ár bygt á fyrivarnisregluna. Bygt á grundgevingar um ávís metingarvirði fyri deyðatøl og støðd av gýtingarstovni, kemur FRS til, at tað er ov nógv at taka 33 % av stovninum **í tali** á hvørjum ári.

Grundgevingarnar eru ikki enn lagdar fram í einum formi, sum ger tað møguligt hjá nevndini at taka dagar ímillum, hvat er rætt at velja, og hvønn váða vit seta fiskastovnarnar í, við at velja ymisk tøl fyri, hvat kann veiðast av hvørjum stovni.

Nevndin kann gera sínar egnu útrokningar og kann eisini seta spurningar til tilmælandi stovnarnar og myndugleikarnar um, hvat miðast skal ímóti. Til annað er avgjørt, heldur

[6] Forordning 2371/2002 af 20. desember 2002.

nevndin seg til ein triðing av hvørjum stovni, sum landsstýrið hevur boðað nevndini frá er hitt rættað.

Í orðaskiftinum um fyrivarnisregluna, sum grundarlag fyri burðardyggari veiðu, verður vanliga kravt, at fyri hvønn fiskiskap skal vera ein veiðiregla ("harvest control law" ella "catch rule"), og at reglur skulu vera fyri, hvat skal gerast, um veiðireglurnar ikki halda. Í ICES hevur verið tosað um, at hetta er komið so stutt á leið, at t.d. ES ikki roknar við at kunna fáa hesar skipanir at virka hjá sær fyrstu 5-10 árini.

Niðanfyri verður sagt frá íslendsku veiðiregluni fyri tosk, og verður hetta sammett við støðuna undir Føroyum.

## 2.1.3. Íslendska veiðireglan

Ísland hevur fingið viðurkent í ICES, at um teir veiða 25 % **í vekt** av stovninum av 4 ára gomlum fiski og eldri (B4+), so er veiðan hjá teimum burðardygg, og neyðug fyrivarni eru tikin. Á fylgjandi myndum er roynt at seta upp sama roknistykki fyri Føroyar. B4+ tøl vóru ikki tøk, men hesi tøl vóru tøk fyri tey trý høvuðsfiskasløgini:

Toskur Gýtingarstovnur í vekt stovnurin **í vekt** av 2 ára gomlum fiski og eldri
Hýsa Gýtingarstovnur í vekt stovnurin **í vekt** av 2 ára gomlum fiski og eldri
Upsi Gýtingarstovnur í vekt stovnurin **í vekt** av 3 ára gomlum fiski og eldri




Hýsa undir Føroyum Veiða í vekt í % av stovni
% í vekt
Veiða í % av gýtingarstovni
25 % linja
Veiða í % av 2 ár og eldri
År


Upsi undir Føroyum - Veiða í vekt í % av stovni
% í vekt
Veiða í % av gýtingarstovni
25 % linja
Veiða í % av 3 ár og eldri
År

Sum tað sæst, fara kurvarnar upp og niður gjøgnum árini. Verður gýtingarstovnurin nýttur, er fyri tosk og upsa veiðan í vekt næstan øll árini omanfyri 25 %, men verður vektin av stovninum av fiski eldri enn 2 ella 3 ár, so er tað á góðari leið at siga, at fiskiskapurin liggur um 25 % í vekt í miðal. Hýsan uppfyllir veiðiregluna, sama hvørja vekt tú brúkar.

Eftirlitsreglan hjá Skipanarnevndini kundi tá t.d. verið, at er veiðan av einum fiskaslagi 3 ár á rað meira enn 5 % omanfyri 25 % í vekt, mugu tiltøk setast í verk fyri at avmarka veiðuna. Er veiðan av øllum trimum fiskasløgum 2 ár á rað omanfyri 25 % í vekt, so má fiskidagatalið yvirhøvur eftirroknast.

Hvønn part av stovninum ber ikki til at avgera nú, men ein leið kundi verið at spurt tilmælandi stovnarnar henda spurning:

Um veiðireglan verður, at fiskidagar og stongdar leiðir verða ásettar, so at veiðan ikki fer upp um 25% av stovnsvektini av fiski omanfyri x ára aldur, hvørji eru so sannlíkindini fyri, at veiðan er burðardygg.

## 2.2 Fyrivarnisreglan

Fyrivarnisreglan sigur, at vantandi vísindalig vitan kann ikki nýtast sum undanførsla fyri at taka avgerðir um verju av tilfeinginum. Fyrivarnisreglan stavar frá ST-avtaluni um varðveiting og umsiting av ferðandi fiskastovnum frá 1982 og staðfest á Føroya Løgtingi 28. apríl 2000.[7]

Í frágreiðingini um fiskivinnupolitikk, sum varð løgd fyri Føroya Løgting, segði tásitandi landsstýrismaður m.a. um hetta mál:

”Fyrivarnisreglan hevur bæði eina lívfrøðiliga og samfelagsliga síðu. Lívfrøðiliga miðar hon eftir, at gýtingarføri parturin av einum fiskastovni altíð er nóg stórur til, at hann er førur fyri at endurnýggja seg sjálvan. Fyri samfelagið, og búskaparliga, er endamálið at tryggja so langt sum gjørligt, at inntøkurnar og veiðigrundarlagið er so støðugt sum gjørligt.

Ein treyt fyri fyrivarnisregluni er, at ein veiðisetningur (catch control rule) verður settur um, hvussu stóran part av hvørjum fiskastovni sær ráðiligt er at fiska í miðal hvørt árið, og at veiðiorkan verður lagað til hesa nøgd. Fyri tosk og hýsu undir Føroyum er hesin í løtuni 33% í tali.

Grundarlagið undir ásetan av einum veiðisetningi eru vísindaliga grundaðar stovnsmetingar saman við metingum av samfelagsliga tørvinum í eitt ávíst áramál fram í tíðina. Í Føroyum hevur fiskivinnan so stóran týdning fyri búskapin, at fyrivarnisreglan kann ikki bert virka eftir lívfrøðiligum metingum. Samfelagið er so viðbrekið, at tað tolir ikki ov stór útsving. Tess vegna mugu samfelagsligu og lívfrøðiligu fyrivarnini samspæla.”

---

[7] Sáttmálin, har nærri stendur um fyrivarnisregluna, kann lesast á hesi leinkjuni:
http://www.logting.fo/logtingsmal/logtingmal99/vanlig%20tingmal/088.99%20ST-havraettarsattmali.htm

Í ES-rættinum er fyrivarnisreglan nærri lýst við tað, at hon verður knýtt at fyrivarnisgrundregluni, sum er umtalað í EF-traktatini, og sum verður nýtt á umhvørvisøkinum. Við at gera hetta, verður fyrivarnisreglan knýtt at nøkrum, sum ES-rætturin kennir frammanundan og tí kann brúkast sum aktivt amboð í stýringini av fiskivinnuni.

Fyrivarnisgrundreglan er umtalað í grein 174 í EF-traktatini og inniber, at almenna heilsan, tryggleiki og umhvørvi koma fram um búskaparlig áhugamál, har óvissur eru um hesi. T.v.s. eru óvissur um t.d. ávirkanina á heilsuna av onkrum heilivági, skal óvissan vinna á vantandi vitanini um ávirkanina.

Okkum kunnugt er hetta tó ikki brúkt enn á fiskivinnuøkinum, men sannlíkt er, at mál av hesum slag kunnu  koma í framtíðini.

Nevndin er samd um, at fyrivarnisreglan er ein týðandi meginregla í umsitingini av fiskatilfeinginum, og eigur henda regla at vera vird. Nevndin hevur tó ikki tikið støðu til sjálvan veiðisetningin, tá hetta liggur uttanfyri arbeiðssetning nevndarinnar. Umsitingin av fiskastovnunum eigur at taka fyrilit fyri tí týdningi, fiskivinnan hevur fyri føroyska samfelagið, og tí mega sveiggini í fiskiskapinum tálmast.

# 3. Verandi loyvisskipan

Í hesum kapitli verður rættarstøðan í verandi loyvisskipan gjøgnumgingin. Verandi loyvisskipan byggir á ymisk sløg av loyvum, ið givin vera til tess, at vinnuligur fiskiskapur kann rekast. Talan er um veiðiloyvi, fiskiloyvi, serloyvi og royndarloyvi. Fiskidagar og kvotur eru ásett í fiskiloyvinum.

Fiskirættindi, ásett í veiði- og fiskiloyvi og tillutan av kvotum og fiskidøgum, geva ikki teimum sum nýta hesi rættindi ein ognarrætt í vanligum týdningi. Hesi rættindi eru brúksrættindi til partar av tí tilfeingi, sum er ”ogn Føroya fólks”. Brúksrættindini eru avmarkað bæði í tíð og veiðihátti.

## *3.1. Veiðiloyvi*

Greitt er, at neyðugt er við avmarkingum til atgongdina til fiskatilfeingið, fyri at gagnnýta hetta skilagott. Hugsanin aftanfyri er, at um ein og hvør kann fiska sum honum listir, so vilja øll royna at fiska sum mest, t.v.s. størstu nøgdina, og harvið er vandi fyri, at ein fiskastovnur verður niðurfiskaður.

Í føroyskari fiskivinnuumsiting vóru veiðiloyvi innførd við kunngerð nr. 35 frá 5. mai 1987. Hetta var gjørt fyri at avmarka tilgongdina til vinnuna, júst fyri at umganga trupulleikarnar við niðurfiskaðum fiskastovnum. Men bert at áseta eitt tal á veiðiloyvum loysir tó ikki trupulleikan, um tilfeingið er avmarkað. Neyðugt er í slíkum førum at avmarka veiðuna til hvørt loyvi ella hvørt fiskifar. Vanligt er at gera hetta við kvotum, og var hetta eisini loysnin, sum var vald, tá lógin um vinnuligan fiskiskap kom í 1994.

Royndirnar av hesi skipan vístu seg tó ikki at vera nøktandi, og tí var skipanin við fiskidøgum innførd í 1996, har hvørt skipið fekk eitt ávíst tal á fiskidøgum.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap er í § 5, stk. 3 veiðiloyvi allýst sum: *Veiðiloyvi sambært hesi lóg fyri fiskifør, onnur enn tey, ið koma undir bólk 5 sambært § 28, stk. 1, er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar.*

Veiðiloyvi kann sostatt vera útgreinað sum loyvi á føroysku landleiðunum og loyvi uttan fyri føroysku landleiðirnar. Orðingin í § 5, stk. 3: ”*Veiðiloyvi … er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitur ávísum fiskifari*”, má skiljast soleiðis, at tað í grundini er ein góðkenning av ávísum fiskifari, sum eigarin av fiskifarinum fær.

Í kunngerð nr. 54 frá 26. mars 1993 um veiðiloyvi til føroysk fiskiskip, verður í § 3 sagt um treytirnar fyri veiðiloyvinum: *”Treyt fyri veiðiloyvi er, at skipið er løggilt, og at ásetingar í kunngerðum og veiðiloyvum, herundir serligum fiskiloyvum, viðvíkjandi reglum um fiskiskap, veiðireglum, uppgávuskyldum o.ø. verða hildnar, og at broytingar, umbyggingar o.a. ikki munandi hava broytt veiðiorku og fiskimøguleikar.”*

Í § 31, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap er ásett, at talið á veiðiloyvum, ið koma undir fiskidagaskipan og skipan við hjáveiðu eftir botnfiskasløgum, er tað talið, sum var útskrivað pr. 1. januar 1995. T.v.s., at talan kann vera um veiðiloyvir, sum eru fevnd av § 31 og onnur veiðiloyvir – tey sum ikki eru í fiskidagaskipan og skipan við hjáveiðu eftir botnfiski. Í dag eru veiðiloyvini, ið fevnd eru av § 31, stk. 1 – í fiskidagaskipan - og tillutaðu fiskidagarnir víst í talvu 1.

Í lógini er eftir § 8 møguligt at leggja veiðiloyvir saman, soleiðis at talið á veiðiloyvum kann gerast minni enn tað, sum var pr. 1. januar 1995. Hetta er eisini farið fram. Í 1996 var talið 160, og í dag er tað 120. At talið á veiðiloyvum í dag er lægri enn 1. januar 1995 inniber ikki, at til ber at økja talið aftur upp til talið, ið var 1. januar 1995. Í almennu viðmerkingunum til 1994-lógina gongur greitt fram, at meiningin við hesi áseting er, at tey sum vóru í vinnu tá, eru tey, sum eisini kunnu halda fram í nýggju skipanini. Lækkingin av talinum er ein natúrlig fylgja av § 8, og skuldi fiskiorkan sostatt verið tann sama sum í 1995, men býtt út á færri fiskifør.

| Bólkur | Lýsing | Tal á loyvum 05/06 | Tal á fiskidøgum | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Lemmatrolarar | 12 | Ongar avmarkingar | |
| 2 | Partrolarar | 29 | 5752 | |
| 3 | Línuskip størri enn 110 tons | 25 | 3578 | |
| 4A | Útróðrarbátar millum 15 - 40 tons | 25 | 1770 | |
| 4B | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu | 21 | 2067 | |
| 4T | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu | 14 | 1766 | |
| 5A | Útróðrarbátar minni enn 15 tons á húkaveiðu – fullriknir (60%) | | 12741 | Hava ikki veiðiloyvi, bert fiskiloyvi |
| 5B | Útróðrarbátar minni enn 15 tons á húkaveiðu – aðrir (40%) | | 8494 | Hava ikki veiðiloyvi, bert fiskiloyvi |

**Talva 1.**
*Tølini í talvuni eru fyri fiskifør sum royna á føroysku landleiðini og eru í fiskidagaskipan og skipan við hjáveiðikvotu eftir botnfiski.*
*(Kelda: Fiskivinnustovan)*

Serligar reglur eru fyri bólk 5. Hesir nýtast ikki veiðiloyvi fyri at reka vinnuligan fiskiskap, men bara fiskiloyvi. Í viðmerkingunum til § 31, stk. 2 verður sagt, at bátar minni enn 15 tons, sum vóru í flotanum fyri 1. januar 1995 og hava verið tað síðani, kunnu fáa fiskiloyvi. § 31, stk. 2 gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta nærri reglur um umsiting av fiskiloyvum til hendan bólkin, og kann hendan heimild, eftir viðmerkingunum at døma, nýtast til at geva fiskiloyvi til bátar, sum av ymiskum orsøkum ikki vóru í vinnu miðskeiðis í 1990´unum. Sí kunngerð nr. 105 frá 14.09.2005, seinast broytt 10. januar 2006. Av hesi orsøk er talið á loyvum í bólki 5 eisini økt gjøgnum árini.

Í viðmerkingunum til § 11 í upprunalógini verður sagt, at veiðiloyvi er tann rætturin, landsstýrið letur ávísum fiskifari at veiða á landleiðunum og uttan fyri landleiðirnar fyri eitt ár í senn. Út frá hesum má sigast, at veiðiloyvi bert er galdandi í eitt ár! men hevur hetta ikki verið nýtt.

Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at eitt skip bert kann hava eitt veiðiloyvi, men fleiri fiskiloyvi.

### 3.1.1 Veiðiloyvi til fiskiskap uttanfyri fiskidagaskipan

Tá fiskimørkini í norðurhøvum vórðu flutt út á 200 fjórðingar misskeiðis í 1970´unum, hevði hetta stórar fylgjur fyri føroyska fiskiflotan. Langfarafiskiskapur hevði gjøgnum fleiri áratíggju verið ein týðandi partur av fiskiskapinum.

Í føroyskum øki fer fiskiskapur fram eftir fiskasløgum, sum ikki eru í fiskidagaskipan, t.d. svartkjaftur og gulllaksur.

Tann parturin av fiskiflotanum, sum fiskar hesi fiskasløg og á hesum leiðum, er eisini fevndur av lógini um vinnuligan fiskiskap, og krevst eisini veiðiloyvi til tess at reka vinnuligan fiskiskap, sbr. § 7, stk. 1, § 11, stk. 1 og § 21, stk. 1.

Tað er ikki í lógini nakað krav um tal á hesum veiðiloyvum, so sum meginregla ber til at geva nýggj veiðiloyvi, um hetta ikki er ímóti endamálinum við lógini. Í praksis eru nýggj veiðiloyvi givin í ávísum tíðarskeiðum. Hetta hevur verið til eitt nú fiskiskap eftir uppsjóvarfiski, og má metast at vera treytað av politisku vindunum!

Sbrt. § 8, stk. 1, 2. punktum kann undantak verða gjørt frá kravinum um, at fiskiorkan skal vera minni ella tann sama, tá talan er um fiskifør til uppsjóvarfiskasløg, rækjur ella til fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar. Hendan heimid krevur, at umsøkjarin hevur veiðiloyvi frammanundan. Heimildin er brúkt eitt nú til skip sum fiska uppsjóvarfisk, har skip við størri fiskiorku eru komin inn fyri fiskifør við minni fiskiorku.

### 3.1.2 Onnur loyvir til at veiða

Skip kunnu tó fiska uttan veiðiloyvi. Landsstýrismaðurin hevur í § 5, stk. 4 heimild til at: *Fiskiloyvi kann eisini verða latið eigara av fiskifari, sum ikki hevur veiðiloyvi sambært stk. 3, soleiðis at veitt verða fyribils ella avmarkað rættindi at veiða ávísa nøgd/dagatal úr fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.*

Í løtuni eru eingi fiskiloyvi eftir hesi heimild, men hevur hetta verið brúkt í einstøkum førum, serliga til rækjufiskiskap á Flemish Cap.

Fiskirannsóknarstovan hevur loyvi til at fremja vísindaligar fiskirannsóknir, uttan mun til ásetingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Hetta má innibera, at til hesar fiskirannsóknir er hvørki neyðugt við veiðiloyvi ella fiskiloyvi.

Møguligt er at reka royndarfiskiskap, sum krevur serstakt loyvi frá landsstýrismanninum. Royndarfiskiskapur er vanliga avmarkaður til ávísan reiðskap ella roynd eftir ávísum fiskasløgum.

Er talan um eina undirvísingar- ella menningarætlan, kann landsstýrismaðurin eisini geva loyvi til fiskiskap, hetta uttan mun til ásetingarnar í lógini. Tað má so eisini innibera, at ikki er neyðugt við veiðiloyvi og fiskiloyvi, fyri at reka fiskiskap eftir hesi áseting. Tað var við hesi áseting, at Næraberg byrjaði sína roynd eftir svartkjafti og virkan av surimi.

Hesi 3 seinastu loyvini til fiskiskap stava frá § 20 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

## *3.2 Fiskiloyvi*

Fyri at kunna reka vinnuligan fiskiskap, er neyðugt at hava fiskiloyvi. Til ber at reka vinnuligan fiskiskap uttan veiðiloyvi, men ikki uttan fiskiloyvi, sbr. § 7, stk. 1 og § 11, stk. 1. Sí eisini kunngerð nr. 36 frá 16. mars 1990 um veiðu hjá skipum, skrásett í Føroyum, uttan fyri landleiðina.

Undantøk eru tó eisini til kravið um fiskiloyvi - sí brotið omanfyri.

Í § 5, stk. 4 verður neyvari lýst, hvat fiskiloyvi er*: **Fiskiloyvi** sambært hesi lóg er tann rættur, sum landsstýrismaðurin hevur latið eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi sambært stk. 3 at veiða **ávíst fiskidagatal og/ella** ávísa nøgd úr ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.*

Í kunngerð nr. 36 frá 16. mars 1990 um veiðu hjá skipum, skrásett í Føroyum, uttan fyri landleiðina, er fylgjandi orðing um fiskiloyvi, og hvat fiskiloyvið skal innihalda: *Fiskiloyvið er tíðaravmarkað. Í loyvinum eru ásetingar um veiðireglur, veiðinøgdir, fráboðanarskyldur v.m. Við fiskiloyvinum fylgja eisini tær reglur, sum eru ásettar av teimum myndugleikum, sum hava eftirlitið við fiskiskapinum á tí fiskiøki veitt verður á, ella reglur ásettar av millumlandanevndum á leiðum í altjóðasjógvi.*

Høvuðsreglan í lógini er, at fiskiloyvi bert verður givið til persónar ella feløg sum eiga fiskifar, sum hevur veiðiloyvi, sbr. § 12. Bátar minni enn 15 tons nýtast tó ikki veiðiloyvi fyri at fáa fiskiloyvi.

Í viðmerkingunum til § 11 í upprunalógini verður sagt, at fiskiloyvi ásetir nærri ta nøgd úr fiskastovninum, sum eitt skip, sum hevur veiðiloyvi, kann veiða eftir nærri ásettum treytum í fiskiloyvinum. Hesar viðmerkingar eru í samsvari við orðingina í § 5, stk. 4.

Eitt skip kann hava fleiri fiskiloyvi.

## 3.3 Ræði á kvotum og fiskidøgum

Núverandi lóg er, sum kunnugt, upprunaliga gjørd til eina kvotuskipan, har dentur verður lagdur á at regulera nøgdina, ið tikin verður úr einum fiskastovni. Her er amboðið kvotur. Við broytingini í lógini í 1996 var í høvuðsheitum farið frá kvotuskipan til fiskidagaskipan, har tað eru veiðievnini hjá flotanum, sum verða regulerað. Her verður serliga hugsað um fiskiorkuna.

| Slag | Tal 2005 | Lýsing | Annað |
|---|---|---|---|
| Hummari | 52 | Fiskiloyvi, felagskvota á Tangafirði og har um leiðir, egin kvota | Kunngerð nr. 97 frá 22/9-1982 – sigur einki um tal |
| Gulllaksur | 4 | Fiskiloyvi, leiðir, hjáveiðireglur | Kunngerð nr. 13. frá 18/1-1993. Sagt verður, at í mesta lagi 6 loyvir (3 pør) verða givin. |
| Havtaska og svartkalvi | 8 | Fiskiloyvi, leiðir, hjáveiðireglur | Gørn. Kunngerð nr. 62 frá 17/9-2004 Talið er 4+3+1+1 |
| Jákupsskel | 1 | Fiskiloyvi, hjáveiðimark | |
| Rækjur | 1 | Fiskiloyvi | |
| Svartkjaftur | 8 | Fiskiloyvi | |
| Svartkjaftur til matna | 6 | Fiskiloyvi | |
| Heystgýtandi sild | 7 | Egnar kvotur | |
| Troling innan fyri 12 fj. | 14 | Fiskiloyvi | Kunngerð nr. 91 frá 30/5-2003. Upp til 15 fiskifør kunnu fáa loyvi. Kunngerð nr. 32 frá 27/5-2004 |

**Talva 2**
*Fiskiskapur á føroysku landleiðunum uttanfyri fiskidagaskipan*
(Kelda: Fiskivinnustovan)

| Slag | Tal 2005 | Lýsing | Annað |
|---|---|---|---|
| **Rækjur:** | | | |
| Rækjur í Eysturgrønlandi | 6 | Egin kvota | |
| Rækjur við Svalbard | 5 | Felags fiskidagar | |
| Rækjur við Jan Mayen | 1 | Felags kvota | |
| Rækjur í NAFO-øki 3M | 5 | Felags fiskidagar | |
| Rækjur í NAFO-øki 3L | 4 | Egin kvota | |
| Rækjur í russiskum sjógvi | 6 | Felags kvota | |
| Royndarloyvi rækjur í NE-Grønlandi | 0 | Felags kvota | |
| | | | |
| **Botnfiskur**: | | | |
| Botnfiskur í Barentshavinum | 4 | Egin kvota | |
| Botnfiskur í Íslandi (lína) | 24 | Egin kvota | |
| Botnfiskur í Íslandi (snella) | 5 | Egin kvota | |
| Kalvi í Íslandi | 4 | Egin kvota | |
| Svartkalvi í NAFO-øki | 2 | Egin kvota | |
| Svartkalvi í Eysturgrønlandi (ES) | 2 | Egin kvota | |
| Svartkalvi í Vesturgrønlandi (ES) | 1 | Felagskvota | |
| Kongafiskur í Eysturgrønlandi (ES) | 2 | Egin kvota | |
| Royndarfiskiskapur í Eysturgrønlandi eftir botnfiski | 3 | Hámark fyri hjáveiðu av svartkalva og toski | |
| Botnfiskur í ES (Rockall), lína | 1 | | |
| Botnfiskur í ES, blálonga | 5 | | |
| Upsi í Norðsjónum | 6 | Felagskvota | |
| Botnfiskur og rækjur í altjóða sjógvi (NEAFC) | 13 | Eingin hámarksveiða | |
| Ídnaðarfiskur í norskum sjógvi | 6 | Felagskvota við hjáveiðihámarki fyri sild og upsa | |
| Ídnaðarfiskur í ES sjógvi | 6 | Felagskvotur | |
| | | | |
| **Uppsjóvarfiskur:** | | | |
| Kongafiskur í Irmingarhavinum | 4 | Egin kvota | |
| Sild í Skagerrak, ES sjógvi | 4 | Egin kvota | |
| Norðhavssild í altjóða, íslendskum og føroyskum sjógvi | 13 | Egnar kvotur (nótaskip), felagskvota (ídnaðartrol) | |
| Svartkjaftur í íslendskum sjógvi | 14 | Eingin hámarksveiða | |
| Svartkjaftur í ES sjógvi | 10 | Felagskvota | |
| Svartkjaftur í altjóða sjógvi (NEAFC) | 12 | Eingin hámarksveiða | |
| Svartkjaftur í norskum sjógvi (n.f. 62°N) | 0 | Felagskvota | |
| Rossamakrelur í ES sjógvi | 3 | Felagskvota | |
| Rossamakrelur í norskum sjógvi | 3 | Felagskvota | |
| Makrelur í føroyskum, altjóða, norskum og ES sjógvi | 7 | Egin kvota | |

**Talva 3**
*Loyvir til fiskiskap uttan fyri føroysku landleiðirnar*
*(Kelda: Fiskivinnustovan)*

Hevur fiskifarið veiðiloyvi, og eigarin fingið fiskiloyvi, krevst ræði á kvotum ella fiskidøgum fyri at kunna fara til fiskiskap, sbr. § 11, stk. 2.

Hesin rætturin til fiskidagar, egnan kvotupart og egna hjáveiðikvotu hevur gildi fyri 10 ár í senn sambært viðmerkingunum til § 13.

### 3.3.1 Fiskidagar og kvotur

Fiskiloyvi og fiskidagatal, ella ávís kvota, hanga saman við tað, at tað er í fiskiloyvinum, at hesi rættindi vera givin. Fiskidagatalið verður ásett fyri eitt fiskiár í senn. Fiskiárið er frá 1. september til 31. august. Løgtingið ásetir á hvørjum ári samlaða talið á fiskidøgum til teir ymisku bólkarnar. Hesir vera síðani býttir javnt millum øll fiskifør í hvørjum bólki sær, tó verður hædd tikin fyri umseting av fiskidøgum millum skip og bólkar.

Rætturin til fiskidagar/kvotur verður givin fyri eitt ávíst fiskiár, sbr. § 5, stk. 4. Hesin rættur hevur tó gildi 10 ár í senn sbrt. § 13, stk. 1. Í viðmerkingunum sæst, at ásetingin skal skiljast soleiðis, at fiskirættindini í fiskiloyvinum verða latin fyri 10 ár í senn galdandi frá fiskiársins byrjan. Í fiskiloyvinum vera rættindini fyri inniverandi fiskiár talfest. Árið eftir vera rættindi aftur givin fyri næstu 10 árini o.s.fr. Hetta kann skiljast soleiðis, at ein eigari av einum skipi hevur krav uppá ein ávísan part av samlaðu fiskidøgunum ella kvotunum, sum verða tillutað tí ávísa skipabólkinum í eitt 10 ára tíðarskeið. Sambært viðmerkingunum eru hesi rættindi tó avmarkað í tíð, tá tey ikki kunnu hava gildi longri áramál enn veiðiloyvið hevur gildi.

Tey fiskifør, ið eru fevnd av fiskidøgum eru víst omanfyri, sí talvu 1.

Eru allir fiskidagarnir hjá einum fiskifari brúktir, fellur fiskiloyvið burtur sbrt. § 18, stk 2. Sama er galdandi, tá kvota er uppfiskað.

Kvoturættindi kunnu verða veitt sum felags kvotupartur, sum er partur av heildarkvotu hjá einum bólki av fiskiførum. Hesi rættindi kunnu verða givin til fiskastovnar, sum ikki eru í fiskadagaskipan. Eisini kunnu kvoturættindi verða veitt sum egin kvotupartur, sum er ein prosentpartur av eini felagskvotu, ið verður latin einum persóni ella felagi at fiska.

Í § 5, stk. 8 eru ásetingar um hjáveiðipart og egna hjáveiðikvotu. Hjáveiða kann bæði verða lutað út á einstøku fiskiførini og til ein bólk av fiskiførum. Sum skilst á viðmerkingunum er henda áseting serliga til djúpvatnstrolararnar, sum ikki eru í fiskidagaskipan, og til serloyvir.

Verður kvotupartur latin inn aftur óbrúktur, hevur landsstýrismaðurin heimild til at lata hendan sum egnan kvotupart til annað fiskifar, sbr. § 17.

## *3.4. Aðrir spurningar viðv. loyvum*

### 3.4.1 Loyvir - tá skip ganga burtur

Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur ikki nakra beinleiðis áseting um, hvat hendir við fiskirættindunum, tá skip gongur burtur.

Mannagongdin hevur verið tann, at tá skip gongur burtur, fellur veiðiloyvið eisini burtur, tá hetta jú er knýtt at skipinum. Men gjørligt hevur tó verið at fáa flutt veiðiloyvið til annað fiskifar.

Henda mannagongd er eisini staðfest í dómi í Føroya Rætti frá 27. august 2002 (sak nr. 1588/2000).

### 3.4.2 Loyvir - tá skip vera seld á tvingsilssølu

Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur ikki nakra ítøkiliga áseting um, hvat skal henda við fiskirættindum, tá skip vera seld á tvingilssølu.

Sum útgreinað omanfyri, so er veiðiloyvi ein góðkenning, ið verður givin fiskifarinum til at veiða, meðan fiskiloyvi verður givið eigara av ávísum fiskifari. Í fiskiloyvinum verður so ásett, hvar og hvat kann fiskast.

Í notati frá 12. oktober 1990, ið Jalgrím Hilduberg hevur skrivað, verður m.a. sagt, at skiftir skip eigara vegna tvingsilssølu, missir upprunaligi eigarin fiskiloyvið til tann nýggja eigaran av skipinum, tí neyðugt er, at tann til eina og hvørja tíð verandi eigari av skipinum hevur fiskiloyvið. Seinni er viðmerkt á notatið, at fiskiloyvi merkir veiðiloyvi.

Í notati til fíggingarstovnarnar, dagf. 19.11.1991, verður m.a. sagt, at: ”Landsstýrið hevur í tveimum førum samtykt, at veiðiloyvið verður endurnýggjað:

1) Tá skip fer um eina tvingsilssølu og veðhavarar kunnu siga, at veðvirðið hvørvur, um veiðiloyvið dettur burtur.
2) Um skip gongur burtur. Í hesum føri hevur landsstýrið veitt veiðiloyvi til tann, sum hevur mist skipið.

Grundarlagið fyri landsstýrisins samtykt er, at víst verður til notatið frá Jalgrím Hilduberg[8].

Við dómi í Føroya Rætti 6. august 2002 verður spurningurin um fiskiloyvi (troling innan fyri 12 fjórðingar) viðgjørdur í sambandi við tvingsilssølu. Spurningurin um veiðiloyvi verður ikki viðgjørdur. Í dóminum verður sligið fast, at fiskiloyvi verður givið eigaranum og fylgir ikki skipinum. Tó kann Fiskimálaráðið (tá Fiskimálastýrið) ikki tilvildarliga avgera, hvør fær fiskiloyvi, og er tað ikki sakliga grundað at nokta at lata fiskiloyvið fylgja við á tvingsilssølu, tá vanligt er, at loyvið verður flutt við vanligari sølu. T.v.s., at niðurstøðan er: ”at der har været tale om forskelsbehandling, der ikke er sagligt begrundet.”

Ætlan landsstýrisins í 1991 var, at veiðiloyvi kundu takast frá skipum, sum vórðu seld á tvingsilssølu. Fylgjan hevði verið, at hesi skip ikki fingu fiskiloyvi.

Eftir lógini um vinnuligan fiskiskap frá 1994 verður veiðiloyvi knýtt at ávísum fiskifari og givið hesum fiskifari. Skiftir fiskifarið eigara, fylgir veiðiloyvið við, um nýggi eigarin uppfyllur treytirnar, ið lógin annars setir. Sambært dóminum í Føroya Rætti frá august 2002, so fylgir

[8] Notatið viðv. upphøggingarstuðli, men kemur eisini inn á veiðiloyvi, tá skip ganga burtur ella vera seld.

fiskiloyvið ikki við av sær sjálvum, tá skip verður selt um tvingsilssølu. Tala saklig atlit fyri tí, so kann fiskiloyvi verða noktað einum nýggjum eigara av fiskifarinum.

### 3.4.3 Loyvir – tá skip vera leiguskrásett – skráseting undir fremmandum flaggi[9]

Føroysk lóggáva loyvir, at ikki føroysk skip kunnu leiguskrásetast í Føroyum, tá eitt av høvuðskrøvunum er til staðar, nevnliga, at skipið ikki er føroyskt skip. Tískil kann eitt leiguskrásett skip í Føroyum ikki vera føroyskt.

Tá skip er leiguskrásett, fær skipið føroyskt tjóðskaparbræv og fær loyvi at sigla við føroyskum flaggi. Hetta merkir, at skipið er at meta sum føroyskt, tá umræður løgdømi og rættardømi. Skipið skal lúka somu krøv sum føroysk varandi skrásett skip, og somuleiðis halda seg til galdandi lóggávu eins og føroysk skip.

Tá umræður ognarviðurskiftir, er annað galdandi. Leiguskrásett skip eru varandi skrásett í øðrum landi. Veðrættindir ella onnur rættindir kunnu ikki skrásetast í leiguskrásettum skipi í Føroyum, men eru skrásett í heimlandinum, har skipið eisini er varandi skrásett. Sostatt er skipið **ikki** at meta sum føroyskt skip, tá tað viðvíkir ognarviðurskiftum, men er at meta sum føroyskt, tá umræður galdandi lóggávu, ið ásetir krøv til manning og skip.

Tað eru tvey rættarlig hugtøk galdandi, tá umræður leiguskráseting av skipum viðvíkjandi lóggávuvaldi og rættardømi.

1) Ognarrættur, veðrættindi og onnur rættindi í einum leiguskrásettum skipi eru undirløgd tí lóggávuvaldi og rættardømi, har skipið er varandi skrásett, meðan
2) skipið og tess virksemi umborð kemur undir føroyskt lóggávuvald og rættardømi.

Havandi í huga § 1, stk. 1 í skipaskrásetingarlógini, ið ásetir nær eitt skip kann vera mett sum verandi føroyskt: "*Fyri at skip skal kunna metast sum føroyskt …, má eigarin vera føroyskur*" og omanfyristandandi, er eitt leiguskrásett skip í Føroyum sostatt ikki at meta sum eitt føroyskt skip, tá umræður ognarviðurskiftini.

Ein skipan við leiguskráseting er ikki í samsvari við § 7 í lógini um vinnuligan fiskiskap, tí í § 7, stk. 1 er ásett, at vinnuligur fiskiskapur sambært hesi lóg kann bert fara fram við fiskiførum, *sum sambært ognarviðurskiftunum til eina og hvørja tíð eru heimahoyrandi í Føroyum*.

Í § 7, stk. 5 er ásett, at landsstýrismaðurin kann í heilt serstøkum førum gera undantøk frá treytunum sambært hesi grein.

[9] Partur av svari landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gav 11. august 2005 til spurningar settir av Vinnunevndini.

Í viðmerkingunum til hesa áseting, sum stavar frá upprunalógini, verður sagt, at í serstøkum førum kann landsstýrið gera undantak, t.d. um útlendingar hava áhuga at royna eftir fiskasløgum á leiðum, ið føroyingar ikki hava áhuga í, men kann koma at hava týdning fyri samfelagið seinni.

Henda undantaksregla er tí neyvan ætlað til at gera eitt alment undantak frá treytini um, at ognarviðurskiftini til eina og hvørja tíð eru heimahoyrandi í Føroyum.

### 3.4.4 Brúksskylda og loyvir

Í §§ 14 og 15 verður ásett, at treytin fyri at avhenda er, at 60% av egnum fiskidøgum/kvotum er nýtt í fiskiárinum frammanundan. Í lógini er einki krav um brúksskyldu, uttan í tí førinum har avhending av fiskidøgum og kvotum skal fara fram. Vantandi kravið um almenna brúksskyldu hevur við sær, at eigari kann fáa fiskiloyvi útskrivað ár um ár, uttan at nýta hesi rættindi.

Veiðiloyvir liggja vanliga ikki ónýtt. Hinvegin kunnu rættindi í fiskiloyvum liggja ónýtt. T.d. er tað ógvuliga ymiskt, hvussu teir ymisku bólkarnir nýta sínar tillutaðu dagar.

Landsstýrismaðurin kann lata ónýttar kvotur til annað fiskifar sambært § 17, men treytað av, at antin er hetta partur av kvotu, sum er latin aftur, ella skal hetta vera partur av heildarkvotu, ið ikki er tillutað sum kvotupartur.

## *3.5 Tíðaravmarkingar til veiði- og fiskiloyvi*

Sambært § 13 hevur rætturin til fiskidagar, egnan kvotupart og egna hjáveiðikvotu gildi í 10 ár í senn. Henda áseting kom inn í lógina við eini lógarbroyting í 1998. Henda áseting eigur at vera lisin við tí fyri eyga, at ymisk tíðarskeið hava verið nýtt, tá talan er um at geva rættindi, bæði veiðiloyvi og fiskiloyvi. Her skulu hesi viðurskifti vera nærri greinað.

**Veiðiloyvi**
Orðaljóðið í § 5, stk. 3 í upprunalógini frá 1994 er, at: „*veiðiloyvi verður útskrivað fyri eitt ár í senn.*“ Í viðmerkingunum til hesa grein verður einki meira sagt um hetta. Men eftir viðmerkingunum til § 11 at døma, ið stava frá upprunalógini, so er veiðiloyvi: „*rætturin, landsstýrið letur ávísum fiskifari at veiða ....... fyri eitt ár í senn*“.

Við løgtingslóg nr. 58 frá 2. juni 1995 verður reglan um útskriving av veiðiloyvi fyri eitt ár í senn strikað. Viðmerkingin til broytingina er: „*Skipanin við veiði- og fiskiloyvum ger, at tað er ikki neyðugt at endurnýggja veiðiloyvið hvørt ár, meðan fiskiloyvið fylgir fiskiárinum og verður endurnýggjað*“.

Við Ll. nr. 84 frá 6. juni 1997 verður skilnaður gjørdur á tíðarskeiðinum veiðiloyvi eru galdandi fyri bólk 5 og so aðrar bólkar. Tá verður sett inn í § 5, stk. 3, at veiðiloyvi til fiskifør í bólki 5 er galdandi fyri 2 ár. (Henda 2 ára áseting verður seinni broytt til upp til 5 ár.)

Her siga viðmerkingarnar: „*Fyri fiskifør yvir 15 BRT fara veiðiloyvini at vera latin uttan ávíst áramál, men fyri fiskifør undir 15 tons fara tey at vera latin fyri upp til tvey ár í senn. Hetta verður*

*gjørt, tí tað er ein veruleiki, at nógvir bátar undir 15 BRT, sum hava veiðiloyvi, kortini ikki eru til vinnuligan fiskiskap í upp til fleiri ár. Í § 31 stendur, at talið av veiðiloyvum til hvønn høvuðsbólk ikki skal vera størri enn talið 1. januar 1995. Eru loyvini givin uttan tíðaravmarking, forðar tað fyri, at aðrir enn verandi útróðrarmenn kunnu reka vinnuligan útróður. Til tess at byrgja upp fyri, at veiðiloyvi ikki verða nýtt, verður mælt til, at veiðiloyvi til útróðrarbátar undir 15 tons bert verða latin fyri eitt avmarkað áramál tvey ár í senn".*

Greitt er, at frá byrjan var hugsanin, at veiðiloyvi varð givið fyri eitt ár t.v.s. í eitt avmarkað tíðarskeið. Síðani er tíðarskeiðið broytt. Eftir viðmerkingunum at døma, er hendan broytingin farin fram av praktiskum umsitingarligum orsøkum, tá tað ikki var mett neyðugt at endurnýggja hesi loyvir hvørt ár. Sjónarmiðið um, at veiðiloyvi gevur nøkur ávís rættindi, og spurningurin um hesi kunnu broytast uttan víðari er ikki viðgjørdur, tá broytingar eru farnar fram

Við løgtingslóg nr. 69 frá 18. august 1998 verður áramál sett á rættindi (fiskiloyvi) fyri onnur enn bólk 5, at hesi vara upp til 10 ár, og sambært viðmerkingunum til lógina: *„tó ongantíð fyri longri enn tað áramál, sum veiðiloyvið hevur gildi*".

Við broytingini í 1998 verður áramál sett á rættindini hjá øðrum enn bólki 5. Her er vert at leggja merki til, at broytingin verður ikki framd í § 5, stk. 3, men í § 13 sum viðvíkur fiskidaga- og kvoturættindum. Hendan broyting varð gjørd, tí áramál var sett á avhendingina av fiskidaga- og kvoturættindum, har rættindi kundu avhendast upp til 10 ár. Síðani eru reglunar um avhending broyttar soleiðis, at einki áramál er á, meðan reglurnar í § 13 ikki eru broyttar, men enn hava 10 ára freistina.

Støðan í dag er tann, at reglan um tíðarfreistina fyri veiðiloyvi til bátar í bólki 5 er burtur. Bátar í bólki 5 hava ikki veiðiloyvi, men bara fiskiloyvi. Henda broyting er framd við løgtingslóg nr. 38. frá 26. mars 2002 (Løgtingsmál nr. 65/2002). Við hesi broyting var eisini skilnaðurin millum fiskifør størri enn 15 tons og minni enn 15 tons, tá umræður tíðarskeið fyri rættindini, strikaður. Sostatt hava vit í dag onga orðing í lógini um tíðarskeið fyri veiðiloyvi, men bert fyri fiskirættindi – kvotur og fiskidagar, og vera hesi givin fyri 10 ár í senn, tó ongantíð longur enn veiðiloyvið er galdandi.

Ikki kann metast, at lóggevarin við hesum hevur givið veiðiloyvir uttan tíðaravmarkingar. Metast má, at av praktiskum umsitingarligum ávum er tíðarskeiðið strikað, tá tað snýr seg um veiðiloyvir. Orsøkin er, at hildið hevur verið, at tað er nóg mikið, at rættindini verða givin í fiskiloyvinum – sum var og verður givið árligt, men við gildi fyri 10 ár. At geva ein rætt uttan ávíst áramál, merkir ikki at geva rættin ævinliga, men bert, at tíðarskeiðið ikki er talmerkt, ið rætturin er galdandi fyri. Er ynskiligt at seta áramál á aftur, skuldi ikki nakað verið í vegin fyri tí.

Hendan hugsan kemur eisini greitt til sjóndar í almennu viðmerkingunum í løgtingsmáli nr. 3/1998, har m.a. sagt verður: *Í § 3, stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap verður ásett, at fiskirættindi veita ikki einstøkum bólkum ella einstaklingum ognarrætt. Tí verður altíð talan um rættindi fyri eitt avmarkað áramál. Veiðiloyvi til fiskifør 15 tons og størri verða latin uttan tíðaravmarkingar, men teimun undir 15 tons verður latið veiðiloyvi fyri í upp til 5 ár……*

**Fiskiloyvi**
Rættindi til fiskiskap – fiskirættindini – vera givin í fiskiloyvinum.

Í upprunaliga uppskotinum til lógina um vinnuligan fiskiskap stendur í § 12*: “.... rætturin til egnan kvotupart ...... hevur gildi í 10 ár, og er landsstýrinum heimilað at leingja rættin eftir umsókn.”* Viðmerkingarnar til hesa grein eru: *“Tann, ið ræður yvir egnum kvotuparti má lata hendan nýtslurætt aftur uttan krav um endurgjald, tá ið nýtsluskeiðið er runnið. Tá skeiðið er runnið eigur kvotupartur at verða bjóðaður út alment eftir serligum av landsstýrinum ásettum reglum.”* Uppskotið ásetir eisini, at søla av kvotuparti kann fara fram, men at leiga bert kann vera í 2 ár.

Hesar ásetingar vera tó broyttar í Løgtinginum. Tá lógin er samtykt, hevur § 12 hetta orðaljóð: *“Skip við veiðiloyvi og fiskiloyvi hava rætt til kvotupart ella til at fiska av heildarkvotu.”* Víðari verður sagt, at kvotur kunnu latast øðrum parti í 1 ár, men um hetta hendir meir ennn 2 fylgjandi ár, fellur kvotan aftur sum felagskvota.

Tá fiskidagaskipanin verður sett í verk, við løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1996, verður ásett í §§ 14 og 15, at fiskidagar og eginkvotur vera givin fyri 5 ár.

Við løgtingsmáli nr. 3/1997 verður uppskot lagt fram um, at hesi 5 árini vera broytt til 15 ár. Men tá lógin verður samtykt í Løgtinginum, er uppskotið hjá landsstýrismanninum broytt til 10 ár, soleiðis at ásetingarnar í grein 14 og 15 m.a. siga: *“Fiskidagar kunnu umsetast frítt í 10 ár frá tí degi teir seinast eru umsettir ....”* . Tá talan er um kvotur, verður ásett: *“Kvotur ella partar av kvotum kunnu ikki latast øðrum í meir enn 10 ár frá tí tær seinast eru umsettar. ....”*
Við løgtingslóg nr. 69 frá 18. august 1998 (Løgtingsmál nr. 3/1998), koma tey rullandi 10 árini inn í § 13. Í viðmerkingunum verður sagt, at henda broyting *“... partvíst hevur samband við treytirnar um umseting av fiskirættindum, sum ásett/skotið upp í §§ 14 og 15.”*. Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at ásetingin í § 13 skal skiljast soleiðis, at játtan um fiskirættindi verður latin fyri 10 ár í senn galdandi frá fiskiársins byrjan. Í fiskiloyvinum vera rættindini fyri inniverandi fiskiár talfest. Árið eftir vera rættindi aftur givin fyri næstu 10 árini.

Ein spurningur, sum hevur verið havdur á lofti hjá almenninginum, er, um § 13 ásetir, at tey 10 árini skulu galda frá ígildiskomuni av greinini, ella um talan er um sokallað “rullandi” 10 ár. Um henda spurning verður í viðmerkingunum til uppskotið m.a. sagt: “*at fyri fiskifør 15 tons og størri skal ásetingin skiljast soleiðis, at játtan um fiskirættindi verður latin 10 ár í senn galdandi frá fiskiársins byrjan. Í fiskiloyvið verða rættindini fyri inniverandi fiskiár talfest. Árið eftir verða rættindini aftur givin fyri næstu 10 árini, og fiskirættindini tað árið talfest o.s. fr.”* Hetta merkir, at loyvini eru galdandi í ”rullandi” 10 ár. Um eitt ítøkiligt loyvi skal sigast upp, skal hetta gerast við eini 10 ára freist.

Við løgtingslóg nr. 38 frá 26. mars 2002 (Løgtingsmál nr. 65/2002) verður 10 ára markið í grein 14 og 15 broytt til avhending fyri eitt ár ella endaligt, men verður eingin broyting gjørd viðv. teimum 10 árunum í grein 13.

Niðurstøðan er, at tá talan er um veiðiloyvi, so hevur ikki verið lagdur avgerandi týdningur á áramál og tíðaravmarkingar í hesum sambandi. Av praktiskum umsitingarligum ávum er hetta broytt nakrar ferðir, síðani lógin kom í gildi. Greitt er tó, at loyvi ikki er givið í óavmarkaða tíð, og at í dag er einki áramál ásett. Men einki er, sum talar fyri, at áseting av áramáli ikki aftur kann fara fram.

Tá talan er um fiskiloyvini – har fiskirættindini verða givin – er støðan ein onnur. Har er í dag ásett í § 13, at hesi eru givin fyri 10 ár í senn, og at hesi vera so at siga endurnýggjað hvørt ár, so tey

aftur eru galdandi fyri komandi 10 árini. Tað merkir, at vera ikki nýggj fiskiloyvi útskrivað komandi fiskiárið, vilja fiskirættindini í fiskiloyvinum fella burtur um 10 ár. Leggjast skal til merkis, at § 13 ítøkiliga nevnir rættin til fiskidagar, egnan kvotupart og egna hjáveiðikvotu. Eisini kann landsstýrismaðurin taka avgerð um, at rætturin til egna hjáveiðikvotu fyri fiskifør í bólki 1 og 6 hevur gildi í 10 ár. Hetta merkir samstundis, at onnur rættindi, enn tey her nevndu, verða ikki givin fyri 10 rullandi ár, so sum rætturin at veiða av felagskvotu.

### 3.5.1 Ognartøka av fiskirættindum

Spurningurin er, um Løgtingið kann broyta lógina soleiðis, at øll verandi loyvir kunnu fara úr gildi við eini minni freist enn 10 ár, uttan at hetta kann metast at vera ein ognartøka av givnum rættindum.

Í **§** 73, stk. 1 í Grundlógini stendur:

> *"Ejendomsretten er ukrænkelig. Ingen kan tilpligtes at afstå sin ejendom, uden hvor almenvellet kræver det. Det kan kun ske ifølge lov om mod fuldstændig erstatning."*

Mett verður, at ognarrættur í grundlógarhøpi skal skiljast í breiðum týdningi. Hugtakið "ognarrættur" umfatar øll rættindi, sum er grundarlagið undir búskaparliga virkseminum og tilveruni hjá fysiskum- ella juridiskum persónum. Ognarrætturin umfatar sostatt ikki bara ognarrættin til fasta ogn, leysafæ v.m. – men eisini avmarkað rættindi, sum til dømis brúks-, veð- ella ákravsrættindi.

Tað er av týdningi, um eitt inntriv rakar rættin til at ráða beinleiðis ella bert rakar ein framtíðar brúksrætt. Ymiskar skipanir, sum geva rættindahavara møguleika fyri at skipa síni viðurskifti eftir teimum nýggju reglunum, vil oftani linka hugtakið avlutan (afståelse).

Vanliga verður mett, at jú størri samfelagsáhugin er fyri einum inntrivi í ognarrættin, jú meira kann rætturin at ráða verða avmarkaður, uttan at talan er um ognartøku.

Síðani fiskirættindi gjørdist ein avmarkaður rættur og gjørdur umsetiligur, er farin fram ein kapitalisering av hesum rættindum. Fiskidagar/kvotur eru keyptir og seldir fyri fleiri hundrað milliónir krónur, og virði av fiskidøgum/kvotum hava verið grundarlagi undir lángevingum. Greitt er, at verður gjørd ein skipan, sum tekur burtur handilsvirðið, gevur hetta eitt møguligt tap fyri eigaran av rættinum. Eigarin hevur fingið henda rætt í 10 ár, og hevur innrættað sítt virksemi eftir hesum. Tí verður mett, at um eitt inntriv verður gjørt í sjálvt fiskiloyvið, áðrenn hesi 10 árini eru farin, kann hetta bert gerast við lóg og við fullum endurgjaldi. Viðmerkjast skal tó, at vanligar avmarkingar í fiskidøgum, sum verða gjørdar fyri at verja stovnin, ella har samfelagsáhugamál krevja eina avmarking í fiskidøgum ella kvotum, kann hetta verða gjørt uttan endurgjald.

Nevndin hevur tí skotið upp, at í nýggju lógini verður ásett, at fiskiloyvini eru galdandi ***til 1. september 2016,*** fyri at sleppa undan eini ognartøku**.** Á henda hátt fáa núverandi eigarar av

rættindunum til fiskiloyvini tíð til at skipa síni viðurskifti, og tann almenni myndugleikin fær tíð til at umhugsa eina nýggja skipan fyri, hvussu fiskirættindini verða tillutað frameftir[10].

# 4. Fiskirættindi – avhending, samanlegging v.m.

Í hesum kapitli er ein greining av hesum øki út frá verandi lógarverki og hugsanir um eina komandi skipan.

## *4.1 Samanlegging og flytan av loyvum*

Høvuðsgrundgevingin fyri at kunna leggja saman veiðiloyvi er at geva møguleikar fyri at effektivisera raksturin hjá luttakarunum í fiskivinnuni. Fylgjan av hesum møguleika skuldi so eisini verið ein endurnýggjan av flotanum. Búskaparliga sæð, er effektivisering gagnlig, tá minni av tilfeingi - kapitali og arbeiðsmegi - verður nýtt fyri at veiða somu ella størri nøgd. Hetta átti at givið eitt fíggjarliga betri úrslit.

Eftir § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap kann samanlegging vera gjørd á trinnanda hátt. Við at flyta loyvi frá einum fiskifari til eitt annað uttan veiðiloyvi, at flyta loyvi til eitt fiskifar sum hevur eitt loyvi frammanundan, ella at leggja veiðiloyvir saman, t.v.s. fleiri fiskifør vera til eitt fiskifar. Samanløgd veiðiloyvir kunnu sjálvandi eisini vera flutt á fiskifar uttan veiðiloyvi.

Talið á veiðiloyvum í bólki 2, 3 og 4 í fiskidagaskipanini er eisini fallið við 40 loyvum ella við 25%. Í so máta má sigast, at ásetingin í lógini um samanlegging hevur tænt sínum endamáli. Tølini síggjast í talvu 4. Bólkur 4T er komin afturat í august 2005, men er settur sum serstakur bólkur í yvirlitinum fyri øll árini.

Møguleikin at effektivisera raksturin er avgjørt ein av fortreytunum fyri at kunna reka eina búskaparliga burðardygga fiskivinnu.

| | **1995** | **Juli 2005** | **August 2005** |
|---|---|---|---|
| **Bólkur 2** | 34 | 29 | 29 |
| **Bólkur 3** | 19 | 18 | 24 |
| **Bólkur 4A** | 51 | 27 | 28 |
| **Bólkur 4B** | 34 | 28 | 22 |
| **Bólkur 4T** | 19 | 17 | 16 |
| **Tilsamans** | 157 | 119 | 119 |

[10] Víst verður eisini til frágreiðingina ”**Omsættelige kvoter og andre metoder til regulering af Rejefiskeriet**”, frágreiðing frá Grønlands Hjemmestyre, november 2005, har spurningurin um ognartøku í samband við afturtøku af givnum fiskirættindum gjølliga verður viðgjørdur. Frágreiðingin er at finna her: http://www.nanoq.gl/Groenlands_Landsstyre/Direktoratet_for_Fiskeri_og_Fangst/Udgivelser/Rapport_om_regulering_af_rejefiskeriet.aspx

**Talva 4**
*Tal á veiðiloyvum fyri bólkarnar 2, 3 og 4.*
*(Kelda: Álitið um fiskiorku og fylgiskjal til løgtingsmál nr. 2/2005)*

### 4.1.1 Trupulleikin – fiskiorka!

Treytin fyri samanlegging er, at fiskiorkan ikki má økjast.

Rímiliga einfalt er at fáa eitt tekniskt mát fyri fiskiorku, men hava royndirnar víst, at veiðievni hjá nýggjum skipum, sum stava frá flyting og ella samanlegging av veiðiloyvum, er ikki tað sama sum hjá teimum fiskiførum, ið eru farin út úr flotanum. Við øðrum orðum fiska tey meira, sjálvt um fiskiorkan er tann sama, soleiðis sum hendan er lýst í kunngerð. Trupulleikin við fiskiorku skal tó ikki umrøðast neyvari her, men víst verður til kapittul 7 í hesum riti. Víst verður eisini til kunngerð nr. 75 frá 13. juni 2006 um mannagongd og áseting av fiskiorku, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri.

### 4.1.2 Avmarkingar

Seinasta broytingin í lógini hevur við sær, at møguleikarnir við samanlegging eru rættiliga avmarkaðir. Gjørligt er bert við samanleggingum innan fyri teir einstøku bólkarnar. Hervið verður eisini eggjanin til umsetiligheit avmarkað munandi, og er fylgjan av ásetingini, at fiskiflotin verður varðveittur í verandi bólkum.

## *4.2 Avhending av fiskirættindum*

Avhending av døgum og kvotum vil fara fram, tá onkur er, ið ynskir at selja, og annar ynskir at keypa. Grundleggjandi fer avhending fram, tí eftirspurningur er eftir døgum/kvotum. Hetta kann vera, tí dagar/kvotur hjá einstøkum skipi eru fult nýttir ella í samband við samanlegging av veiðiloyvum, har dagar/kvotur vera seld við.

Fiskidagar og kvotur vera ikki seld/keypt á einum opnum marknaði, og tí er prísurin ikki avgerandi fyri, hvør selur og hvør keypir. Seljarin vil vera hann, ið ikki nýtir allar sínar dagar. Um so var, at søla/keyp fór fram á einum opnum marknaði, so vildi keyparin verið tann, sum rekur effektivasta fiskiskapin og hevur atgongd til fígging, meðan seljarin vildi verið ein, ið rekur minni effektivan fiskiskap. Hann selur, tí hann fær meiri burturúr selda fiskidegnum enn sjálvur at gera brúk av honum. Hervið hendir eisini ein tillaging av fiskiflotanum til fiskatilfeingið.

Bólkabýtið og uppbýtið av rættindum til húk og trol eru forðingar fyri frælsum tillagingum, men kunnu tað tó vera skilagóðar orsøkir til at hava hesar forðingar.

Fortreytin, fyri at avhending skal hava tað tilætlaða árinið, er, at tað er trot á rættindum. Í talvu 5 er yvirlit yvir, hvussu nógv prosent av tillutaðu døgunum eru nýttir. Vert er at leggja merki til, at tað

bert er bólkur 3 og 4B sum fult út brúka sínar dagar, meðan bólkur 2 og serliga 4A ikki brúka sínar dagar[11].

| Bólkur/ár | 97/98 | 98/99 | 99/00 | 00/01 | 01/02 | 02/03 | 03/04 | 04/05 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | 86,7 | 86,3 | 94,1 | 88 | 81,8 | 73,7 | 75,7 | 76,9 |
| 3 | 94,6 | 87,5 | 84,6 | 94,1 | 98,1 | 100,4 | 89,2 | 100,7 |
| 4A | 54,4 | 50,2 | 53,7 | 61,5 | 54,7 | 48,8 | 50,4 | 38,1 |
| 4B | 87,5 | 86,3 | 90,4 | 100 | 97,9 | 115,1 | 119,8 | 108,1 |
| 5 | 72,6 | 59,6 | 61,2 | 109,1 | 92,2 | 97,3 | 81,4 | |

**Talva 5**
*Yvirlit yvir hvussu nógv prosent av tillutaðum døgum á landgrunninum eru nýttir hvørt fiskiár.*
*(Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

### 4.2.1 Avhending av fiskidøgum

Mynd 1 vísir munin á keyptum og seldum døgum pr. bólk. Positiv tøl siga, at fleiri dagar eru keyptir enn seldir innan bólkin. Hóast tølini av døgum ikki tykjast stór (sí talvu 6), so kemur greitt fram, at tað eru teir bólkar, sum brúka flest av sínum døgum, sum eisini keypa frá hinum. Hetta má merkja, at mekanisman í skipanini virkar sum ætlað, men fyri at fáa fullan virkning er neyðugt, at allir bólkar nýta sínar dagar, soleiðis at ikki nakrir bólkar einans tæna sum veitarar til hinar bólkarnar.

Talva 6 vísir tølini yvir keyptar/seldar dagar seinastu árini og skal lesast á tann hátt, at seldir dagar eru egnir dagar hjá bólkinum, og talið á keyptum døgum eru umroknaðir dagar keyptir av bólkinum. Verða hesi tøl samanløgd við tillutaðu dagarnar fæst faktiska talið, bólkurin hevur at ráða yvir.[12]

[11] Í fylgiskjali 1 eru stabbamyndir yvir tillutaðar og nýttar dagar hjá hvørjum einstakum bólki hesi árini.
[12] Ymiskt er, hvussu keyptir og seldir dagar vera uppgjørdir. T.d. er ikki samsvar millum hesa talvuna og hana, ið verður brúkt í álitinum um fiskiorku. Orsøkin til hetta er ein spurningur, um uppgerast skal í umroknaðum døgum ella ikki, soleiðis at hædd verður tikin fyri, at t.d. 149 dagar, bólkur 3 selur, verða til 337 dagar hjá bólki 4A. Her er valt at nýta umroknaðar dagar, tí mett verður, at hetta gevur rættari myndina av, hvussu nógvar dagar hvør bólkur í grundini hevur til taks. Teir ymisku uppgerðarhættirnir hava eisini týdning, um metast skal, um umsetiligheitin er stór ella lítil í hvørjum bólki sær. Verður ikki umroknað, kunnu nettotøl ikki finnast – tá verður tað sum at trekkja appelsinir frá perum!

| | 2000/01 | | 2001/02 | | 2002/03 | | 2003/04 | | 2004/05 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Keypt | Selt | Keypt | Selt | Keypt | Selt | Keypt | Selt | Keypt | Selt |
| **Bólkur 2** | 406 | 610 | 471 | 701 | 137 | 434 | 378 | 244 | 129 | 363 |
| **Bólkur 3** | 188 | 143 | 392 | 308 | 261 | 179 | 467 | 588 | 194 | 305 |
| **Bólkur 4A** | 200 | 370 | 236 | 643 | 90 | 414 | 654 | 1350 | 996 | 673 |
| **Bólkur 4B** | 651 | 345 | 904 | 513 | 704 | 294 | 1113 | 478 | 1165 | 726 |

**Talva 6**

*Talið á seldum fiskidøgum og umroknaðum keyptum fiskidøgum í hvørjum bólki frá 2000 til 2005. (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Í ymiskum frágreiðinum er ført fram, at umsetiligheitin ikki er serliga stór, men vera umroknaðu tølini brúkt sum grundarlag sæst, at myndin ikki er so einføld. T.d. eru fyri fiskiárið 2003/04 seldir 31,2% av fiskidøgunum í bólki 4A, meðan 15,1% eru keyptir. Hinvegin eru í bólki 4B keyptir 26,1%, meðan sølan umboðar 11,2% av døgunum í hesum bólki.[13]

Bólkabýtið ger, at umsetiligheitin virkar á tann hátt, at bólkarnir, ið hava ov nógvar dagar, selja til teir, sum hava ov fáar dagar. Innanhýsis í bólkunum er tó eisini nakað av keyp og sølu. Nú er ikki gjørligt at avhenda millum bólkar, so roknast kann við, at avhendingin fer at minka, og kemur hetta serliga at ganga út yvir teir, sum fyrr vóru í bólki 4B. Sagt verður *fyrr*, tí bólkarnir eru nú broyttir, og fiskifør hava skift bólk.

Spurningurin er, um hetta elvir til, at fiskivinnan verður rikin effektivari, og ein tillaging fer fram?




[13] Prosentrokningin her er ikki heilt eftirfarandi. Hetta kemst av, at við keyp og sølu vera dagarnir sum sagt umroknaðir, men skip í sama bólki kunnu nýta ymiskar umrokningarfaktorar, soleiðis at dagarnir, ið vera avhendaðir, ikki heilt kunnu sammetast við upprunaligar tillutaðar dagar í bólkinum.

**Mynd 1**
*Myndin vísir munin á keyptum og seldum døgum pr. bólk. Eitt positivt tal sigur, at fleiri dagar eru keyptir enn seldir. (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Eftir § 14 kann avhending fara fram endaliga fyri eitt fiskiár, ella, tá 3 mánaðir eru eftir. Hetta er eisini greinað í talvu 7.

Sum skilst á viðmerkingunum til lógaruppskotið, tá orðingin um endaliga avhending er komin inn, skal hetta síggjast í samband við § 8, tá veiðiloyvi verða løgd saman. Har verður sagt, at endaliga merkir í hesum sambandi, at hann sum avhendar, hevur latið rættindini frá sær endaliga, meðan hann sum avhendað verður til, fær somu rættindi og skyldur, sum undanfarni rættindahavarin hevði.

Í praksis hevur henda áseting helst ikki havt stóran týdning við tað, at avhendað verður endaliga aftur og fram millum fiskifør.

| **Endaliga** | **Eitt fiskiár** | **3 mánaðir eftir av fiskiári** |
|---|---|---|
| - Millum før í bólkinum<br>- Tó ikki millum húk/trol ella øvugt | - Millum før í bólkinum<br>- Tó ikki millum húk/trol ella øvugt | - Millum bólkar, undantikið bólkur 5<br>- Ikki gjørligt millum húk/trol ella øvugt |

**Talva 7**
*Avhendingarmøguleikar eftir § 14*

Er endalig avhending farin fram, so vera hesi rættindi tikin við í býtið av fiskidøgum næsta fiskiárið.

Treytin fyri avhending er, at 60% av døgunum eru nýttir fiskiárið frammanundan, avhendingin fer fram. Hetta er gjørt fyri at forða fyri, at søla fer fram við fiskidøgum ár um ár, har eigari av fiskifari ikki rekur nakran fiskiskap. Hetta má metast sum krav um ávísa brúksskyldu.

Spurningurin um eina generella brúksskyldu kann eisini setast. Við rættinum at fiska – fylgir so eisini ein skylda at gera tað? Í dag er hetta ikki eitt krav. Hugsast kundi t.d. ein skipan, har kravið var, at brúktir vóru minst 80 % av tillutaðum døgum. Um hetta krav ikki var rokkið 2 fylgjandi ár, var rætturin til tillutan av døgum fallin burtur ella skerdur.

Hugsast kann, at eitt skip avhendar nærum allar sínar dagar endaliga, og bert hevur nakrar fáar dagar - 1 ella 2 eftir. T.v.s., at í skipanini er eitt skip við veiðiloyvi, men við nærum ongum fiskidøgum, soleiðis at tað nærum ikki kann fara til fiskiskap. Møguligt er so hjá hesum at keypa sær fleiri dagar, og harvið økja um møguleikan fyri at reka fiskiskap. Er hóskandi at hava eina skipan, sum sigur, at um skip hevur avhendað endaligt dagar, soleiðis at minni enn 20% av døgunum eru eftir, so missir skipið fiskiloyvið? Grundgevingin má vera, at er so lítið av fiskidøgum eftir, so vera teir ikki brúktir hóast alt, og so er betur, at onkur annar kann fáa nyttuna av hesum døgum. Hetta loysir sum so ikki hendan trupulleikan, men flytir markið fyri, nær eitt fiskiloyvi er aktivt/innaktivt, og kann møguliga skunda undir samanleggingar av veiðiloyvum.

Víst verður eisini til kunngerð nr. 13 frá 25. februar 2005 um avhending av fiskidøgum.

### 4.2.2 Avhending av kvotuparti við meira

Avhending av kvotum verður ikki skrásett á sama hátt sum avhending av fiskidøgum. Avhending av kvotum kann bæði fara fram við, at kvotur vera umbýttar, og við at kvotur vera handlaðar.

Eftir § 15 kann avhending av kvotum fara fram antin fyri eitt ár ella endaligt.

Høvuðsreglan um 60% markið, sum er við avhending av fiskidøgum, er ikki galdandi fyri avhending av kvotum. Henda áseting var fyrst í lógini, men er seinni broytt, tá hon hevði óhepnar fylgir við sær, soleiðis at heildarkvotur ikki vórðu fult gagnnýttar.

Undantak er tó fyri botnfiskakvoturnar undir Íslandi. Verður avhendað endaligt, er ikki nakað krav um, hvussu nógv skal vera nýtt, men fyri avhending, sum ikki er endalig, er kravið, at 60% av tillutaðu kvotunum eru nýttar fiskiárið frammanundan.

## *4.3 Veiðiloyvi, fiskirættindi og avhending í hesum sambandi*

Sum víst á frammanundan, er veiðiloyvið nýtt sum stýringsamboð fyri at avmarka atgongdina til fiskiskapin. Men at avmarka atgongdina við tali á fiskiførum, hevur eisini víst seg ikki at vera nóg mikið, fyri at tryggja ein fiskiflota sum gevur nøktandi avkast. Orsøkin er, at ”the race for the fish” nú bert er fyri nøkur fá og ikki fyri øll. Støðan broytist ikki, fyrr enn fiskirættindi vera tillutað tí einstaka fiskifarinum antin sum kvotur ella fiskidagar.

Spurningurin, sum nú stingur seg upp, er, um veiðiloyvi skal vera eitt ávíst tal á loyvum, ella um tað er nóg mikið at áseta fiskidagar/kvotur?

Í Norra hevur verið hildið fast við bæði tal á loyvum og regulering - serliga við kvotum. Ísland hevði eisini eina skipan við tali á loyvum og kvotum. Henda skipan er nú broytt við hægstarættardómi, soleiðis at avmarking ikki longur er á talinum á loyvum. Í Føroyum hava vit eisini havt eina skipan við tali á loyvum og fiskidøgum/kvotum. Í summum førum er tó bert talan um tal á loyvum og ongar aðrar avmarkingar.

Lógin um vinnuligan fiskiskap sigur sum so einki um sjálvt innihaldið í veiðiloyvinum, men at neyðugt er bæði at hava veiðiloyvi og fiskiloyvi, fyri at reka vinnuligan fiskiskap. Í kunngerð nr. 54 frá 26.03.1993 um veiðiloyvi til føroysk skip verður munur gjørdur á innihaldinum í veiðiloyvum, ið eru til veiðu á føroysku landleiðunum og veiðiloyvi uttan fyri føroysku landleiðirnar. Kunngerðin ásetir, at veiðiloyvini á føroysku landleiðunum innihalda treytir viðv. leiðum, fiskaslagi og reiðskapi, meðan kunngerðin bert ásetir treytir um leiðir fyri fiskiskap uttan fyri landleiðirnar.

Lógin um vinnuligan fiskiskap ásetir, at fiskiloyvið ásetir nøgd ella dagatal, sum eitt ávíst skip hevur í einum ávísum tíðarskeiði á ávísum leiðum. Kunngerð nr. 36 frá 16.03.1990 um veiðu hjá skipum uttan fyri landleiðirnar hevur á leið somu orðing.

**Dømir við galdandi reglum:**
Ein kvota í sjóøkinum hjá Grønlandi er til sølu, men kann eitt skip, sum hevur veiðiloyvi í sjóøkinum hjá Russlandi, ikki keypa hesa kvotu, tá tað ikki hevur veiðiloyvi til sjóøkið hjá Grønlandi.

Ein kvota í sjóøkinum hjá Norra er til sølu, men kann ein trolari, sum hevur veiðiloyvi til "feskfiskaveiðu á ytru landleiðini við troli við førum oman fyri 110 BRT", ikki keypa hesa kvotu, tí hann hevur ikki veiðiloyvi til sjóøkið hjá Norra.

Eitt skip sum eigur fiskidagar undir Føroyum, og hevur veiðiloyvi sum sigur "Feskfiskaveiðu á føroysku landleiðunum við øðrum reiðskapi enn troli við førum oman fyri 110 BRT", kann ikki selja til fiskifar, sum hevur veiðiloyvi til russiskan sjógv, tí hetta far hevur ikki veiðiloyvi á føroysku landleiðunum.

Endamálið við lógini er at tryggja eina lívfrøðiliga og fíggjarliga burðardygga veiðu. Til tess at tryggja eina lívfrøðiliga burðardygga veiðu mega avmarkingar vera í veiðimøguleikunum. Til tess at tryggja eina búskaparliga burðardygga veiðu, bæði fyri luttakararnar í fiskiskapinum og samfelagið sum so, er umframt avmarkingar neyðugt, at tey, ið reka fiskiskap, hava møguleika at laga sín rakstur sum best til tær umstøður, sum eru.

Til tess at tryggja endamálið við lógini, kunnu fylgjandi leiðreglur orðast:

- Skipanin má ikki eggja til, at fiskiskapurin fer út um tey lívfrøðiligu tilráðingarmørkini
- Skipanin má ikki leggja óneyðugar forðingar fyri tey, sum reka fiskiskap, soleiðis at besta fíggjarliga úrslitið kann fáast burturúr.

## 4.3.1 Fyrimunir og vansar við mest loyvda tali á veiðiloyvum

Metingin, sum er gjørd niðanfyri, tekur støði í at meta vansar og fyrimunir í mun til endamálið við lógini: at tryggja eina búskaparliga og lívfrøðiliga burðardygga veiðu.

**Fyrimunir**
Við at áseta ávíst tal á loyvum, er einfalt at stýra kapasitetinum í vinnuni. Her er talan um kapasitet sum eitt nú bruttotons (BT). Flotin kann ikki gerast størri enn eitt vist, og tí kunnu veiðievnini hjá flotanum heldur ikki verða størri enn eitt vist. At hava eitt ávíst tal á loyvum kann vera við til at tryggja eina lívfrøðiliga burðardygga veiðu, tí flotin megnar ikki at fiska meir enn eitt ávíst.

Um eingin avmarking er í lógini um tal á loyvum, so er ein vandi fyri, at fleiri skip koma inn í flotan, og vit fáa búskaparligan yvirkapasitet. Spurningurin her verður, um álit er á marknaðinum, og at hesin sjálvur vil tryggja, at flotin ongantíð verður størri enn tað tilfeingi, sum kann gagnnýtast, t.v.s. fiskidagar ella kvotur. Treytin er tó, at øll rættindi eru lutað út á verandi aktørar.

Tað má eisini metast sum ein fyrimunur fyri politisku skipanina at hava mark fyri talinum, soleiðis at trýstið á politisku skipanina um at geva loyvir til fiskifør, sum kunnu liggja óvirkin stórar partar av árinum, ikki er til staðar.

**Vansar**

Ein vansi við føstum tali á loyvum er, at eingin atgongd er til vinnuna. Vanliga verður hetta mett sum ein vansi samfelagsbúskaparliga sæð av tí orsøk, at verandi aktørar kunnu avtala spælið sínámillum, og at einki effektivitetstrýst er uttanífrá. Her er tó ein ávísur munur, um sagt verður, at talið á loyvum er eitt ávíst, ella um talið á loyvum ikki má vera meir enn eitt ávíst. Meira um hetta niðanfyri.

Ein annar vansi við ávísum tali á loyvum, har loyvið beinleiðis verður knýtt at einum fiskifari soleiðis, at um eitt nýtt fiskifar skal inn, so skal eitt gamalt út, er, at fiskiførini fáa eitt kunstiga høgt virði, sum ikki svarar til veruliga marknaðarvirðið á fiskifarinum. Rættari hevði verið, um virðið var flutt til fiskirættindini, tá tað í veruleikanum eru hesi, sum eru virðismikil og ikki fiskiførini.

Eisini kann vísast á íslendska hægstarættardómin, mál nr. 145/1998, har gjørt verður upp við ta skipan, at veiðiloyvi (rætturin at veiða) verður knýtt at ogn til skip, sum var í vinnu eitt ávíst tíðarskeið í fýrsárunum. Hetta var mett at vera í stríð víð ásetingar í íslendsku grundlógini um javnrætt og vinnufrælsi.

## 4.3.2 Tal á loyvum

Sum víst á omanfyri, so er ein háttur at regulera at seta eitt ávíst tal á loyvum til ávísan fiskiskap. Vit hava t.d. 6 gulllaksaloyvir og 12 garnaloyvir. Tað er sjálvsagt, at vóru ikki hesar avmarkingar, so var fríur fiskiskapur hjá øllum. Hetta vildi ført til, at eingin fekk nakað burturúr hesum fiskiskapi og niðurfiskaðar stovnar. Tann grundleggjandi hugburðurin hjá teimum, sum hava hesi loyvi, er tó ikki broyttur. Kappingin um at fáa hendur á fiskinum er enn til staðar. Tann lívfrøðiliga verjan er tí ivasom. Talið á fiskiførum, sum gagnnýta hesi loyvi, vil altíð vera tað talið, sum er fastsett, og á tann hátt kunnu fiskiførini ikki tillaga fiskiskapin soleiðis, at sum mest verður fiskað fyri minst møguligt. Liggja ónýtt loyvir, vil tað verða eitt trýst á politisku skipanina um at fáa hendur á hesi.

Í fiskidagaskipanini er ásett, at talið á fiskiloyvum kann ikki vera størri enn talið, sum var 1. januar 1995. Hetta er so gjørt á tann hátt, at eingi nýggj loyvi eru givin, uttan at gomul eru farin út. Samanlagt er talið á veiðiloyvum lækkað úr 160 niður í 120 í fiskidagaskipanini. Men lagt skal vera til merkis, at ásett er ikki, hvat talið skal vera, og at ávís fiskirættindi – fiskidagar – hava verið knýttir at hvørjum fiskifari. Tí er hugburðurin hjá honum, sum fiskar, ikki tann sami sum umtalaður omanfyri. Henda gongd hevur virkað effektiviserandi fyri fiskiflotan.

Út frá teimum royndum vit hava gjørt við fiskidagskipanini og út frá teori á økinum, mega vit staðfesta, at neyðugt er ikki at læsa fast eitt tal, men betur er at hava eitt mest loyvda tal, tilluta umsetilig rættindi til fiskiførini og geva møguleika fyri, at fiskirættindi kunnu avhendast. Hyggja vit eftir skipabólkunum undir Føroyum og teirra fíggjarligu úrslitum, so eru tað lemmatrolararnir og garnaskipini, sum hava tyngsta raksturin – og hesi vera bert regulerað við tali á loyvum!

## 4.3.3 Støðan har ríkiligt er til av fiskidøgum

Hugsanin aftanfyri at áseta eitt tal á fiskidøgum má vera, at við hesum tali á døgum verður júst fiskað tað, sum stovnurin tolir.

Hjá summum bólkum síggja vit, at ikki allir dagarnir verða nýttir. Í praksis merkir hetta, at frítt er hjá teimum í bólkinum at fiska. Hvat vil henda, um nú nýggj loyvir verða givin, soleiðis at bólkurin kann gagnnýta allar teir dagar, hann fær tillutaðar?

Um dagarnir eru rætt settir, so hendir ikki annað enn, at vit fáa nøkur fleiri fiskifør, sum kunnu gagnnýta okkara tilfeingi, og hetta er positivt fyri okkara samfelag. Vit fáa fleiri í vinnu, vit kunnu fáa meiri fisk upp á land, og vit kunnu bøta um okkara útflutning. Ónýttir dagar í einum bólki ár um ár má í prinsippinum merkja, at vit ikki fáa tað burturúr, sum Løgtingið vil, at vit skulu fáa burtur úr fiskastovnunum! Men møguleikin er eisini til staðar, at dagarnir eru skeivt ásettir. Teir skulu ikki allir gagnnýtast! Men tá verandi skip kunnnu fiska frítt, er ikki neyðugt at skunda undir, at effektiviseringar fara fram.

### 4.3.4 Ásetingar í veiðiloyvum og fiskiloyvum

Spurningurin er viðgjørdur um, hvat skal ásetast í veiðiloyvum og fiskiloyvum, og verður hildið, at skilagott er at hava eitt veiðiloyvi,  har ásett verður:

- Mát fyri fiskiorku
- Reiðskapsgóðkenning – til veiðu við troli ella húki
- Loyvi til veiðu antin sum:
    - *skip til uppsjóvarfiskiskap*
    - *Botnfisk undir Føroyum, Íslandi og altjóða sjógvi*
    - *Botnfisk í fremmandum og altjóða sjógvi*
    - *Annan fiskiskap.*

Treytirnar fyri at fáa útskrivað veiðiloyvi skulu vera, at skipið er í siglingarførum standi og góðkent av føroyska Skipaeftirlitinum v.m.

Í fiskiloyvinum eiga m.a. ásetingar at vera um:

- fiskidagar
- kvotur
- reiðskap
- leiðir
- tíðaravmarking.

### 4.3.5 Avhending í kvotuskipan

Ásetingar av kvotum áttu í sær sjálvum at tryggjað, at fiskiskapurin verður innan fyri tey lívfrøðiligu tilráðingarmørkini. Kvoteringin sigur, hvussu nógv tons kunnu takast úr einum stovni, og ikki er avgerandi, hvussu hesi tons vera fingin. Skal veiðan vera við troli, nót ella kanska húki? Skal fiskast við einum stórum skipi ella einum minni? O.s.fr.

Spurningurin um eina fíggjarliga burðardygga veiðu má metast út frá, um óneyðugar forðingar eru fyri, hvussu fiskiskapurin kann leggjast til rættis. Verandi skipan við veiðiloyvum, sum stutt lýst omanfyri, og serliga kunngerðin frá 1993, má metast sum ein forðing fyri tillagingum og smidleika.

Tað eigur ikki at vera uppgávan hjá tí almenna at siga, hvussu kvoterað fiskasløg skulu fiskast. Uppgávan hjá tí almenna er at tryggja, at fiskiskapurin er innan fyri ásettar kvotur.

### 4.3.6 Avhending í fiskisdagaskipan

Her mega vit føroyingar kenna okkum eina serliga ábyrgd at tryggja eina burðardygga veiðu, tí vit eru einsamøll um at áseta treytirnar fyri fiskiskapin eftir botnfiski á føroysku landleiðunum. Annarleiðis er tað við kvoteraðu fiskasløgunum, vit fiska, har antin kvota verður sett av øðrum ella í samráð við onnur.

Fyri at tryggja eina lívfrøðiliga burðardygga veiðu í fiskidagaskipan, er neyðugt at taka hædd fyri, at ávísur reiðskapur verður nýttur til at fiska ávís fiskasløg. Hædd má takast fyri fiskiorkuni, sum verður nýtt í fiskiskapinum, tí fiskiorkan er avgerandi fyri nøgdirnar, ið vera fiskaðar. Somuleiðis má hædd takast fyri, at fiskiskapur eftir ávísum fiskasløgum fer fram á ávísum leiðum. Reguleringin í fiskidagskipan er meira samansett enn í eini kvotuskipan, tá tað eru fleiri atlit at taka.

Verður fyrst hugt eftir fiskiskapinum eftir toski og hýsu, so stendur húkaflotin fyri størsta partinum av hesum, meðan eitt nú partrolararnir royna eftir upsanum. At gera eitt umbýti millum eitt nú hesar bólkar vil elva til trupulleikar. Hesir fiska ymisk fiskasløg við ymiskum reiðskapi á ymiskum leiðum. Millum annað tí er skilagott at hava ein skilna millum trol- og húkaveiðu. Skilnaðurin kundi verið so mikið greiður, at veiðiloyvið ásetir, um fiskifarið kann fiska við húki ella við øðrum reiðskapi. Hinvegin kann so spurningurin setast, um skilnaður skal vera millum fiskifør sum fiska við sama reiðskapi eftir somu fiskasløgum og stórt sæð á somu leiðum?

Kann ein skilagóð umrokning av fiskiorkuni fara fram millum bólkar, ið eru eins, tá tað kemur til reiðskap og fiskasløg, vil hetta eisini, við framtíðini í huga, geva eina fíggjarliga burðardygga veiðu, tí hesin partur av flotanum hevur ávísar møguleikar fyri at fremja effektiviseringar.

Eitt mótargument er tó, at í eini fiskidagaskipan vil avhendan ganga ímóti, at tær størru eindirnar gerast fleiri – soleiðis sum vit hava sæð. Trupulleikin hjá hesum var til seinast – um teirra egnu orð skulu takast fyri fult – at ov trongligt var á fiskileiðunum. Roknast kann við, at undir eini fríari umsetiligheit í húkaflotanum vil ein slík gongd halda fram í ein ávísan mun, tí at tann seinasti, sum kemur í bólkin, merkir ikki allan sviðan av, at tað er ov trongt, men verður hetta býtt út á allar.

# 5. Um tilfeingisrentu

## *5.1 Hugtakið*

Ein og hvør vinna verður rikin við tí fyri eyga at geva vinning av virkseminum. Hesin vinningur verður vanliga roknaður sum vinningur (avkast) av íløguni, eftir at aðrir framleiðslufaktorar eru goldnir. Ymiskir vinnuvegir hava ymisk krøv til vinningin, tí hædd eigur at vera tikin fyri tí vága, vinnan ber við sær.

Tilfeingisrenta er tann vinningur eitt givið tilfeingi gevur útyvir vanligan vinning. Tilfeingi, sum fiskur og olja, vera til av sær sjálvum, uttan kostnað fyri tann sum framleiðir. Hesi ganga so inn í framleiðsluna sum ókeypis faktorar og kunnu geva vinning út yvir vanligan vinning í hesum vinnum[14]. Vinningurin av fiskiskapi verður tí partvíst vinningur av sjálvum tilfeinginum, og partvíst vinningur av øðrum framleiðslufaktorum. Ein vanligur handilsrekandi má fyrst fáa sær hølir v.m., síðani keypa sína vøru og til seinast selja hesa vøru víðari við vinningi. Tann, sum fæst við oljuvinnu, má fáa hendur á rakstrargøgnum fyri at fáa hendur á oljuni. Oljan verður seld víðari við vinningi, men tann, sum hevur útvunnið oljuna, hevur ikki goldið beinleiðis fyri oljuna.

Er óvanligur vinningur í eini vinnu, dregur hetta fleiri íløgur at sær – tí her kastar íløgan mest av sær. Íløguhugurin heldur fram, líka til vinnan ikki longur kastar nakað av sær. Úrslitið verður, at íløgurnar gerast størri enn neyðugt, fyri at gagnnýta tilfeingið. Teir einstøku íleggjararnir eru vanliga heldur ikki líkastillaðir, tá talan er um kostnaðin, fyri at vera í vinnuni. Hesin ójavni førir við sær, at tað eru tey við tí lægsta kostnaðinum í mun til tað, sum fæst burturúr, ið fáa gagn av óvanligum vinningi. Tann seinasta íløgan vil ikki geva nakran óvanligan vinning – bara vanligan vinning. Hesin íløguhugur í eina vinnu, ber so eisini tað við sær, at minni verður til íløgur í aðrar vinnur.

Fyri tann einstaka fiskimannin/reiðarin er tað skilagott at gera íløgur, soleiðis at hann kann fáa sum mest fyri hesa íløgu. Í fiskiskapi verður hetta vanliga gjørt við at gera stórar íløgur, soleiðis at meiri kann fiskast. Men við hesum atburði skaðar fiskimaðurin/reiðarin sítt egna grundarlag, tá størri fiskiskapur vil minka um stovnin og tað avkast, stovnurin kann geva. Tí eru hesar íløgur spill av tvinnanda tilfeingi - kapitali og fiskatilfeingi - samlaðu íløgurnar fóru út um tað, sum samlað gav største avkastið[15].

Um ongar avmarkingar eru í fiskiskapi, vil hetta føra til, at ikki er gjørligt at heysta nakra tilfeingisrentu. Orsøkin er, at nýggj koma í vinnuna, so leingi nakar vinningur er. Er tilfeingisrenta til staðar í føroysku fiskivinnuni, er hetta tí, at eydnast hevur verið at avmarka luttøkuna í vinnuni soleiðis, at fiskiskapurin er á einum støði, ið gevur meir enn vanligan vinning til luttakararnar í vinnuni[16].

### 5.1.1 Søguligt

Líta vit aftur í søguna, so tosaðu teir gomlu búskaparfrøðingarnir (t.d. Richardo) um jørðrentu. Hetta var vinningur, ið tann besta jørðin gav, sum ikki var úrslit av sjálvari framleiðsluni. Í praksis var henda rentan leigugjald, ið bøndurnir rindaðu góðseigarunum. Hugsanin var, at so leingi bara tann besta jørðin varð dyrkað, gav hendan vinning út yvir teir framleiðslufaktorar, sum vórðu nýttir. Jørðrentan gjørdist tó minni og minni tess minni fruktagóð (produktiv) jørðin var, og sást hetta aftur í leigugjaldinum. Jørð, sum ikki gav so mikið av sær, at hon kundi gjalda fyri framleiðslu-faktorarnar, varð ikki dyrkað.

[14] Óvanligur vinningur kann eisini vera í øðrum støðum, t.d. í monopolstøðu.
[15] Sjónarmiðið kann lýsast við spurninginum: Um bara ein eigari var sum rak fiskiskap og hevði atgongd til tilfeingið, vildi hesin so hátta sær á sama hátt, sum allir teir sum í dag reka fiskiskap?
[16] Her átti ein umfatandi kanning at verði gjørd av tilfeingisrentuni í føroysku fiskivinnuni í dag. Arbeiðsbólkurin hevur tó ikki møguleikar ella tíð at fáa eina slíka kanning gjørda. Her kann vera víst á eina kanning av norsku fiskivinnuni, har úrslitið vísir, at í dag er tilfeingisrentan millum uml. 800 mió. NKR og ÷ 800 mió. NKR. Um aðrar loysnir vórðu valdar, kundi tilfeingisrentan verið uml. 8 mia. NKR. Kanningin kann lesast á www.snf.no og ber heitið ”ressursrenten i norske fiskerier”.

Leigugjaldið – tilfeingisrentan - ið kravt var av jørðini, var sett eftir eftirspurninginum eftir jørðini. Eftirspurningurin eftir jørð fylgdi eftirspurninginum eftir korni. Tá jørðin var avmarkað, vildi ein hægri eftirspurningur eftir korni geva ein hægri prís. Tann hækkandi prísurin fall tó ikki til bóndan, men til góðseigaran, sum setti leigugjaldið eftir prísinum á korni, soleiðis at leigugjaldið svingaði við prísinum. Her sæst, at leigugjaldið ikki er avgerandi fyri prísin, men at raðfylgjan er øvugt – prísurin er avgerandi fyri leigugjaldið.

Henda jørðrenta fevnir um tað sama, vit í dag nevna tilfeingisrenta. Nú á døgum er tað ikki bara jørð, vit hugsa um, men alt tilfeingi vit gagnnýta.

Føra vit hesa hugsan yvir á fiskiskapin, sum vit kenna hann, kunnu vit orða hesar grundhugsanir:

- Ymisk fiskiveiða skal viðgerast ymiskt
- Tilfeingisrenta er treytað av prísinum á fiskinum
- Støddin á tilfeingisrentuni er treytað av avmarkan í tilgongdini til fiskiskapin

### 5.1.2 Prísáseting

Spurningurin um prísáseting á fiskirættindum eigur at verða settur. Sum sagt omanfyri, so er støddin av tilfeingisrentuni treytað av galdandi prísi á fiskinum til eina og hvørja tíð. Hesin prísur er ikki støðugur, og eingin einstakur aktørur er førur fyri einsamallur at ávirka prísin. Kostnaðurin er hinvegin ikki eins fyri allar aktørar, og kann tann einstaki aktørurin ávirka sín egna kostnað.

Tilfeingisrentan – og harvið prísurin á rættindum – svara til nútíðarvirði av mettari tilfeingisrentu í framtíðar tíðarskeiðum. Avgerandi fyri nútíðarvirðið er sjálvt tíðarskeiðið, talan er um, og tann rentufótur, ið valdur verður – sum eigur at vera besta alternativa íløguloysnin.

Dømi[17]:

Eg keypi rættindi, ið eru galdandi fyri komandi 5 árini. Mítt besta alternativ fyri íløgur er t.d. keyp av partabrøvum, sum geva ein vinning uppá 10% p.a. Eg rokni við, at tann óvanligi vinningurin hesi árini vil vera kr. 500.000 p.a.

Eg vil geva fyri rættindini: 1.89 mió. $L = g\frac{1-(1+r)^{-n}}{r}$

Um rættindini ikki vóru tíðaravmarkað, vildi eg givið: 5,0 mió. fyri hesi rættindi. (500.000/0,1)

Í praksis kann tó hugsast, at prísurin á fiskirættindum kemur at seta hinar framleiðslufaktorarnar undir trýst.

## 5.2 Hvussu kann tilfeingisrenta fáast til høldar?

Omanfyri er sagt, at við avmarkingunum sum eru í fiskivinnuni, bæði við tali á loyvum og tali á døgum, er fortreyt skapt fyri, at tilfeingisrenta er til staðar í vinnuni. Sum nú er, fellur hendan øll til tey, sum eru í vinnuni. Spurnartekin hevur verið sett við, um hetta er rímiligt og í samsvari við endamálið í lógini um vinnuligan fiskiskap.

[17] Útrokningin er nærri útgreinað í fylgiskjali 1

Út frá einum búskaparligum sjónarmiði má sigast, at ikki er avgerandi, hvør fær tilfeingisrentuna til høldar, men bert, at hon kemur til høldar. Hvør fær tilfeingisrentuna er ein býtisspurningur, ið má avgerast út frá øðrum kriterium. Men tá tað er sagt kann leggjast afturat, at búskaparfrøðin kann takast til hjálpar, fyri at siga nakað um, hvussu ymisk amboð vilja virka, tá eitt býti skal fremjast í verki.

Tá avgerð skal takast um hetta, eru minst tvey fyribrygdi, sum eiga at vera havd í huga:
tilfeingisrentan er ikki ein ávís upphædd, men er treytað av marknaðarstøði, tilgongd og kostnaðarstøði hjá teimum, ið reka vinnuna. Og at: um eingin støða verður tikin til hetta, er tað eisini ein støðutakan. Tá verður hildið fram við verandi skipan, har tilfeingisrentan fellur til tey, sum vóru í vinnuni 1. januar 1995.

### 5.2.1 Gjøld

Gjøld á tænastur, sum tað almenna veitir, eru væl kend, eitt nú skrásetingargjald, veggjald, gjald fyri at fáa pass og gjald fyri heilsuváttanir. Vanliga hava hesi gjøld tann eginleika, at tey vera løgd á tey, sum nýta hesar skipanir. Sjálvt gjaldið er ein meting av kostnaðinum av tænastuni. Tann grund-leggjandi hugsanin aftan fyri hesi gjøld er, at um eingin brúkari var av viðkomandi skipan, so vildi heldur ongin kostnaður verið.

Gjøld í fiskivinnuni kundu verið nýtt í ymiskum hami. Í núverandi lóg er heimild at krevja avgreiðslugjøld, men hevur henda heimild ikki verið nýtt fyrr enn nú við kunngerð nr. 85 frá 31. august 2006. Ásett gjøld koma ikki at taka hædd fyri gongdini í vinnuni, men skulu gjaldast uttan mun til, hvussu gongdin annars er. Hinvegin er talan um fastar upphæddir ella føst prosent, soleiðis at hædd kann takast fyri hesum í rakstrarætlanum. Vera gjøld beinleiðis knýtt at tí, sum veitt verður, kann hetta elva til, at óreglusemi í uppgerðini av veiðinøgd/slag tekur seg upp. Serliga um hesi gjøld eru munandi.

**Avhendingargjøld**
Talan er her um at leggja gjald á, tá loyvir, kvotur og fiskidagar skifta hendur. Seljari verður skattaður av søluni. Ein slík skipan vil darva umsetiligheit, tá seljari veit, at hann skal av við meginpartin av tí, hann selur fyri. Eisini vil eitt slíkt avgjald hækka prísin.

Ført hevur verið fram, at tá eitt slíkt gjald darvar umsetiligheitini av rættindum, vil tað bert føra til, at partabrøv skifta hendur. Her er so gjørligt at nýta somu leið, sum verður nýtt í Norra, har broytingar í eigaraviðurskiftunum fyrst skulu góðkennast av fiskivinnumyndugleikunum, áðrenn hesar broytingar verða framdar. Krøvini, sum norskir myndugleikar seta til tey, ið reka fiskiskap, mugu havast í huga í hesum sambandi.

**Avgreiðslugjald**
Avgreiðslugjald fyri at útskriva loyvir. Øll loyvir koma helst at hava á leið sama kostnað, tá hetta má vera grundað á kostnaðin av avgreiðsluni. Eitt slíkt gjald vildi verið hvørja ferð eitt veiðiloyvi varð útskrivað – árligt gjald. Harafturat hevði eitt gjald verið fyri fiskiloyvir, sum kunnu vera fyri styttri tíð. Tey fiskifør, ið hava fleiri fiskiloyvir, koma at gjalda fyri hvørt av teimum. Ikki kann roknast við, at hetta vera munandi upphæddir.

Verður støði tikið í verandi skipan, kann helst ikki roknast við, at útskriving v.m. av verandi loyvum er meir enn kr. 500.000[18]. Er hinvegin talan um, at avgreiðslugjaldið skal taka støði í allari umsitingini av loyvisskipanini, vil hetta vera nakað hægri.

**Umsitingargjald**

Eitt ávíst gjald fyri hvønn fiskidag ella veidd tons, soleiðis at tey, sum hava størri tal koma at gjalda meir. Gjaldið skal afturgjalda kostnaðin av umsitingini av fiskivinnuni. Kravið kundi t.d. verið, at vinnan bar kostnaðin av umsitingini av loyvisskipanini, fiskivinnugransking, rannsóknir og eftirlit. Argumentið er, at serligar tænastur, sum tað almenna veitir ávísum vinnubólkum, eiga hesi sjálvi at bera (partvíst) kostnaðin av. Hinvegin, um vinnan skal gjalda, má roknast við, at vinnan setur krøv um, hvørjar tænastur hon skal/ynskir at fáa[19]. Gjøld kunnu nýtast sum stýringsamboð, tá hesi eru við til at hækka kostnaðin hjá teimum, sum eru í vinnuni.

Um eitt slíkt tilfeingisgjald ikki bert er eitt eiti, kann hetta føra til effektiviseringar og tillagingar í fiskiflotanum. Størsti trupulleikin er at áseta, hvussu stórt gjaldið skal vera, tá hetta ikki verður sett út frá marknaðartreytum, men sum ein umsitingarlig avgerð. Stórt trýst vil altíð vera á politisku skipanina, um at seta hetta so lágt sum yvirhøvur gjørligt.

Sum eina roynd at seta tøl á, hvussu nógv ynskiligt var at fáa inn í hesum gjøldum, kann talva 8 nýtast - sí niðanfyri. Hesi tøl skulu takast við fyrivarni og skulu bert nýtast vegleiðandi. Verður ein slík skipan sett í verk, er neyðugt við eini neyvari greining av, hvørji tøl eiga at vera við.

Í praksis virka slíkar skipanir oftast soleiðis, at ein partur, t.d. 2/3, skal gjaldast av brúkaranum, meðan tað sum eftir er, kemur undir almenn áhugamál. Hartil skal havast í huga stuðulin, sum verður latin fiskivinnuni, eitt nú minstaløn og skattaniðurseting.

| **Kostnaðurin 2004** | |
|---|---|
| Umsiting | |
| Fiskivinnustovan | 3,8 mió. |
| Gransking | |
| Granskingarverkætlanir<br>Fiskivinnuroyndir | 3,4 mió.<br>5,0 mió. |
| Rannsóknir | |
| Fiskirannsóknarstovan<br>Magnus Heinason | 11,4 mió.<br>9,5 mió. |
| Eftirlit | |
| Fiskiveiðieftirlitið | 35,3 mió. |
| **Tilsamans** | **68,4 mió.** |

**Talva 8**

*Talvan sýnir kostnaðin á landskassaroknskapinum av hesum tænastum.*
*(Kelda: Jørmann Petersen, Fiskimálaráðið)*

[18] Meting frá táverandi fíggjarleiðara í Fiskimálaráðnum, Jørmann Petersen.
[19] Vinnan rindar t.d. fjarskiftiseftirlitið og posteftirlitið, tó uttan at vinnan avgerð, hvat peningurin fer til.

**Tilfeingisgjald**
Tann sannroynd, at tilfeingisrenta er til staðar í eini vinnu, reisir spurningin um, til hvønn skal henda tilfeingisrenta fella til. Um tilfeingisrentan skal fella til felags landshúsarhaldið, so er neyðugt við eini skipan til at fáa hana frá tí vinnurekandi til landshúsarhaldið. Dømi um hetta er serstaka oljuskattingin, har partur av einum avlopi skal fella til tað almenna. Grundgevingin fyri einum slíkum gjaldi er júst tilfeingisrentan og býtið av hesi rentu.

Í mun til onnur gjøld, so vil eitt tilfeingisgjald taka hædd fyri gongdini í vinnuni við tað, at gjaldið – skatturin – bert skal gjaldast av einum møguligum avlopi, eftir at ávísir kostnaðir eru trektir frá.

Veikleikarnir í eini slíkari skipan eru teir somu sum ein skipan við umsitingargjaldi, sí omanfyri. Ein skipan við tilfeingisgjaldi er nærri viðgjørd undir broti 5.4.

Í praksis eru ymisk gjøld innførd i fleiri londum. Sambært bókini ”The Cost of Fisheries Management”, so er Namibia einasta land í heiminum, har landskassin hevur beinleiðis inntøkur av fiskiveiðuni, meðan fleiri lond eru, sum krevja ávís gjøld sum afturbering fyri tann kostnað, samfelagið ber av t.d. gransking innan fiskivinnu, fiskirannsóknir og stovnsmetingar, umsiting av loyvisskipan, eftirlit og vaktarhald. Lond, sum hava slíka skipan eru eitt nú Ísland, Norra, Avstralia og Ný Sæland.

### 5.2.2 Rættindamarknaður

Uppskot Búskaparráðsins hevur verið nógv umtalað millum manna og í fjølmiðlunum. Her skal ikki vera gjørt burturúr at lýsa teirra hugsanir, men bert nakrar stuttar almennar viðmerkingar. Grundleggjandi má havast í huga, at ein rættindamarknaður er fyri at fáa tilfeingisrentuna til høldar og skapa karmar fyri effektiviseringum. Tað er ikki ein fíggingarskipan av almennu útreiðslunum. Óvist er, hvat ein slík skipan gevur, og sveiggini kunnu vera stór.

At rættindi eru umsetilig, sum á einum rættindamarknaði, førir við sær, at effektiviseringar verða framdar í vinnuni, tillagingar vilja fara fram í flotanum, og samfelagsbúskaparliga vil samlaða tilfeingið, arbeiðsmegi, kapitalur og fiskatilfeingi, verða nýtt betur enn annars (optimering). Her verður tað tann kenda ”ósjónliga hondin” hjá Adam Smith, sum kemur at stýra gongdini.

Um sølan fer fram um ein almennan rættindamarknað, ella rættindini fyrst vera tillutað, og síðani eru tað tey, sum hava fingið rættindini sum selja, hevur sama búskaparliga árin. Munurin er bara ein býtisspurningur - hvør skal fáa inntøkurnar av hesum, tað almenna ella tað privata. Hinvegin hevur ein almennur rættindamarknaður aðrar møguleikar, t.d. at selja í minni eindir ella fyri styttri tíðarskeið.

Í verandi skipan hava vit tvey loyvir – veiðiloyvi og fiskiloyvi. Veiðiloyvið hevur ført við sær, at skip hava eitt munandi hægri virði enn sjálvt skipið er vert. Orsøkin er, at tá ikki fleiri veiðiloyvi verða givin, verður knappheit á hesum loyvum, og tá fáa tey virði. Um veiðiloyvi kann vera givið øllum sum uppfylla ávís kriterie, kemur veiðiloyvið í sjálvum sær ikki at hava nakað virði. Sølu/keypsprísur á skipum kemur eisini at falla, um hesi verða seld uttan veiðiloyvi, tí at nýggi eigarin við eini sølu bara kann søkja og fáa eitt nýtt veiðiloyvi.

Nýggj veiðiloyvi kann merkja øktan kapacitet. Men einki kann fiskast bara við veiðiloyvi, fiskirættindi krevjast eisini. Tey nýggju veiðiloyvini kunnu so keypa fiskidagar frá verandi eigarum av fiskidøgum – endaliga ella fyri eitt ár, ella á rættindamarknaðinum. Ein spurningur, ið má viðgerast her er, um ein øking av kapacitetium er haldbar. Hugsast kann, at í framtíðini vil kapaciteturin tillaga seg tilfeingið, sum er tøkt. Men er fyrst meir kapacitetur komin inn, vil hetta seta politisku skipanina undir stórt trýst, fyri at fáa rættindi til kapacitetin.

Størsti fyrimunurin við einum marknaði, framum ásett gjøld, er sjálv prísásetingin. Á einum marknaði eru tað partarnir sjálvir, ið áseta prísin, og slepst tá undan tí truplu mannagongd at áseta gjøld sum partur av eini politiskari kabal. Harumframt er ein stórur fyrimunur, eggjanin til effektiviseringar ein uppboðssøluskipan hevur.

Uppskotið hjá Búskaparráðnum er serliga vent ímóti døgunum. Spurningurin um kvotur krevur eisini viðgerð í hesum sambandi. Skal sama skipan vera galdandi fyri kvotur? Her má havast í huga, at tað kann vera trupult at fáa ein effektivan marknað fyri fiskasløgini, sum vera stýrd við kvotum. Orsøkin er, at reiðaríini í vinnuni eru so fá. Í rækjuvinnuni kanska bara 2, og í pelagisku vinnuni eini 3-4 o.s.fr. Ein møguleiki er, at frítt er hjá øllum at keypa – møguliga vil hetta gera støðuna nakað betur, tá tað kemur til at skapa ein effektivan marknað.

### 5.2.3 Nøkur landadømi

Her vera nøkur lond nevnd sum dømi um skipanir, har ymisk gjøld verða áløgd teimum, ið reka fiskiskap.

**Ísland**

Í 2004 var ein skipan sett í verk í Íslandi, sum verður nevnd ”Veiðigjald”. Hugsanin aftan fyri veiðigjaldið er júst tilfeingisrentan. Frammanundan vóru ymisk gjøld løgd á vinnuna, fyri at afturbera kostnaðin av umsitingini av vinnuni. Hesi gjøld vórðu tikin av, tá veiðigjaldið varð sett í verk. Sagt verður, at samlaða gjaldið er minni nú og meira tengt at gongdini í vinnuni enn frammanundan. Skipanin er bygd á, at av nettoúrslitinum pr. kg/kvotu skal gjaldast eitt avgjald. Avgjaldið byrjaði við 6% og skal hækka til 9,5% í 2009.

Veiðigjaldið verður roknað á henda hátt:

Avreiðingarvirði tilsamans
-roknaður oljukostnaður
-annar rakstrarkostnaður
-lønarkostnaður 39,8%
Grundarlag fyri veiðigjaldi
=Útroknað veiðigjald er 9,5% av grundarlagnum.

Síðani verður øll veiðan umroknað til toska ækvivalent og býtt við útroknaða veiðigjaldinum. Úrslitið av hesum er veiðigjald pr. kg. toska ækvivalent. Kvotuparturin hjá einstaka skipinum verður síðani faldaður við hesum tali, og harvið kemur gjaldi pr. skip fram.
Útrokningin er grundað á veiðu- og sølutølini frá 1. mai til 30. apríl, og verður gjaldið ásett 15. juli galdandi fyri komandi fiskiárið, sum byrjar 1. september. Kostnaðurin er roknaður við støði í ár

2000, og vera síðani tillagingar gjørdar. Oljukostnaðurin verður roknaður eftir miðalprísinum á olju í tíðarskeiðinum.

**Norra**
Í Norra eru ásett ymisk gjøld fyri vinnuna. Hesi eru:
- Avgreiðslugjald fyri viðgerð av málum – millum 1.000 og 8.000 kr.
- Árligt gjald fyri skráseting - 1.500 kr. pr. fiskifar
- Eftirlitsavgjald – prosentpartur av avreiðingarvirðinum
- Avgjald til upphøggingargrunn

Samanlagt svara hesi gjøld til uml. 1% av samlaða avreiðingarvirðinum hjá norskum skipum.

**Namibia**
Namibia hevur eina beinleiðis diskriminerandi skipan, har "namibar", ið reka fiskivinnu, sleppa bíligari, enn um útlendingar eru við.

Í Namibia verður árligt gjald kravt fyri veiðiloyvi. Gjald verður kravt fyri hvørt tons, ið verður landað. Gjaldið er ymiskt alt eftir fiskaslagi. Loyvir verða givin at fiska ávíst fiskaslag. Eyka gjald verður lagt á hjáveiðu. Harumframt verður serligt avgjald lagt á gransking/rannsóknir[20].

## 5.3 Samanbering av fíggjarligum úrslitum

Tøl eru takksom. Kanska serliga roknskapartøl! Slík skulu viðgerast við varsemi, og mangan er neyðugt at hava kunnleika til innihaldið í grundtølunum, tá greiningar verða gjørdar. Hóast hesar veikleikar, verður ein roynd gjørd at seta nøkur lyklatøl upp fyri fiskifør og ymiskar aðrar vinnugreinar. Tølini eru bygd á roknskapar frágreiðingarnar hjá Rasmussen & Weihe yvir fiskiflotan og tøl í hagtalsgrunninum hjá Hagstovuni. Nøkur niðurstøða kann ikki gerast út frá hesum tølum, men møguliga kunnu tey nýtast til at geva ábendingar[21].

**Eginpeningsavkast[22]**

| Bólkur | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | Miðal pr. bólk |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Pelagisk skip | 50% | 17% | 9% | 48% | 36% | 17% | 14% | 27% |
| Rækjuvinna | 9% | 4% | -13% | -27% | -22% | -46% | -27% | -17% |
| Verksmiðjutrolarar | 20% | 15% | 17% | 26% | 27% | 12% | 24% | 20% |
| Lemmatrolarar | 25% | 6% | 10% | 3% | 11% | 9% | -11% | 8% |
| Partrolarar | 43% | 24% | 22% | 32% | 25% | -4% | -8% | 19% |
| Línuskip | 44% | 28% | 9% | 25% | 24% | 30% | -7% | 22% |
| Miðal pr. ár | 32% | 16% | 9% | 18% | 17% | 3% | -3% | |

[20] Meira kann lesast um hesa skipan á http://www.mfmr.gov.na

[21] Víst verður til frágreiðingina "Focus på økonomien i det nordiske fiskeriet", har øll hesi viðurskifti vera gjølliga viðgjørd. Tíverri verður hendan ikki liðug, áðrenn arbeiðið at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, skal vera liðugt.
[22] Tølini frá Hagstovuni yvir aðrar vinnur og tølini í roknskapargreiningunum frá Rasmussen & Weihe eru ikki beinleiðis sambærlig, tá tað kemur til renting av eginognini. Í hesi uppseting eru tølini frá Rasmussen & Weihe rættað, soleiðis at ein samanbering kann gerast. Eginpeningsavkast = úrslit áðrenn óvanligar postar/eginogn.

| Aðrar vinnur | | | | | | | | Miðal pr. vinnu |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Byggivinna | 29% | 18% | 27% | 15% | 19% | 11% | | 20% |
| Ídnaður | 23% | 21% | 15% | 18% | 12% | 9% | | 16% |
| Handil v.m. | 19% | 18% | 15% | 17% | 18% | 22% | | 18% |

**Talva 9**

*Talvan vísir renting av eginogn fyri ymiskar skipabólkar og aðrar vinnubólkar*

Renting av eginogn er tað avkast, eginpeningurin gevur í virkinum. Hetta avkast skal síggjast í mun til alternativa plasering av peninginum. Talið er roknað sum úrslit, áðrenn óvanligar postar og skatt, býtt við eginogn.

| Ognaravkast | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | Miðal pr. bólk |
| Pelagisk skip | 20% | -3% | 6% | 21% | 17% | 12% | 7% | 11% |
| Rækjuvinna | -3% | 5% | -1% | -4% | -4% | -11% | -5% | -3% |
| Verksmiðjutrolarar | 10% | 6% | 7% | 11% | 11% | 5% | 9% | 8% |
| Lemmatrolarar | 11% | 5% | 7% | 4% | 7% | 5% | -2% | 5% |
| Partrolarar | 23% | 15% | 14% | 17% | 14% | 0% | -1% | 12% |
| Línuskip | 22% | 17% | 9% | 18% | 15% | 18% | 2% | 14% |
| Miðal pr. ár | 14% | 8% | 7% | 11% | 10% | 5% | 2% | |
| Aðrar vinnur | | | | | | | | Miðal pr. vinnu |
| Byggivinna | 11% | 10% | 14% | 7% | 8% | 6% | | 9% |
| Ídnaður | 12% | 12% | 8% | 11% | 8% | 7% | | 10% |
| Handil v.m. | 10% | 9% | 8% | 9% | 10% | 10% | | 9% |

**Talva 10**

*Talvan vísir ognaravkast fyri ymiskar skipabólkar og aðrar vinnubólkar*

Ognaravkastið sigur nakað um, hvussu vinningsevnið í virkinum er í mun til samlaða kapitalin, sum er bundin í virkinum – evnini at forrenta ognina. Ognaravkastið er roknað sum úrslitið av primerum rakstri býtt við ognum tilsamans[23].

Í frágreiðingini frá Nordisk Ministerråd ”Økonomien i de nordiske fiskerier – fokus på resourcerenten” er gjørd ein roynd at seta tal á tilfeingisrentuna í m.ø. føroysku fiskivinnuni. Ein útrokning fyri partrolararnar av tilfeingisrentuni vísir, at hendan fyri árini 2001-2003 var 28% av avreiðingarvirðinum[24].

## 5.4 Uppskot til skipan

Tá ið skipanir av ymiskum slag verða settar í verk, er týdningarmikið at hava í huga, hvat hesar skipanir eggja til. Um tilfeingisrentan skal falla til onnnur enn tey, sum reka fiskivinnuna í dag, mega vit tí umhugsa, hvønn atburð ein broyting vil føra við sær hjá teimum, sum starvast í vinnuni.

[23] Í fylgiskjali 2 er sama talvan, men tó við tølum aftur til 1996 fyri skipabólkarnar.

[24] Frágreiðingin kann heintast á: http://www.norden.org/pub/sk/showpub.asp?pubnr=2006:540

T.d. kann hugsast, at um eitt avgjald verður lagt á allan landaðan fisk, og avgjaldið verður størst fyri dýraru fiskasløgini, kann hetta elva til, at fiskur verður seldur sum annað, enn tað hann er.

Endamálið við lógini má eisini havast í huga, tá avgerð skal takast um, hvussu hesi viðurskifti eiga at vera skipað í framtíðini. Greitt er, at í hugtakinum ”fíggjarlig burðardygg veiða” er tann týdningurin við, at vinnan sjálv er før fyri at bera tann kostnað sum krevst, fyri at reka hesa vinnu. T.v.s. stuðul eigur ikki at vera í skipanini uttan so, at vinnan sjálv er før fyri at fíggja henda stuðul. Líkaleiðis, at vinnan er før fyri at bera tann umsitingarliga kostnaðin, myndugleikarnir hava av fiskiskapinum.

Havandi hesi viðurskifti í huga, kundu nakrar leiðreglur verið orðaðar:

- Skipanin eigur at eggja til øktan vinning í vinnuni
- Fyrilit eigur at vera tikið fyri fíggjarligu gongdini í vinnuni
- Skipanin eigur ikki at darva effektiviseringum
- Ymiskur fiskiskapur kann viðgerast ymiskt
- Atgongd til vinnuna

### 5.4.1 Veiðigjald

Í Íslandi er ein skipan sett í verk, tað sonevnda ”Veiðigjaldið”, har partur av tilfeingisrentuni fellur til landshúsarhaldið. Skuldi ein slík skipan verið sett í gildi í Føroyum, heldur nevndin, at neyðugt er við nøkrum broytingum.

Tann íslendska skipanin byggir á avreiðingarvirði minus roknaðan oljukostnað, minus roknaðar rakstrarútreiðslur og minus lønarútreiðslur. Síðani verður úrslitið umroknað til toskavirði og býtt út á hvørt skip eftir kvotunum, skipið hevur. Íslendska skipanin tekur ikki hædd fyri, at hjá summum bólkum kann ganga illa fíggjarliga í eitt tíðarskeið. Hesir skulu hóast tað gjalda veiðigjald.

Hjá okkum fiska summi í kvotuskipan, meðan onnur fiska í fiskidagaskipan, og uppaftur onnur eru ikki í nakrari skipan.

Allar upplýsingar eru ikki tøkar. Vit hava ikki eina uppgerð yvir, hvussu oljunýtslan í teimum ymisku bólkunum hevur verið. Hesin trupulleikin kann loysast við eini meting av oljunýtsluni. Tann metti oljukostnaðurin kann síðani verða trektur frá rakstrarkostnaðinum. Á henda hátt ber til at útskilja oljukostnaðin. Orsøkin til at hava oljukostnaðin fyri seg er, at hesin hjá summum skipabólkum er avgerandi fyri fíggjarliga úrslitið. Fyri útróðrarbátar (bólkur 4 og 5) hava vit eingi samlað hagtøl fyri raksturin hjá hesum bátum. Avreiðingarvirðið er tó tøkt. Tí er neyðugt hjá hesum bólkum at gera nakrar metingar um býtið av hýru og rakstrarkostnað. Í fyriliggjandi uppskoti er metingin gjørd út frá roknskapinum á 6 bátum í bólkinum fyri árini 2003-04.

Bólkur 5 vil aftur her skapa nakrar trupulleikar. Skotið verður upp, at fyri bólk 5A verður eitt gjald kravt pr. dag, sum er miðal av gjaldinum, sum skuldi verið fyri árini 2002-2004, meðan einki gjald verður kravt av øðrum bátum (bólkur 5B)[25][26].

[25] Uppskotið er treytað av, at frítt er at koma inn í bólk 5, og verður mett, at umsitingarliga vil tað ikki loysa seg at krevja eitt gjald pr. bát í hesum bólki.

Fyriliggjandi uppskot byggir á, at skipanin kemur at rúma nøkrum bólkum, tá veiðigjaldið verður roknað. Við hesum ber til at taka hædd fyri, um ávísir bólkar hava tað fíggjarliga tungt eitt tíðarskeið. Tí verður skotið upp, at um avgjaldsgrundarlagið er negativt, so skal einki veiðigjald rindast. Vansin við at gera fleiri bólkar er, at um fortreytirnar hjá einum bólki broytast munandi, so verður útrokningargrundarlagið ikki eftirfarandi. Tað er støðan eitt nú við rækjuskipunum í løtuni, har útrokningargrundarlagið byggir á, at 4-6 skip eru í vinnu, meðan støðan í dag er, at bert 2 skip eru í vinnu.

| Gjøld | Kr. pr. tons | | Kr. pr. dag | |
|---|---|---|---|---|
| pr bólk | 2002 | 2004 | 2002 | 2004 |
| Nótaskip | 50,- | 23,- | | |
| Rækjuskip | 0 | 0 | | |
| Lemmatrolarar | 116,- | 67,- | | |
| Garnabátar | 0 | 59,- | | |
| Partrolarar | | | 825,- | 260,- |
| Línuskip | | | 1233,- | 726,- |
| Útróðrarbátar | | | 214,- | 159,- |
| 5A | | | 68,- | 46,- |
| Onnur | | | | |

**Talva 11**
*Veiðigjald fyri hvønn fiskidag og hvørt tons fyri árini 2002 og 2004*

Fyri fiskifør sum fiska í fiskidagaskipan kemur veiðigjaldið at vera eitt ávíst gjald fyri hvønn tillutaðan veiðidag. Fiskifør, sum fiska í kvotuskipan, skulu gjalda eftir veiddari nøgd, meðan fiskifør, sum hvørki eru í kvotu- ella fiskidagaskipan koma at gjalda 1% av avreiðingarvirðinum. Í talvu 4 er sett upp, hvat veiðigjaldið vildi verið í 2002 og 2004, um hendan skipanin var í gildi. Skilligt er, at gjaldið fylgir gongdini í vinnuni[27].

Í uppskotinum er veiðigjaldið sett til 9% av avgjaldsgrundarlagnum – meir um hetta seinni. Verður veiðigjaldið fyri ymisku bólkarnar gjørt upp sum prosent av avreiðingarvirðinum, er greitt, at tað er ymiskt, hvat hvør bólkur kemur at gjalda. Hetta er tó eisini fult í samsvari við hugsanina aftan fyri veiðigjaldið. Tilfeingisrentan í teimum ymisku bólkunum er ymisk alt eftir, hvussu effektivur bólkurin er. Og tí má veiðigjaldið – sum er ásett fyri at fáa nakað av tilfeingisrentuni til landshúsarhaldið – eisini vera ymiskt.

Verður árið 2004 nýtt sum dømi, vildi veiðigjaldið sum prosent av avreiðingarvirðinum verið:

[26] Ein annar háttur at bygt eina slíka skipan upp eftir var at tikið støði í teimum bestu skipunum í hvørjum bólki, og síðani sett veiðigjaldið eftir hesum. Hetta vildi "revsað" teir minni effektivu og vildi skunda undir, at teir minst effektivu bátarnir vórðu skiftir út.

[27] Tølini í øllum útrokningunum byggja á roknskapargreiningarnar hjá Ramsussen og Weihe. Ein vansi við at nýta hesi tøl er, at ikki øll skip eru við í teimum ymisku bólkunum. T.d. eru partrolararnir Stjørnan og Polarhav ikki við, og sama er galdandi fyri línuskipini Eystnes, Froya og Gullberg. Ein annar vansi er, at skip kunnu skifta bólk. Eitt nú er Næraberg skipaður undir onnur skip, men hvar skal Atlantic Navigator?

| Skipabólkur | Veiðigjald |
|---|---|
| Nótaskip | 2,20% |
| Verksmiðjuskip | 2,10% |
| Rækjuskip | 0,00% |
| Lemmatrolarar | 0,60% |
| Partrolarar | 0,80% |
| Garnaskip | 0,30% |
| Línuskip | 0,7% |
| Útróðrarbátar | 0,7% |
| Onnur skip | |
| Miðal | 1,4% |

**Talva 12**
*Talvan vísir ymiskar skipabólkar og veiðigjaldið sum prosent av avreiðingarvirðinum*

Vera tøl frá 2004 nýtt sum dømi, vildi veiðigjaldið í kónum verið góðar 21 mió. – uttan bátar í bólki 5. Sí fylgiskjal 3.

### 5.4.2 Útrokningin av veiðigjaldinum

Veiðigjaldið verður roknað fyri hvønn bólkin sær, sum í talvuni omanfyri. Útrokningin verður gjørd á henda hátt[28]:

Avreiðingarvirði fyri tíðarskeiðið: 1. mai til 30. apríl

-roknaður rakstrarkostnaður, ymiskt fyri bólkarnar
Útgangsstøðið er miðal av roknskapartølunum fyri 2002 – 2004. Hetta talið verður regulerað við føroyska prístalinum
-Oljukostnaður
Útgangsstøðið er ….
Hetta talið skal regulerast við index yvir heimsmarknaðarprísin á olju.
-Hýra fyri hvønn bólk sær. Her verður miðal hýruprosentið av avreiðingunum árini 2002-2004 nýtt.
= Her verður komið fram til avrokningargrundarlagið
= Veiðigjaldið er 9% av avrokningargrundarlagnum

Veiðigjaldið pr. bólk verður síðani antin roknað um til gjald pr. dag ella gjald pr. tons.

Er avrokningargrundarlagið negativt, verður einki veiðigjald kravt.

[28] Fylgiskjølini, merkt nr. 2, eru útrokningar fyri hvønn bólk sær.

Veiðigjaldið kann ikki dragast frá sum kostnaður í skattaroknskapinum.

**Bólkarnir eru[29]:**

| | |
|---|---|
| Lemmatrolarar | Bólkur 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap |
| Partrolarar | Bólkur 2 í fiskidagaskipanini |
| Línuskip | Bólkur 3 í fiskidagaskipanini |
| Útróðrarbátar | Bólkur 4 og 5A í fiskidagaskipanini |
| Garnabátar | Bátar, sum hava loyvi til garnaveiðu, og veiða við gørnum meginpartin av árinum. |
| Pelagiskur fiskiskapur | Nótaskip – og Ídnaðarskip |
| Verksmiðjuskip | Fiskiskapur eftir øðrum fiskasløgum enn uppsjóvarfiski, sum verður virkað umborð. |
| Onnur skip | Veiða, sum ikki kemur undir nakran av hinum bólkunum, og sum ikki er fevnt av undantøkum. |

Í teimum førum har veiðan verður bólkað í bólkin ”Onnur skip”, verður veiðigjaldið roknað sum 1% av bruttoavreiðingarvirðinum. Kann eitt reiðarí í hesum bólkinum vísa á, at raksturin av skipinum gevur hall, verður einki veiðigjald kravt. Veiðigjald verður ikki kravt av skipum, ið reka royndarveiðu burturav.

Hugsanin er, at í sjálvari lógini skal leisturin fyri útrokningina av veiðigjaldinum standa, meðan hátturin fyri hvønn bólk sær verður ásettur í kunngerð. Í viðmerkingunum kunnu so fylgiskjøl tæna sum vegleiðing, hvussu hetta skal gerast.

## 5.4.3. Prosenttalið

Í uppskotinum er veiðigjaldið sett til at vera 9% av avgjaldsgrundarlagnum. Sum víst á omanfyri, er ein trupulleiki við eini slíkari skipan, at gjald skal ásetast umsitingarliga/politiskt og ikki á einum marknaði. Útgangsstøðið fyri prosenttalinum má vera ein útrokning av, hvør tilfeingisrentan er. Ein slík útrokning er tó ikki tøk. Tí byggir ásetingin av prosentsatsinum á eina heildarmeting av vinnuevninum hjá fiskiskipunum, bygt á roknskapartølini hjá vinnuni samanborið við aðrar vinnur, og eitt rímiligt býti av tilfeingisrentuni millum vinnuna sjálva og landshúsarhaldið. Gongdin í hýrum og íløgum í vinnuna geva eisini ábendingar um tilfeingisrentuna. Fyri at fingið eitt enn betur grundarlag, átti ein neyv greining at verði sett í verk av spurninginum um støddina á tilfeingisrentuni í fiskivinnuni. Í hesum sambandi kann vísast til norðurlendsku frágreiðingina sum er nevnd í broti 5.3.

## 5.4.4 Fyrimunir og vansar

Fyrimunir og vansar mega lýsast við at samanbera ymiskar skipanir. Verður valt at fylgja loysnini í Norra við at leggja eitt avgreiðslugjald og umsitingargjald á vinnuna, so tekur hetta gjaldið ikki hædd fyri fíggjarligu gongdini í vinnuni. Tað má metast sum ein fyrimunur, at í hesum uppskoti verður tikið hædd fyri gongdini m.a. soleiðis, at skipabólkar, sum hava hall av beinleiðis rakstrinum

[29] Ein alternativ uppbýting sum helst er búskaparliga skilabetri er: Trolarar (Lemma- og partrolarar), Húka- og garnaveiða (bólkur 3, 4, 5A og garnaskip), rækjuskip, pelagisk skip, verksmiðjuskip og onnur skip.

okkurt árið, ikki skulu gjalda veiðigjald. Um ein skipan verður vald, har umsitingargjald verður kravt av antin tonsum, fiskidøgum ella stødd á skipum vildu somu viðurskifti gjørt seg galdandi – at hesi ikki taka hædd fyri gongdini í vinnnuni.

Fram um uppboðssølu av rættindum má metast, at ein slík skipan er rímiliga stabil ár um ár. Undir øllum umstøðum – um sveiggj vera – so veit vinnan hetta, tí hesi sveiggj koma at vera grundað á nøgd, prís og gongdina í kostnaðum.

Somuleiðis má tað metast sum ein fyrimunur fyri vinnuna, at kostnaðarrokningin tekur útgangstøði í ítøkiligum tølum og ikki sum eitt nú prosent av avreiðingarvirðinum. Við hesum hátti kemur øll effektivitetsbetran vinnuni beinleiðis til góðar.

Fyri vinnuna má tað metast sum ein vansi at skula gjalda veiðigjald, men skal hetta síggjast í mun til, at veiðigjald er gjald fyri at gagnnýta felags tilfeingi føroyinga – fiskatilfeingið. Hinvegin, so hevur politiska skipanin skapt fortreytir fyri, at vinnan kann fáa ein vinning, sum liggur oman fyri miðal vinningin í øðrum vinnum.

Skipanin verður hildin at vera einføld fyri umsitingina, vinnuna og borgaran annars.

Prísurin á fiskirættindum vildi lækkað, tí at nakað av tí virði, sum tilfeingið gevur, nú ikki longur fellur til eigaran av rættindunum, men fer til felags húsarhaldið. Somuleiðis kann tilfeingisgjaldið vera við til at fora fyri óneyðugum íløgum í vinnuna.

Samfelagsbúskaparliga sæð kann ein slík skipan ikki metast sum ein skipan, ið skundar munandi undir effektivisering av vinnuni. Uttan iva vildi ein skipan við uppboðssølu av fiskirættindum elvt til størsta búskaparliga vinningin fyri samfelagið. Tó verður hildið, at við framtíðini í huga, so viðførir skipanin, sum her er skotin upp, at fiskivinnan verður ein vinna, sum kemur at virka undir somu treytum sum aðrar vinnur.

## 6. Skipan fyri útróðrarbátar

Tvær orsøkir eru til at hyggja nærri eftir bólki 5, útróðrarbátar minni enn 15 tons. Onnur er, at bólkur 5 er undantikin nærum øllum ásetingum í verandi lóg. Hugt eigur at vera eftir, um hesi undantøk kunnu skrivast øðrvísi í eini nýggjari lóg, tá hesi gera lógartekstin fløktan at lesa. Við at lúka út her, kann lógin gerast greiðari.

Hin orsøkin er at hyggja eftir sjálvum innihaldinum, ið ásetingarnar fyri bólk 5 skulu hava. Í arbeiðssetninginum er einki sagt um, at verandi skipan fyri bólk 5 skal eftirmetast ella broytast, men tó slepst ikki undan at viðgera bólkin. Ymisk ivamál eru í verandi skipan, har vit eiga at royna at finna betri loysnir. Somuleiðis eru tað spurningar, ið stinga seg upp í viðgerðini av allari lógini, og mega hesir svarast. Arbeiðssetningurin sigur, at í samband við samanleggingar av loyvum, eru tað reglurnar fyri fiskifør størri enn 15 tons, sum skulu kannast. Neyðugt verður at hyggja eftir sjálvum 15 tons markinum, og um hetta eigur at broytast.

Vit eiga at stremba eftir at finna eina skipan, sum er løtt at umsita, tí talið á bátum er stórt. Skipanin má kennast rættvís millum fólk, og somuleiðis má skipanin vera við til at uppfylla endamálið við lógini.

## 6.1 Verandi skipan

Lógin um vinnuligan fiskiskap fatar um allan vinnuligan fiskiskap. § 6 ásetir: *"Tann, ið ætlar sær at avreiða, skal søkja um fiskiloyvi. Um bert verður veitt til húsbrúks, krevst ikki fiskiloyvi".* Út frá hesi áseting má sigast, at verður avreitt, er viðkomandi fevndur av reglunum um vinnuligan fiskiskap. Harafturímóti hava øll rætt til at veiða – men ikki til at avreiða.

Í viðmerkingunum til hesa áseting verður m.a. sagt, at: *"Reglan er ætlað at tryggja, at aldargamli rætturin at søkja sjógvin til egna nýtslu ikki verður skerdur".*

Í upprunalógini frá 1994 var eitt mark uppá 20 BRT nýtt. Í viðmerkingunum til § 6 verður víðari sagt: *Ásettar vera felagskvotur fyri bátar undir 20 BRT, sum vera í 3. pørtum:*

*a) teir við fullum veiðiloyvi,*
*b) ein minni nøgd til bátar, sum hava avmarkað veiðiloyvi, og sleppa teir at avreiða innanfyri nøgdina,*
*c) teir, sum ikki hava veiðiloyvi og bert fiska til persónliga nýtslu.*

Her verður greitt staðfest, at smærru bátarnir skulu býtast í 3 partar[30]. Soleiðis hevur eisini verið gjørt síðani, men eru ymiskar broytingar farnar fram, og ymisk ivamál hava verið reist. Grund-leggjandi er tó hesin strukturur nýttur, sum nevndur er undir a, b og c. Teir bátar, sum koma undir punkt c) reka ikki vinnuligan fiskiskap, og koma tí heldur ikki undir reglurnar hesum viðvíkjandi í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Lógin um vinnuligan fiskiskap heimilar fyri og ásetir beinleiðis serskipanir fyri bólk 5 samanborið við restina av fiskiflotanum í fiskidagaskipanini. T.d. kunnu útróðrarbátar minni enn 15 tons ikki umseta fiskidagar, kunnu ikki leggja loyvir saman í samband við útskifting til størri bát, og hugtakið veiðiloyvi er avtikið fyri henda skipabólk. Eisini vera í kunngerð nr. 105 frá 14. september 2005 um treytir fyri fiskiloyvi og reglur um fiskidagatal til útróðrarbátar minni enn 15 tons ásettar serligar treytir fyri, hvør útróðrarbátur kann fáa fiskiloyvi sum fullrikin; hesar taka støði í veiðinøgd, -virði og aðrari inntøku hjá eigara/útróðrarmanni.

Grein 31 í lógini um vinnuligan fiskiskap hevur ásetingar um, at talið á fiskiførum í fiskidagaskipan ikki skal vera størri enn talið ein ávísan dag – 1. januar 1995. Frá mars 2002 var hetta strikað fyri bólk 5, samstundis sum tað var ásett, at útróðrarbátar minni enn 15 tons, ið ikki høvdu havt fiskiloyvi fyri 1. januar 1995, ikki kundu fáa fiskiloyvi. Henda áseting var tó strikað í mai 2003, tó uttan at seta nakrar reglur ístaðin.

Tað hevur áður verið víst á, at broytingin frá mars 2002 hevur volt stórar umsitingarligar tvørleikar á Fiskivinnustovuni. Neyðugt hevur verið at fingið vissu fyri, um bátarnir hava verið skrásettir fyri 1. januar 1995, ella um báturin er komin í flotan fyri annan bát, sum var skrásettur fyri 1. januar

[30] Hesar viðmerkingar eru skrivaðar til kvotuskipan, men er strukturin í vinnuni tó tann sami.

1995. Eitt annað fyribrigdi – og tað sum kanska hevur verið tyngst umsitingarliga – er, at í 1996/1997 var gjørt av at veita bátum í bólki 5 fiskiloyvi, hóast teir ikki høvdu veiðiloyvi. Hetta var gjørt við støði í ásetingini í grein 5, stk. 4 um fyribils avmarkað fiskiloyvi – tó uttan at víst var beinleiðis til hesa áseting.

Tá Løgtingið í mars 2002 samtykti at broyta grein 31 og samtykti ásetingina í stk. 2, var ikki longur heimild fyri at veita bátum, sum á fyrsta sinni høvdu fingið fiskiloyvi eftir 1. januar 1995, fiskiloyvi aftur. Hetta hevur kravt nógv av umsitingini, og einstøk av hesum málum eru endað sum sakarmál í rættinum ella eru kærd til løgtingsins umboðsmann. Ikki altíð hevur Fiskimálaráðið fingið viðhald fyri sínum sjónarmiðum.

Skipanin frá mars 2002 ásetti, at bátar, ið fyrstu ferð eru skrásettir eftir 1. januar 1995, ikki kunnu fáa fiskiloyvi. Tó ber til at flyta fiskiloyvi av einum báti á ein annan, sum er skrásettur eftir 1. januar 1995, og ikki er størri enn tann, sum verður tikin út. Á tann hátt ber til at fáa fiskiloyvi til ein bát, sum ikki hevur verið skrásettur fyri 1. januar 1995. Hetta ger, at stórur gravgangur er eftir bátum, sum eru skrásettir fyri 1. januar 1995, fyri síðani at flyta loyvið á ein annan nýggjan bát. Hetta gevur eisini nógva umsiting. Ikki bara tí málini eru nógv í tali, men eisini tí greiningin av málunum kann vera sera trupul.

Ein trupulleiki í sambandi við fiskiloyvini, eru sjálvar skrásetingarnar av bátunum í bátayvirlitinum. Er ein stuttleikabátur at rokna sum fiskifar, ið kann fáa fiskiloyvi til vinnuligan fiskiskap? Tað sama er galdandi fyri bátar, sum eru skrásettir at vera brúktir í samband við aling; er ein slíkur bátur eitt fiskifar? Í sambandi við, at nýggj kunngerð um bátar í bólki 5 var lýst í september 2005, er avgerð tikin um ikki at skilja ímillum, hvat slag av skráseting talan er um. Er báturin ikki ræðisavmarkaður, og er hann skrásettur fyri 1. januar 1995, fær eigarin fiskiloyvi.

Samstundis er eisini við broyting í kunngerðini um árskiftið tikin avgerð um at geva teimum bátum fiskiloyvi, sum hóast teir hava verið skrásettir fyrstu ferð eftir 1. januar 1995 kortini hava fingið fiskiloyvi fyri 31. august 2002.

Við broytingunum í kunngerðini fyri útróðrarbátar minni enn 15 tons síðani í september 2005 er regluverkið vorðið greiðari og avgreiðslan av fiskiloyvum til hesar bátar eisini munandi lættari.

Men tað er tørvur á (politiskt) at taka støðu til, um verandi skipan við fiskiloyvum til smærri útróðrarbátar skal broytast meir. Hóast broytingar eru gjørdar, eru framvegis nógv ivamál, sum koma fram í orðaskiftinum. Ein greið støðutakan til, hvussu fiskiloyvi verða latin bátum, minni enn 15 tons, er neyðug. Knýtt afturat hesum er, um allir bátar skulu vera í skipan við fiskiloyvum.

### 6.1.1 Almennar ásetingar

Sum almennar ásetingar í lógini um vinnuligan fiskiskap kunnu nevnast endamálsorðingarnar í grein 2, at tilfeingið skal vera umsitið burðardygt lívfrøðiliga og búskaparliga, at tryggja m.a. støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.

Í grein 6 er ásett, at tann, ið ætlar sær at avreiða, skal søkja um fiskiloyvi. Um bert verður veitt til húsbrúks, krevst ikki fiskiloyvi. Sostatt krevst fiskiloyvi, fyri at kunna reka vinnuligan fiskiskap (avreiða), men fiskiskapur til húsbrúks kann fara fram uttan fiskiloyvi.

Í grein 7 eru treytir um, hvør kann eiga fiskifar undir føroyskum flaggi og fáa fiskiloyvi. Hetta skulu vera persónar, sum hava fast tilknýti til Føroyar, allir skulu vera skrásettir í fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og vera fult skattskyldugir í Føroyum. Er talan um partafelag, eru líknandi treytir settar, tó so, at útlendskur eigara- og avgerðarpartur kann vera upp til 1/3.

Grein 8 ásetir treytir fyri útskifting av fiskifari og fyri samanleggingum av veiðiloyvum. Samsvarandi stk. 8 er ikki heimild fyri at leggja fiskiloyvi hjá bátum minni enn 15 tons saman.

Í grein 9 er heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um, hvør er at meta sum fullrikin og partrikin útróðrarmaður og reglur um inntøkumark. Henda heimild verður brúkt sum grundarlag undir kunngerð, ið ásetir treytir fyri, hvussu útróðrarbátar/menn í bólki 5 verða flokkaðir sum fullriknir og partriknir. Við heimild í grein 29, stk. 4 ásetir landsstýrismaðurin í somu kunngerð reglur um, hvussu fiskidagarnir vera býttir millum fullriknar og partriknar útróðararbátar/menn. (Kunngerð nr. 105 frá 14. september 2005).

Grein 29, stk. 1 ásetir talið á fiskidøgum, sum loyvt verður hvørjum bólki sær at brúka í einum fiskiári – eisini bólki 5.

## *6.2 Lýsing av bólki 5*

Ein trupulleiki við hesum bólki er, at í løtuni ber ikki til at siga, hvussu stórur hesin bólkurin er - hvussu nógvir bátar kunnu gerast aktivir í bólkinum. Hesin trupulleikin stavar í høvuðsheitum frá skrásetingarskipanini.

Besta boðið uppá talið í hesum bólki er talið á bátum, sum eru skrásettir í skipanini hjá Lønjavningarstovuni. Har vóru í mai 2005 1.894 nøvn á bátum at finna.

### 6.2.1 Bólkur 5A og 5B[31]

Fiskiførini minni enn 15 tons vera býtt í tveir partar. Bólkur 5A sum eru fullriknir útróðrarbátar og bólkur 5B sum eru aðrir útróðrarbátar. Treytirnar fyri at fáa fiskiloyvi til bólk 5A ella 5B eru ásettar í kunngerð nr. 105 frá 14. september 2005.

Høvuðsreglan fyri at fáa fiskiloyvi 5A er, at fiskiárið frammanundan skal eigarin hava:

1) avreitt minst 12 tons ella fyri kr. 84.000, og
2) onnur inntøka enn útróður má ikki vera meir enn kr. 50.000.

Eru treytirnar ikki loknar, kann eigarin fáa eitt fiskiloyvi 5B ístaðin.

Talið á loyvum sæst á talvu 1. Við á myndini er eisini tal á bátum í bólki 5B, sum hava avreitt. Orsøkin til hetta er, at fleiri eru sum søkja um fiskiloyvi, men ongantíð, ella ikki hvørt ár, avreiða.

[31] Fram til fiskiárið 2002/03 vóru bólkarnir 3, 5A, 5B og 5D. Í tølunum og talvunum eru 5B og 5D lagdir saman.




**Mynd 2**
*Talvan vísir tal á fiskiloyvum í bólki 5A og 5B og tal á bátum í bólki 5B, sum hava avreitt. (Kelda: Fiskivinnustovan og Fiskiveiðieftirlitið)*

Summi ár er talið á teimum sum avreiða hægri enn talið á fiskiloyvum. Hetta kann stava frá, at fiskiloyvini vera givin hálvárliga, og tað ikki eru somu bátar, sum søkja hvørt hálvár, meðan tølini fyri avreiðingar eru fyri hvørt fiskiár. Hinvegin kann so eisini roknast við, at talið á bátum, sum hava fingið fiskiloyvi í einum ávísum fiskiári, kann vera hægri enn talið, sum her er upplýst. Í skipanini hjá Fiskivinnustovuni verður bert gjørt upp, hvat talið á loyvum er ein ávísan dag.

Fiskidagarnir vera býttir millum bólkarnar soleiðis, at bólkur 5A fær 60% og 5B 40%. Bátarnir í bólki 5A fáa tillutað dagar pr. bát, meðan bólkur 5B fiskar av felagsdøgum. Tað er eingin treyt at vera í bólki 5A, fyri at reka fulltíðar útróður. Sambært umsitingini eru tað bátar, sum hava 5B loyvi, men sum annars lúka treytirnar fyri at vera í bólki 5A.

Í talvu 2 er yvirlit yvir nýtsluna av døgum í bólkinum. Onki ár hevur bólkur 5A nýtt 60% av døgunum, meðan bólkur 5B í fleiri ár hevur nýtt meir enn 40% av døgunum. Øll árini, uttan eitt, hevur verið avlop av døgum. Hetta eina árið vóru nýttir fleiri dagar enn tillutað bólkinum.




**Mynd 3**

*Talvan vísir prosentbýtið av døgum millum 5A og 5B, og hvussu nógvir dagar ikki vera nýttir. (Kelda: Fiskivinnustovan og Fiskiveiðieftirlitið)*

Verður hugt eftir miðaltølunum fyri nýtsluna av fiskidøgum, er hetta rættiliga ymiskt. Á mynd 4 eru hesi tøl.




**Mynd 4**

*Á myndini síggjast miðal fiskidagatøl. Fyri bólk 5B er gjørdur munur á miðaltalinum pr. loyvi og pr. bát, sum hevur avreitt í árinum. (Kelda: Fiskivinnustovan og Fiskiveiðieftirlitið)*

Miðaltølini benda á, at rættiliga stórur munur er á bátunum í bólki 5A og 5B, men verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at hesin munur helst ikki er so stórur kortini. Í talvu 13 er útroknað veiðan og nýttir fiskidagar gjørt upp fyri 100, 25 og 10 teir bestu bátarnar í bólki 5A og 5B í fiskiárinum 2003/04. Hesi víkja munandi frá miðaltølunum fyri allan bólkin, sí talvu 3.

| | 5A | | 5B | |
|---|---|---|---|---|
| Veiðan er í kg. | | | | |
| 100 teir bestu | Miðal veiða | 52.770 | Miðal veiða | 24.618 |
| | Miðal dagar | 80 | Miðal dagar | 59 |
| | Miðal veiða pr. dag | 663 | Miðal veiða pr. dag | 418 |
| | | | | |
| 25 teir bestu | Øll veiðan | 3.184.974 | Øll veiðan | 1.749.448 |
| | Miðal veiða | 127.399 | Miðal veiða | 69.978 |
| | Miðal dagar | 80 | Miðal dagar | 61 |
| | Miðal veiða pr. dag | 1.589 | Miðal veiða pr. dag | 1.140 |
| | | | | |
| 10 teir bestu | Øll veiðan | 1.763.655 | Øll veiðan | 1.063.005 |
| | Miðal veiða | 176.366 | Miðal veiða | 106.301 |
| | Miðal dagar | 96 | Miðal dagar | 79 |
| | Miðal veiða pr. dag | 1.847 | Miðal veiða pr. dag | 1.340 |

**Talva 13**

*Tøl yvir veiðu og nýttar dagar hjá ávísum bólkum av bátum.*
*(Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Verður hugt eftir tølunum fyri bátar sum nýta fakst dagar, so sær nýtslan av døgum soleiðis út:

| 5A | 5B |
|---|---|
| 10 bátar nýta færi enn 10 dagar | 77 bátar nýta 1 dag |
| 80 bátar nýta færri enn 50 dagar | 220 bátar nýta 5 ella færri dagar |
| | 413 bátar nýta 20 ella færri dagar |

**Talva 14**
*Tal á bátum, ið nýta fakst fiskidagar.*
*(Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Veiðan hjá bólki 5 er fyri tað mesta toskur og hýsa. Í fylgiskjali 1 er yvirlit yvir nøgdina, ið bólkur 5 veiðir úr hesum stovnum. Veiðan er gjørd upp sum prosent av heildarveiðuni eftir hesum fiskasløgum.

Á mynd 5 er sett inn tal á nýttum fiskidøgum og prosentparturin av allari toskaveiðuni fyri bólk 5A og 5B. Ymisk viðurskifti kunnu lesast av hesi samanbering, m.a.:

1) Heildarveiðan hjá bólki 5 eftir toski liggur millum 13 og 25%, í miðal 19% í tíðarskeiðinum. Her kann serliga leggjast til merkis stóra skiftið frá 1999/00 til 2000/01.
2) Veiðan hjá bólki 5B fylgir talinum á nýttum fiskidøgum í hesum bólki.
3) Veiðan hjá 5A fylgir ikki heilt somu gongd.




**Mynd 5**
*Talvan vísir nýttar fiskidagar í bólki 5A og 5B. Eisini vísir myndin prosentvísu nøgdina av allari toskaveiðuni, hvør av hesum bólkum veiðir.*
*(Kelda: Fiskivinnustovan og Fiskiveiðieftirlitið)*

## *6.3 Ein nýggj skipan*

Málið er at gera eina einfalda skipan fyri brúkaran og umsitingina, sum tryggjar eina skynsama veiðu.

Skipanin við fullriknum útróðrarbátum, sum reka útróður við bátum minni enn 15 tons, verður varðveitt. Men treytirnar fyri at verða roknaður sum fullrikin útróðrarbátur í bólki 5 verða skerpaðar. Hesar skulu endurspegla, at útróðurin er livibreyðið hjá útróðrarmanninum. Markið í dag uppá 84.000 kr. í avreiðingarvirði eigur at verða sett til um 4-500.000, tá hædd er tikin fyri, at báturin skal hava um eina helvt av avreiðingarvirðinum. Og verður upphæddin sett rímiliga høgt, er

ikki neyðugt at hava ásetingar um mest loyvdu inntøku frá øðrum enn útróðri. Hetta hevði lætt munandi um umsitingina.

Funnið skal vera fram til ein hóskandi prosentpart av fiskidagatalinum í bólki 5 sambært grein 29 í lógini um vinnuligan fiskiskap, sum skal latast teimum fullriknu útróðrarbátunum – 5A. Tá treytirnar vera skerpaðar, vera helst færri loyvir í 5A, so prosentparturin kann lækkast sammett við verandi 40%. Hesum bólkinum eiga at verða givnar umstøður at kunna reka veruligan vinnuligan útróður.

Allir aðrir útróðrarbátar, minni enn 15 tons, fáa fiskiloyvi sum partriknir útróðrarmenn/bátar at fiska innan fyri tað eftirverandi fiskidagatalið tillutað øllum bólki 5, tá fiskidagatalið hjá teimum fullriknu er farið burturav. Hetta merkir í veruleikanum, at allir bátar kunnu fáa fiskiloyvi – antin sum fullrikin ella sum partrikin. Trongdin at skula keypa fiskiloyvi og fáa tað flutt á ein annan og gjarna nýggjari og effektivari bát fellur burtur. Og ræðisavmarkingarnar fyri bólk 5 fara í søguna.

Ein slík skipan hevði umsitingarliga verið munandi minni krevjandi.

Útróður við bátum minni enn 15 tons verður staðfestur at vera bæði við vinnuliga fullriknum bátum og við vinnuliga partriknum bátum. Tað, at tað verður møguligt hjá øllum bátum at fáa fiskiloyvi ger, at skipanin livir upp til fatanina av, at slíkur útróður er ein lívsstílur hjá mongum føroyingi – tað er ein aldargamal siður at kunna fara á flot og at avreiða. Verandi skipan forðar fyri hesum, tí bert teir, sum áttu bátar fyri 1. janaur 1995, hava síðani mars 2002 havt henda rættin. Allir hava rætt at fiska til húsbrúks, men at kunna avreiða er ein framíhjárættur, sum nakrir hava.

Fiskiskapurin skal fara fram við atliti at tí av Løgtinginum samtykta fiskidagatalinum fyri bólk 5 – fyri allar bátar, sum avreiða. Í so máta eru atlit tikin at veiðiorkuni.

Nakað annað er, at atfinningar kunnu setast fram í sambandi við, at møguleiki verður fyri at útvega sær nýggjar bátar, uttan at verandi báturin verður ræðisavmarkaður og fer úr fiskiskapinum. So tann samlaða tekniska fiskiorkan kann vætnast at gerast størri, men dagatalið sjálvt verður kortini ikki størri. Verður frítt at fáa sær annan bát, er ógrundað at leggja fiskiloyvi saman ella at flyta loyvi av einum báti á ein annan. Tí verður ásetingin í § 8, stk. 1 um, at fiskiorkan ikki skal gerast størri, ógrundað fyri bólk 5.

Men vera avmarkingar settar fyri, hvør kann fáa fiskiloyvi, vera vit at halda fram við eini lutfalsliga umfatandi umsiting, samstundis sum nøkrum verða givin framhaldandi framíhjáræ̈ttindi at reka vinnuligan útróður sum part av gamla lívsformi føroyinga. Teir føroyingar, sum hava fingið sær bát eftir 1. januar 1995, fáa ikki henda møguleika.

### 6.3.1 Eitt annað uppskot

Tá talan er um bólk 5 hevur ikki verið gjørligt at funnið semju millum allar nevndarlimirnar. Tí verður her eisini nevnt eitt annað uppskot til skipan fyri bólk 5, sum er ein kvotuskipan fyri hendan bólkin.

Fyri bólk 5 verður farið frá fiskidagaskipan til eina kvotuskipan, har ásett verður mest loyvda veiða hvørt fiskiár. Orsøkin til hesa broyting er m.a.:

- Fiskiorkan hjá fiskiførum minni enn 15 BT er ógvuliga ymisk
- Raksturin hjá einstaka fiskifarinum er ógvuliga ymiskur
- Verandi skipan, har ein túrur er ein dagur, gevur ikki røttu myndina av, hvussu nógvir dagar vera brúktir
- Markið uppá 15 BT/BRT
- Atgongdin til bólkin verður frí og eins fyri allar føroyingar
- Ikki neyðugt at skilja millum bólk 5A og 5B
- Umsitingarliga ein einføld skipan.

Mest loyvda veiðan hvørt fiskiár hjá bólki 5 byggir á søgulig veiðitøl. Bólkurin fær hvørt ár lutað eina kvotu til, sum er ein ávísur prosentpartur av samlaðu veiðuni eftir toski og hýsu fiskaður undir Føroyum við føroyskum fiskiførum. Miðal veiða hjá bólkinum fyri fiskiárini frá 1996/97 til 2004/05 verður brúkt sum grundarlag fyri áseting av prosentpartinum.

Fyri at tryggja, at kvotan ikki verður fiskað eftir einum stuttum tíðarskeiði, verður árliga kvotan býtt út á nøkur tíðarskeið, soleiðis at bólkurin ikki kemur at vera uttan kvotu í longri tíð. Óbrúkt kvota í einum tíðarskeiði verður flutt til næsta tíðarskeið í sama fiskiári.

Verður kvotan í einum tíðarskeiði uppfiskað, skal fiskiskapurin steðga beinanvegin. Støðan kann tó vera tann, at kvotan eftir onkrum fiskaslagi er uppfiskað, og ikki øðrum, og tí verður í stk. 5 heimilað landsstýrismanninum at gera reglur um, hvussu farast skal fram í slíkum førum. Hetta kunnu eitt nú vera reglur um, at ávísur partur av kvotuni kann flytast um tíðarskeið, ella at eitt fiskaslag kann "vekslast um" til annað fiskaslag soleiðis, at nøgdin av øðrum minkar, meðan hin veksur.

# 7. Fiskiorka

Í sambandi við endurskoðanina av lógini um vinnuligan fiskiskap er ein av spurningunum at kanna eftir og finna ein hátt at gera upp fiskiorkuna, bæði tá tað snýr seg um samanleggingar og útskifting av skipum, og tá tað snýr seg um leypandi effektivitetsbroytingar, sum fara fram.

Ein bólkur hevur viðgjørt spurningin. Bólkurin hevur havt 6 fundir. Við í viðgerðini hava verið: Frits Thomsen, Kristin Rasmussen, Jón Magnussen, Petur Steingrund og Hjalmar Hansen. Harumframt hava Jákup Jacobsen og Torleivur Hoydal frá Skipaeftirlitinum og Símun Joensen frá Fiskiveiðieftirlitinum luttikið á einum fundi.

Spurningurin um fiskiorku verður eisini viðgjørdur í frágreiðing, sum varð handað Bjørn Kalsø 4. apríl 2005. Víst verður til hesa frágreiðing[32].

Til at lýsa fiskiorkuna hjá einum trolara hevði rættast verið at mált, hvussu nógvir $m^3$ av sjógvi fara ígjøgnum trolið hvønn fiskidag, ella fyri botntrol, hvussu nógvar $m^2$ trolið fer yvir hvønn fiskidag. Men hetta er sera trupult at hava eftirlit við, og forðar samstundis monnum í at fáa trolini so effektiv

[32] Henda er at finna á: http://www.fisk.fo/files/130505_Fiskiorkan_Landgrunn_Føroya_Banka.pdf

sum gjørligt. Til at lýsa fiskiorkuna hjá einum línubáti, hevði talið á húkum settir hvønn fiskidag verið rættasta mátið at brúkt. Men hetta er eisini sera trupult at hava eftirlit við.

Bólkurin metir, at tann leistur, sum er nýttur seinnu árini við at brúka rúmmát fyri onnur før enn trolarar og maskinorku * rúmmát fyri trolarar (kunngerð nr. 51 frá 11. mars 2003 um mannagongd og áseting av fiskiorku, tá veiðiloyvi verða flutt millum fiskifør 15 tons og størri) til at umrokna fiskidagar, er tann frægasti hátturin, ið er tøkur í løtuni. Tó verður hildið, at ávísar broytingar kunnu gerast, og verður hetta viðgjørt niðanfyri.

## *7.1 Fyrimunir og vansar við BT*

Bólkurin hevur viðgjørt fyrimunir og vansar við at nýta BT sum rúmdarmát, ístaðin fyri at nýta L*B*D. Høvuðsmunurin er, at við BT eru **øll** rúmini á skipinum tikin við, meðan hátturin við L*B*D lýsir støddina á skipinum undir dekkinum.

Rúmdarmát í BT er væl lýst og er ásett í altjóða sáttmála, sum verður fylgdur av nærum øllum heimsins londum, og verður skrásett á skipsblaðið. Rúmdarmátið L*B*D er ikki so væl lýst, og serliga trupult er at áseta dýpið. Hetta ger, at skip koma at hava ymiska stødd, hóast tey hava somu mát og sokallað “paragrafskip” koma burturúr.

Størsti vansin við at nýta BT er, at fyri at fáa sum mest fiskiorku, verður møguliga skorið av manningarrúmum og rúmum ætlað til at arbeiða veiðuna. Fyri at hetta ikki skal henda, eigur Skipaeftirlitið at seta krøv til manningarrúm og arbeiðsumhvørvi, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan at seta krøv um løggilding av arbeiðsdekkinum. Hesi krøv skulu vera lokin, fyri at skipið kann fáa veiðiloyvi. Bólkurin er tó komin til ta niðurstøðu, at fyrimunirnir við at brúka BT eru størri enn vansarnir[33].

**Maskinorka:**
Maskinorka verður lýst sum: Mesta megi (kW), ið kann veitast til framtøku av skipinum. Íroknað er eisini møguligt PTI (Power Take In) frá hjálpimotorum**.** Skipið skal hava eina skjalprógvaða skipan umborð, ið prógvar mestu framtøkumegina, og at hon ikki kann broytast.

Pelatrekk hevur eisini verið viðgjørt, sum møguliga rættari mát fyri framtøkumegi, men hetta er truplari at hava eftirlit við. Bólkurin mælir til at nýta mestu framtøkumegi.

### 7.1.1 Nøkur orð um uppmáting

Sambært altjóða sáttmála skulu øll skip longri enn 24 metrar vera uppmáld eftir reglunum í International Convention on Tonnage Measurement of Ships, 1969. Fyri skip styttri enn 24 metrar eru tað tjóðskaparligar reglur, sum vera nýttar. Hetta inniber, at skip longri enn 24 metrar kunnu beinleiðis samanberast uttan mun til, um hesi eru uppmáld í Føroyum ella eitt nú í Onglandi. Men er skipið styttri enn 24 metrar, er hetta ikki vist, tí reglurnar í Føroyum og einum øðrum landi ikki

[33] Ein annar háttur enn at nýta BT er at “uppfinna” eitt rúmdarmát, har dýpdin ikki verður nýtt, tá tað er hendan, sum gevur størstu trupulleikarnar við at nýta LxBxD. Eitt uppskot er: LxBx(kvadratrót av LxB). Við hesum fæst eitt mát, sum ikki er flatmát, men eitt rúmdarmát, sum hvørki gevur fyrimun fyri longd ella breidd.

nýtast at vera eins. Tí verður krav sett til, at øll fiskifør, styttri enn 24 metrar, skulu vera uppmáld eftir føroyskum reglum.

Tær føroysku reglurnar fyri før millum 15 og 24 metrar eru tær somu, sum fyri skip 24 metrar og longri. Før styttri enn 15 metrar og niður til (Loa x B =20 ) vera uppmáld eftir øðrum føroyskum reglum. Tað vil siga, at tað er føroysk lóggáva fyri uppmáting av fiskiførum heilt niður til stór 10 mannafør, og Skipaeftirlitið tekur sær av hesum.

## 7.3 Veiðievni[34]

Bólkurin hevur kannað veiðuna fyri ymisku bólkarnar og hugt eftir veiðuni pr. dag hjá teimum ymisku fiskiførunum. Fyri bólk 1, 2, 3 og 4 er hugt eftir tølunum fyri fiskiárini 2002/03, 2003/04 og 2004/05. Fyri bólk 5 er bert hugt eftir tølunum tvey tey seinastu fiskiárini.

Som roknað var við, var funnið fram til, at hjá trolarunum í bólki 2 er ein beinleiðis samanhangur millum veiðu pr. dag og kW*BT/1000. Í talvu 1 er hetta víst sum miðaltøl hesi árini. Út frá hesum kann tann niðurstøðan gerast, at tá dagar vera fluttir frá einum trolara til annan, eigur ein umrokning av fiskidøgum at fara fram við útgangsstøði í kW*BT/1000 hjá báðum skipunum, fyri at leggja upp fyri broytingini í veiðu orsakað av flytingini.




***Mynd 6***

*Miðal veiða pr. dag hjá partrolarunum fyri árini 2002/03 til 2004/05 sett í mun til kW x BT/1000*

[34] Taltilfarið henda greiningin er bygd á, er fyri bólkarnar 1, 2, 3 og 4B, upplýsingarnar eru úr skipsdagbókunum, meðan tølini fyri bólk 4A og bólk 5 byggja á skrásetingar í avreiðingarskipanini.

Umrokningin kann verða gjørd við beinleiðis at lesa av í talvuni ella við at seta inn í forskriftina y= 11,196X + 3787. Ein annar møguleiki er at rokna, at forskriftin gongur gjøgnum null, soleiðis at umrokningin bert fer fram við einum faktori sum er: (BT x kW/1000) fyri skip dagar fluttir frá) / (BT x kW/1000) fyri skip dagar fluttir til).

Vera tølini greinað hvørt sær, soleiðis at kW verður sett í mun til veiðu pr. dag, so er greitt samband millum hesi bæði. Verður hinvegin hugt eftir BT og veiðu pr. dag, kann ikki vísast á eitt beinleiðis samband millum hesi. Verður eitt mát sum LxBx(kvadratrót LxB) nýtt, er eitt ávíst samband millum hetta mát og veiðu pr. dag. Hóast hesi úrslit verður mælt til, at nýtt verður kW og BT, tí hetta eru tøl, sum eru tøk, og eingin ivi er um tølini. Verður LxB (Kvadratrót LxB) nýtt, so er ein faktorur, dýpi, sum ikki verður nýttur, og kann hesin tá verða nýttur til at avlaga skipanina.

Sama útroking er gjørd fyri bólk 1, og vísir hon sama mynstur. Um nakað, so vísir mynd 7 enn greidligari sambandið millum veiðu pr. dag og støddina/maskinorkuna á fiskifarinum.




**Mynd 7**

*Miðal veiða pr. dag hjá lemmatrolarunum fyri árini 2002/03 til 2004/05 sett í mun til kW x BT/1000*

Tá hugt verður eftir húkaflotanum, er úrslitið soleiðis, sum roknað var við. Verður hugt eftir øllum flotanum undir einum, sæst onki beinleiðis samband millum støddina á skipinum og veiðuna pr. dag, sí mynd 8. Tó er sjónligt, at nøkur lop eru. Undantak er tó fyri minnu útróðrarbátarnar, har talvan vísir, at samanhangur er millum støddina á bátinum og veiðuna pr. dag. Mælt verður til, at hildið verður fram við verandi skipan við eini umrokningartalvu við nøkrum lopum soleiðis, at lagt verður upp fyri veiðievnunum hjá hesum skipum.




**Mynd 8**
*Miðalveiða pr. dag fyri húkaflotan niður til bólk 5 fyri fiskiárini 2002/03 til 2004/05.*

Men verður tó valt at nýta umrokningina av fiskiorku sum eina funktión, letur hetta seg eisini gera.




**Mynd 9**
*Samband millum veiðu pr. dag og stødd. Svartir trýkantar vísa bólk 4A, hvítir trýkantar vísa bólk 4B og fýrakantar vísa bólk 3. Ein tendenslinja er koyrd ígjøgum alt tilfarið.*

Ikki hevur verið gjørligt at gera eina heildarmynd við at nýta BT fyri húkaflotan orsakað av, at fleiri av hesum bátum ikki eru uppmáldir í BT. Bólkur 3 er tó allur uppmáldur í BT, og verður myndin ikki annarleiðis enn omanfyri, um hetta mát verður nýtt fyri hendan bólkin[35].

## 7.4 Fiskiorka

Í lógini um vinnuligan fiskiskap verður hugtakið "Fiskiorka" nýtt. Tað er tó ikki allýst í lógini.

Hinvegin er veiðievnið allýst sum: "**Veiðievnið** hjá fiskifari er, veiðitrýstið hvørt fiskifar fremur hvønn fiskidag", men tað verður ikki nýtt í lógini.

Hugtakið fiskiorka er tó allýst í kunngerð nr. 51. frá 11. mars 2003. Har stendur: *Metingarvirði fyri fiskiorku eru hesi: Fyri fiskifør, ið royna við húki: Longd (L) x breidd (B) x dýpi (D). Fyri fiskifør, ið royna við troli: Longd (L) x breidd (B) x dýpi (D) x maskinorka.*

Eftir hesi allýsing er hugtakið fiskiorka knýtt at fysiskum mátum á einum fiskifari. Í FAO frágreiðingini: The state of world Fisheries and aquaculture (Sofia 2004), verður hugtakið eisini viðgjørt. Útgangsstøðið her er "Fishing capacity", og verður víst á ymiskar hættir at gera upp hendan "capacity". Víst verður eisini á, at kapasitetur kann nýtast í ymiskum útgávum, ein av hesum er "Fishing effort". Um "Fishing effort" verður sagt: *Fishing effort. The amount af time and fishing power used to harvest fish. Fishing power. Fishing power is determined inter alia by gear size, boat size and horsepower.*

Hendan allýsingin hevur tveir variablar – tíðin og fysisk mát. Í kunngerð nr. 51. frá 11. mars 2003, er bert ein variabul nýttur, og tað er fysisk mát. Mælt verður til, at í komandi lógarverki verður fiskiorka allýst við tveimum variablum – tíð og fysiskum mátum.

Allýsingin kundi verið: **Fiskiorka er tann fiskitíð og fiskimegi, ið verður nýtt fyri at fiska. Fiskimegi verður ásett sum stødd á skipinum og framtøkumegi. Fiskitíð eru teir dagar, ið nýttir vera til at veiða**.

Útrokningargrundarlagið undir veiðievninum pr. dag eigur at verða eftirmett regluliga.

## 7.5 Onnur viðurskifti

Talið á fiskidøgum er týdningarmesta amboðið til at stýra fiskiorkuni. Mælt verður til, at óbrúktir dagar í skipanini verða tiknir inn. Hetta kann gerast, tá fiskidagar skulu ásetast aftur. Tá kann støði takast í miðal brúkta dagatalinum pr. bólk seinastu 3 árini. Um fiskifrøðin ella onnur viðurskifti krevja aðrar tillagingar, eiga tær at verða tiknar við í nýggja útroknaða dagatalið.

Broytingar við einum fiskifari, so sum, at tað verður longt, umbygt ella mesta framtøkumegin verður broytt (skifta motor), skulu góðkennast av Fiskimálaráðnum, og møgulig umrokning av fiskidøgum eigur at fara fram.

[35] Í fylgiskjali 5 er veiðan sett í mun til bólk 3, uppmáldur í BT.

Hildið verður ikki, at tað ber til at áseta mát fyri leypandi effektiviseringum av flotanum, men skuldi hetta kunnað verið innroknað, um forskriftir og umrokningartalvur leypandi verða endurskoðaðar.




**Mynd 10**
*Veiða pr. dag fyri bólk 5, 4A og 4B fyri fiskiárið 2003/04.*

Viðv. bólki 5 kann mynd 10 møguliga nýtast í orðaskiftinum um markið fyri bólk 5 og 4 og umsetiligheitina millum bólkarnar!

## *7.6 Tilmæli til eina nýggja lóg:*

Bólkurin heldur, at í lógini skal vera ásett:

a) BT (sbrt. International Convention on Tonnage Measurement of Ships, 1969) verður nýtt, heldur enn LxBxD. BT er altjóða góðkendur uppmátingarháttur, soleiðis at ikki verður ivamál um, hvussu uppmátingin skal fara fram. Fyri at kunna leggja saman ella fáa nýtt fiskifar er ein treyt, at uppmáting í BT er gjørd. Somuleiðis fyri at kunna keypa/selja fiskidagar, má uppmáting í BT vera framd. Um nýggj uppmáting viðførir broytingar í veiðirættindum, varðveitir fiskifarið tó rættindini tað hevði eftir gomlu uppmátingunum. Krav eigur at verða sett um, at øll fiskifør, ið reka vinnuligan fiskiskap, skulu mátast upp innan 2 ár frá tí, at lógin er komin í gildi.
b) Umrokning fyri trolararnar í bólki 2 verður gjørd við eini forskrift, bæði tá fiskidagar vera handlaðir ímillum skip, og tá fiskidagar skulu flytast á annað fiskifar, tá skip vera skift út. Fyri bátar á húkaveiðu verður ein umrokningartalva nýtt. Forskriftin og umrokningartalvan eiga at verða eftirkannað regluliga, t.d. annað hvørt ár, við grundarlagi í veiðuni 3 tey seinastu árini.

c) Heldur enn maskinorka verður orðið ”Framtøkumegi” nýtt. Framtøkumegi er: Mesta megi (kW), ið kann veitast til framtøku av skipinum. Íroknað er eisini møguligt PTI (Power Take In) frá hjálpimotorum. Skipið skal hava eina skjalprógvaða skipan umborð, ið prógvar, hvør mesta megin er, og at hon ikki kann broytast. Um myndugleikarnir koma umborð, og eingin skjalprógvað skipan finst umborð hesum viðvíkjandi, ber skipið kostnaðin av kanningararbeiðinum at máta framtøkumegina.
d) Krav um góðkenning, tá fiskifør verða longd, umbygd ella broyta mestu framtøkumegi (skifta motor). Møgulig umrokning skal fara fram av fiskidøgum.
e) Fiskiorka verður allýst sum: Fiskiorka er tann fiskitíð og fiskimegi, ið verður nýtt fyri at fiska. Fiskimegi verður ásett sum stødd á skipinum og framtøkumegi. Fiskitíð er teir dagar, ið nýttir vera til at veiða.

# 8. Rávørur til hjáframleiðslur

Í pkt. 11 í arbeiðssetninginum hjá arbeiðsbólkinum, sum skal endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap, verður bólkinum álagt at:

”Meta um, hvussu lógarverkið frameftir tryggjar, at allur fiskur, og alt av fiski, kemur til høldar, soleiðis at nýggjar framleiðslur kunnu mennast burtur úr tilfeinginum”.
Í verandi lóggávu eru tað hesar greinar, sum hava týdning í hesum sambandi:

***”§ 2.** ...Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni...”.*

***”§ 10,** stk. 4. Tað er ikki loyvt at blaka veiðu fyri borð”.*

Ásetingin í § 10 verður helst varðveitt í endurskoðaðu lóggávuni, men her mugu vit allýsa, hvat ”veiða” merkir.

Vit vita, at í framtíðini fara vit at uppliva størri og økt krøv um t.d., hvaðani fiskurin kemur, hvussu hann er fiskaður, og hvussu hann er virkaður. Somuleiðis fer marknaðurin og altjóða samfelagið at herða krøvini um burðardygga gagnnýtslu av tilfeinginum. Hetta mugu vit leggja upp fyri í eini endurskoðari lóggávu.

Í Føroyum verður feskfiskur bara kruvdur og avreiddur við høvdi. Higartil hevur tað mesta av rognunum og nakað av livrini verið tikið við til lands. Skulu vit gagnnýta fiskin betur, verður talan um tann partin av livrini og aðrar innvølir, sum vit higartil hava tveitt í havið aftur.

Um vit ganga út frá, at tað vera landað umleið 130.000 tons (tøl frá 1999 rund vekt) av botnfiski undan Føroyum, so er rávørugrundarlagið til hjáframleiðslur samanlagt umleið 70.000 tons. Av

hesum eru innvølir umleið 17.000 tons (livur 8.000 tons), høvd umleið 28.000 tons, ryggir o.a. umleið 18.000 tons og fráskurðir umleið 6.000 tons[36]. Ein partur av hesum kemur til sættis í dag.

Í løtuni gongur skeiva vegin, tá umræður at fáa ein størri part av innvølunum hjá feskfiskaflotanum til lands. Livravirkið á Eiði vantar rávøru, men samstundis seta alt fleiri reiðararar kryvjimaskinur umborð á partrolararnar, sum gera, at livurin ikki kann brúkast til framleiðslu. Tað sigst, at tað ber til at fáa kryvjimaskinur, sum ikki skala livrina, men at hesar eru munandi dýrari at keypa. Tí mugu vit taka støðu til, um tað skal vera loyvt at brúka framleiðsluútgerð umborð á skipi í framtíðini, sum minkar um nýtsluvirðið á tilfeinginum.

Á vitjanum í Norra og Íslandi fingu vit at vita, at í teirra fiskivinnulóggávu eru ongi krøv um, at t.d. innvølir skulu førast til lands. Londini hava heldur ongar serskipanir, sum eggja monnum til at taka innvølir. Norðmenn síggja størstu møguleikarnar í betri gagnnýtslu av slógnum, men enn er ongin vinna komin burturúr.

Í eini endurskoðaðari føroyskari lóggávu um vinnuligan fiskiskap eiga vit at skapa fortreytir fyri eini betri gagnnýtslu av fiskatilfeinginum, so vit lúka krøvini um burðardygga veiðu. Her verður í fyrstu syftu hugsað um feskfiskaflotan undir Føroyum.

Tí eiga vit at skifta orð um, hvussu ”harðliga” vit skulu fara til verka í lógarsmíðnum. Her eru nakrir møguleikar:

1. Lata marknaðarkreftirnar ráða.
2. Brúka gularótina og halda fram við at útbyggja skipanir (t.d. eyka fiskidagar til skip, sum taka livur og aðrar innvølir), sum eggja skipunum til at taka ein størri part av innvølunum við til lands.

3. Lóggávan kann heimila landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvørjir partar av veiðuni skulu førast til lands, so hvørt hann metir, at fortreytir eru fyri hesum.

4. Landsstýrismaðurin fær heimild til at seta treytir um avreiðing av innvølum í loyvini hjá skipunum.

5. Vit kunnu krevja í lóggávuni, at innvølir ella partar av hesum vera landaðir, um keypari er til rávøruna. Við <u>einum</u> keypara verður helst talan um lágar prísir til skipini í fyrstuni, men helst ber til at rokna við øktari kapping sum frálíður.

6. Seta í lógina, at allur fiskur, og alt av fiski skal takast við til lands. Í eini skiftistíð kann vera neyðugt at gera súrløgu (t.d. Salmon Proteins á Eiði) burturúr tí, sum ongin áhugi er fyri at keypa.

Pkt. 1 og partvíst pkt. 2 kunnu ikki sigast at halda ásetingina í arbeiðssetninginum um”…at allur fiskur, og alt av fiski, kemur til høldar, soleiðis at nýggjar framleiðslur kunnu mennast burtur úr tilfeinginum”.

Undir øllum umstøðum má havast í huga, at neyðugt verður at áseta krøv um mannagongdir og hagreiðing av innvølum umborð á skipunum, so teir kunna nýtast til ætlaðu framleiðsluna á landi.

[36] Egil Olsen: Udnyttelse af marine biprodukter på Færøyene. Juni 2003

## 9. Ognarviðurskifti

Í arbeiðssetninginum verður sagt: ”Kanna reglurnar um eigara- og avgerðarrætt. Í hesum sambandi skal m.a. metast um, hvønn eigaralut útlendingar kunnu hava í feløgum, sum eiga veiði- og fiskiloyvi frá føroyskum myndugleikum.”

Tað sum serliga hevur áhugað er, at 1/3 av eginpeninginum og 1/3 av atkvøðunum kunnu vera á útlendskum hondum í feløgum, sum eiga fiskifør.

Hendan reglan í lógini ger, at gjørligt er hjá útlendskum íleggjarum at koma inn í føroysku fiskivinnuna. Sum so má tað metast postivit, at gjørligt er hjá útlendskum kapitali at koma inn í føroysku fiskivinnuna, men vansin er um tilfeingið, vinnan er grundað á, endar á útlendskum hondum. Við ásetingini í § 7 er roynt at taka hædd fyri hesum báðum viðurskiftum, og verður mett, at reglurnar eru nøktandi, soleiðis at ikki er neyðugt at gera broytingar í lógini á hesum øki.

Hyggja vit eftir okkara grannalondum, so er kravið í Norra, at 60% av eginpeninginum og avgerðarrættinum er á norskum hondum. Harafturat er í Norra eitt krav, at minst 50% av eigarunum skulu vera aktivir fiskimenn. Nógv verður tí gjørt burturúr at kanna, um viðurskiftini veruliga eru soleiðis, sum partarnir upplýsa. Í Íslandi kunnu útlendingar eiga upp til 25% í fiskiskipum, og er talan um fleiri feløg, sum eiga hvørt annað, kunnu útlendingar eiga upp til 49% av samtakinum.

Hugt hevur verið eftir mannagongdini, ið nýtt verður, tá talan er um umsóknir, har útlendingar eru við í eigaraskaranum, og kann hendan mannagongd verða nakað broytt.

Dentur eigur at vera lagdur á, at hesi viðurskifti vera kannað væl og virðiliga, tá umsóknir koma til Fiskimálaráðið. Ofta vísir tað seg, at slík mál hava skund, men eigur neyðuga tíðin at vera nýtt til at tryggja, at viðurskiftini eru í lagi. Her kann reisast spurningur, um krav eigur at verða sett til, á hvørjum máli slíkar umsóknir eru skrivaðar. Eru ivamál, eiga eigararnir, og ráðgevar teirra, at vera spurdir eftir nærri upplýsingum.

Orðað kundi verið eitt vegleiðingarskriv, har greitt verður frá, hvørji krøv verða sett til viðgerð av umsóknum, har útlendingar eru við sum partaeigarar, ella á annan hátt hava avgerðarrætt í felagnum.

Stk. 6 í § 7 sigur:

> *Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta treytir viðvíkjandi eginpeningi, parta- og ábyrgdarpeningi, herundir støddina av hesum í mun til íløguna, og íløguførleikan hjá eigara av fiskifari.*

Henda kunngerð er ikki gjørd, og ivasamt er, um tað er rætt at hava eina slíka. Umhugsast kann, um betur var at seta uppí § 7, stk. 3, pkt. 3 eina orðing um, at í viðgerðini kann landsstýrismaðurin meta um og biðja um upplýsingar um fíggjarliga førleikan hjá eigarunum. Hetta fyri at hava ein møguleika at kanna eftir, har óvanlig fíggjarlig viðurskifti gera seg galdandi. Hugsandi er, at ein slík kanning kann umfata váttanir frá fíggingarstovnum og greiningar frá grannskoðara.

Fyri at tryggja, at viðurskiftini veruliga eru soleiðis, sum lógin krevur, skal umsitingin hava hesi skjøl:

- stovningarsamtykt
- viðtøkur fyri felagið
- starvsreglugerð fyri nevndina
- prógv fyri innføring í yvirlit yvir partaeigarar
- partaeigarayvirlit
- tekningarútskrift frá Skráseting Føroya
- endaligan keypssáttmála
- møguligan partaeigarasáttmála
- onnur skjøl, sum hava týdning fyri ognarviðurskiftini og avgerðarrættin í felagnum, herundir lániavtalur
- váttan um, at ongar aðrar avtalur viðvíkjandi eigara- og avgerðarviðurskiftunum enn tær, sum Fiskimálaráðið hevur fingið innlit í, eru gjørdar í hesum sambandi. Váttan skal fyriliggja frá:
    - Nevndarlimum
    - Stjórn
- Líknandi váttan sum umtalað omanfyri kann verða kravd frá:
    - Eigarum (partaeigarum/smápartaeigarum)
    - Advokati
- Øll skjøl skulu vera á antin føroyskum, donskum ella norskum. Eru frumskjølini ikki á hesum málum, skal góðkend týðing fyriliggja.

Fráboðan um ognarviðurskiftini skal sendast Fiskimálaráðnum innan 4 vikur, um broytingar henda í ognarviðurskiftunum. Hetta uttan mun til, um hetta eru broytingar í útlendska ella føroyska eigaraskaranum.

# 10. Annað havtilfeingi

Nevndin, sum endurskoðar lógina um vinnuligan fiskiskap, er samd um, at spurningurin um arvatilfar v.m., sum stavar úr havinum, er eitt øki í menning, og at tað er rætt at taka hetta við í viðgerðina av lógini. Valt er at nevna hetta tilfeingið fyri ”annað havtilfeingi”, og er hetta ein breið orðing, sum fevnir um alt lívfrøðiligt, evnafrøðiligt og fysiskt tilfar, sum stavar frá livandi verum, t.d. djórum, plantum og smáverum, ella frá øðrum uppruna í havinum. Tá sagt verður í havinum, meinast eisini á og í havbotninum.

Arvatilfar frá livandi verum í havinum er partur av havtilfeinginum, og fevnir tað um tilfar frá livandi verum, t.d. djórum, plantum og smáverum, ella øðrum uppruna, sum inniheldur arvaeginleikar. Arvatilfarið er ikki einans ílegur, men eisini evnafrøðilig evni, so sum proteinir og enzymir, sum eru avleiddar av arvatilfari, og sum kunnu takast út úr tí fysiska tilfeinginum og nýtast serskilt.

Áhugin er vaksandi fyri at gagnnýta annað havtilfeingi, t.d. arvatilfar, sum stavar frá livandi verum í havinum. Enn er einki samlað lógarverk á hesum øki í londunum uttanum okkum, men her verður skotið upp at skipa karmar fyri gagnnýtslu av hesum tilfeingi. Umsitingin av hesum havtilfeingi eigur at taka støði í sáttmálanum um lívfrøðiligt fjølbroytni (Biodiversitetskonventiónini). Í 1993

samtykti Løgtingið at taka undir við danskari staðfesting av sáttmálanum. (Uppskot til samtyktar, 23. november 1993). Sáttmálin er lýstur fyri Føroyar. (Bekendtgørelse nr. 142 frá 21. november 1996 af konvention af 5. juni om den biologiske mangfoldighed). Umframt ásetingar um varðveitslu av lívfrøðiligum margfeldi, inniheldur Biodiversitetskonventiónin ásetingar um gransking og burðardygga gagnýtslu av hesum tilfeingi. Evnið verður eisini viðgjørt í Norges offentlige udredning (NOU) 2005/10 við heitinum ”Lov om forvaltning av viltlevende marine ressurcer”.

## *10.1 Nøkur dømi*

Niðanfyri eru nøkur dømi um, hvat hendir á hesum øki, bæði heima hjá okkum sjálvum og í grannalondunum.

Norra fremur skipaða bioprospektering í sínum havøki ígjøgnum granskingarverkætlanirnar Marbank og Marbio, og bjóðar útbúgving í marinari biotøkni í Tromsø. Norska fyritøkan Biotec Pharmacon, við grundarlagi í marinari gransking, er skrásett á virðisbrævamarknaðinum. Innanfyri marina gentøkni, so hava granskarar á Akvaforsk í Norra eisini tryggjað sær patentrættindi uppá ávís gen í toski.

Grønland hevur eina umsókn liggjandi um marina bioprospektering frá danskari biotøknifyritøku, og bæði Grønland og Føroyar fáa í 2006 vitjan av Galathea-havrannsóknarverkætlanini, sum fremur marina bioprospektering. Í Íslandi er biotøknifyritøkan Prokaria stovnað í 1998, sum fremur bioprospektering í íslendska umhvørvinum bæði á landi og sjógvi. Í Føroyum er eisini ein fyritøka, Faroe Marine Biotech, sum burturav arbeiðir við marinari biotøkni, og sum kann metast at fremja bioprospektering viðvíkjandi úrdráttum úr føroyskari fiskaskræðu.

## *10.2 Onnur lóggáva og førleikar*

Patentlóggávan gevur sum útgangsstøði altíð granskaranum/uppfinnaranum persónliga øll rættindi til uppfinningar, sum uppfylla treytirnar fyri patentering. Hinvegin er tað bæði kostnaðarmikið og krevjandi hjá t.d. granskarum í almennum granskingarstovnum at tryggja sær rættindi til evt. granskingarúrslit og uppfinningar, og harnæst at stovna egna fyritøku ella at samráðast við stórfyritøkur um vinnuliga gagnnýtslu av patentinum. Í Danmark er tí gjørd ein lóg ”Lov om opfindelser ved offentlige forskningsinstitutioner” (Lov nr. 347 af 02/06/1999), sum hevur ført við sær, at donsku granskingarstovnarnir hava patentskrivstovur, sum gera sáttmálar fyri býtið av inntøkunum frá evt. patentum. Hesar patentskrivstovur býta patentinntøkurnar ímillum granskarar og granskingarstovn (1/3-modellið er mest vanligt), og samráðast eisini um sáttmálar og sølu av patentrættindum við fyritøkur, sum ikki eiga lut í patentinum. Í Norra eru innførdar líknandi skipanir.

Henda lóg er tó ikki galdandi í Føroyum, og vit hava ikki tílíkar patentskrivstovur í Føroyum. Tað einasta, sum líkist hesum eitt sindur, er nýstovnaða ílegusavnið fyri granskingarverkætlanir, sum ger brúk av føroyska ættartrænum, sí løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum.

Umhugsað eigur at vera, um ikki ”Lov om opfindelser ved offentlige forskningsinstitutioner” skuldi verið sett í gildi í Føroyum, tí ein trupulleiki verður, hvør skal uppbyggja førleikan at meta um virðið í evt. patentum, og at samráðast um sáttmálar.

Av øðrum veikleikum í føroyskari lóggávu kann nevnast biotøkniøkið sum heild, tí at bioprospektering kann sjálvsagt eisini gerast á landi. Biotøknilig gransking og framleiðsla eru lítið viðgjørd evni í føroyskari lóggávu. Nevnast kunnu t.d. ymiskar danskar lógir um biotøkni, sum heldur ikki eru galdandi í Føroyum.

Ásetingarnar á hesum øki sum standa í lógaruppskotinum seta førleikakrøv til umsitingina. Neyðugt er at tryggja, at umsóknir og sáttmálar v.m. vera viðgjørd á einum høgum fakligum støði. Umhugsast kann samstarv við læru- og granskingarstovnar uttanlands í hesum sambandi.

## *10.3 Um ásetingarnar í lógaruppskotinum*

Tað er í samsvari við sáttmálan um lívfrøðiligt fjølbroytni (Biodeversitetskonventiónin), at upprunalandið kann áseta gjøld og aðrar treytir fyri gagnnýtslu av tí tilfeingi, talan er um her. Í hesum sambandi verður eisini víst til Bonn leiðreglurnar, sum eru óbindandi reglur fyri ognarrætt og gjøld viðvíkjandi sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Leiðreglurnar eru at finna á www.biodiv.org

Í sambandi við, at loyvir verða givin til leiting - bioprospektering, er tað av týdningi, at loyvishavarin bindur seg at veita nakrar tænastur afturfyri. Tí eigur sáttmáli at verða gjørdur millum partarnar, sum m.a. eigur at innihalda áseting um, at loyvishavarin fær álagt at gera neyvt yvirlit yvir alt, sum verður funnið, og bindur seg at viðurkenna, at tilfarið hevur føroyskan arvafrøðiligan uppruna, um hetta verður nýtt vinnuligt frameftir. Orsøkin til hesa treyt er at sleppa undan torførari próvførslu um upprunan av nýtta arvafrøðiliga tilfeinginum. Ásetast kunnu eisini treytir um varðveitslu av innsavnaða tilfarinum, krøv um part av vinningi eitt nú við at krevja nýtslugjald frá patentum ella at fáa onnur framíhjárættindi, so sum atgongd til kanningarúrslit, og hvussu hesi kunnu gagnnýtast. Í loyvum eru bert treytir til umsøkjaran. Um so er, at hesin avhendar síni rættindi ella letur onnur fáa lut í teimum, kann hetta tí bert gerast við góðkenning frá landsstýrismanninum. Ásetingin av gjaldi ella øðrum framíhjárættindum, sum skulu falla til landið, verður avtalað partanna millum í sáttmála. Hvat gjald, ella hvørji framíhjárættindini skulu vera, kann ásetast í mun til hvønn fíggjarligan týdning annað føroyskt havtilfeingi hevur í samlaðu verkætlanini.

Tá hetta økið er nýtt og ókent í løtuni, er tó stór óvissa um, hvussu møgulig gjøld, herundir skatting av vinningi, skal fara fram. Tí eru í hesum uppskotinum ongar reglur um, hvussu landið kann fáa part av møguligum vinningi, men verður mælt til, at serstakar skattareglur verða gjørdar á hesum øki, sum taka hædd fyri tí serligu støðu, slík vinna er í, og teimum altjóða sáttmálum og leiðreglum sum eru á økinum. Talan kann bæði vera um serstakar skattareglur og aðrar reglur, t.d. um, at landið fær lut í nýtslugjøldum (royalies) frá patentum.

Tá talan er um bioprospektering, so kann hendan fara fram á ymiskan hátt, men vísast kann á tríggjar meginhættir (sí NOU, 205/10 síða 57):

1) Útvinning av serligum evnum, so sum fitisýrum, kveikum, gelatini, cithin v.m.
2) Leiting eftir áhugaverdum ílegum ella bioaktivum evnum, grundað á eitt nú grundgransking, heimaráð ella serligan staðbundnan kunnleika.

3) Skipað umfatandi leiting eftir aktivum evnum (Miðvís roynd eftir einum hópi av evnum fyri at finna fram til ávis evni, sum hava júst teir eginleikar ein ynskir).

Neyðugt er við loyvi uttan mun til, um talan er um handilsliga gagnnýtslu ella ikki. Gransking verður í Havrættarsáttmálanum mett at kunna fara fram undir tveimum ymiskum fortreytum:

- Beinleiðis vísindalig gransking (pure research) og
- Gransking við tí fyri eyga at gagnnýta tilfeingið (applied research).

Hesi hugtøk eru ikki nærri greinað í sáttmálanum, men verður vanliga roknað við, at beinleiðis vísindalig gransking er fyri at fáa kunnleika til havumhvørvið í breiðari merking til gagns fyri mannaættina.

Fer granskingin fram í sjóumveldinum (innan fyri 12 fjórðingar), hevur strandarlandið løgfrøðiliga myndugleikan í øllum viðurskiftum, og kann geva rættindi og seta treytir út frá hesum. Fer granskingin fram uttan fyri sjóøkið, men innan fyri fiskimarkið, skal strandarlandið framvegis geva sítt samtykki, men er møguleikin at nokta beinleiðis vísindaligari gransking avmarkaður. Tó kann m.a. verða noktað, um granskingin hevur beinleiðis samband við leiting og gagnnýtslu av tilfeingi. Krav, um luttøku hjá strandarlandinum og at fáa hendur á kanningarúrslitum, kann altíð setast. Í hesum sambandi verður víst til kapittul 13 í Havrættarsáttmálanum.

Í summum førum kann støðan vera, at loyvi ikki er givið til gagnnýtslu av øðrum føroyskum havtilfeingi, tá tilfeingið longu lógliga er fingið til vega við eitt nú vanligum fiskiskapi. Í uppskotinum verður landsstýrismanninum heimilað í slíkum førum at áleggja gjald ella aðrar treytir.

## 11. Kærumøguleiki

Avgerðir, ein almennur myndugleiki tekur í málum hjá einstøkum borgarum, eiga at kunnu kærast. Til ber at fara til dómstólin ella Løgtingsins Umboðsmann um ósemjur eru, men góð fyrisitingarsiðvenja er, at borgarin kann kæra avgerðir til annan hægri fyrisitingarligan myndugleika. Hetta kann antin vera innan somu fyrisiting, her Fiskimálaráðið, ella til serstakan kærumyndugleika. Á henda hátt kann ein og hvør avgerð verða kærd einaferð, og sostatt fáa tvær viðgerðir innan fyrisitingina.

Í arbeiðssetninginum er sagt, at kærunevnd skal vera sett. Spurningurin er, hvussu ein slík nevnd skal setast, og eftir hvørjum leisti ein slík nevnd skal arbeiða. Harumframt er neyðugt at áseta, hvussu skrivarauppgávan hjá nevndini skal røkjast.

Fyrsti spurningur er, hvørjar avgerðir skulu kunna kærast. Her sigur arbeiðssetningurin, at talan er um avgerðir um fiskiloyvir, fiskiorku, sammanlegging, innflutningsloyvi o.l. Sambært Føroya Kærustovni er góð siðvenja at lógaráseta, antin hvørjar avgerðir kunnu kærast, ella vísa á, at avgerðir eftir serligum ásetingum kunnu kærast. Annar møguleiki er at nýta eina meira rúmliga orðing, sum sigur, at fyrisitingarligar avgerðir, tiknar av ávísum stovni, kunnu kærast. Skotið verður upp at áseta í lógini, hvørjar avgerðir kunnu kærast, soleiðis at víst verður til, at avgerðir, tiknar eftir ávísum greinum, kunnu kærast. Hetta eru avgerðir um fiskiloyvi, veiðiloyvi, flytan av fiskirættindum, loyvi til royndarveiðu v.m.

Vanligt er at hava eina 3-manna kærunevnd, har ymisk krøv kunnu setast til førleikarnar hjá limunum, alt eftir hvørjar avgerðir kærunevndin skal viðgera, t.d. at minst ein av limunum er løgfrøðingur. Skotið verður upp, at kærunevndin verður mannað við einum fiskivinnukønum, einum skipakønum og einum lógarkønum. Skrivarauppgávan kann leggjast á ein verandi fulltrúa í Fiskimálaráðnum, serstakt starv verður skipað til skrivara, skrivarauppgávan verður loyst uttanhýsis, ella Føroya Kærustovnur kann røkja uppgávuna. Hildið verður, at skilagott er at hava eina rúmliga heimild í lógini, soleiðis at landsstýrismaðurin kann manna skrivaruppgávuna alt eftir, hvør tørvurin verður mettur at vera.

# 12. Onnur viðurskifti

## *12.1 Gjøgnumskygni*

Hugsanin aftanfyri hugtakið - gjøgnumskygni – er, at vitan og upplýsingar skulu vera atkomulig hjá øllum, ella hjá teimum sum hava serstakan áhuga í einum ítøkiligum øki uttan stríð og strev.

Gjøgnumskygni er avgerandi fyri rættarkensluna í samfelagnum, so at eingin kann leggjast undir at fáa fyrimunir **fram um onnur, og ikki øll hava sama møguleika**. Gjøgnumskygni verður mett at vera sjálvsagdur partur av einum effektivum marknaði, har partarnir eru líkastillaðir.

Gjøgnumskygni í lógini um vinnuligan fiskiskap kundi fevnt um:

a) Fiskirættindi
b) Umsetiligheit
c) Onnur loyvir
d) Umsóknir og svar
e) Brot

Serliga vildi verið aktuelt at fingið gjøgnumskygni á økjunum raðfest sum a), b) og c).

*Viðv. a)*
Her kann talan vera um, at atgongd verður til, hvør hevur hvørji fiskirættindi, fiskidagar og kvotur. Hvussu nýtslan av hesum er. Eisini kundi verið atgongd til øll tey rættindi, føroyingar ráða yvir, og hvussu hesi verða gagnnýtt.

*Viðv. b)*
Her kann talan vera um upplýsingar um seljarar og keyparar av fiskirættindum, møguliga prísurin. Um kravið var, at øll rættindini, sum vera avhendað, skuldu um ein marknað, so kundi gjøgnumskygni verið skipað gjøgnum henda marknað. Fyrimynd kundi verið tikin í skipanini hjá Fiskamarknaðinum.

*Viðv. c)*
Hetta fevnir um onnur loyvir, ið vera givin. T.d. royndarloyvir og útlendsk veiða.

Gjøgnumskygni kann fremjast við eini heimasíðu, ið antin er atkomulig hjá øllum ella við loyniorði. Tað krevur sjálvsagt nakað av umsiting, men tað kundi verið fíggjað við eitt nú avgreiðslugjaldi fyri at fáa atgongd, ella sum ein partur av gjaldinum, fyri at útflýggja loyvir v.m.

## 12.2 Skráseting

Høvuðsreglan er, at øll skip skulu meldast til skráseting í Føroya Skipaskráseting. Skrásetingarskylda er tó ikki fyri stuttleikabátar minni enn 15 tons, men verður hetta gjørt, um veðrættur skal lýsast í teimum.

Øll fiskifør, sum vera nýtt til vinnuligan fiskiskap, skulu skrásetast í Skipaskrásetingini. Eldri bátar upp til 5 BT/BRT, og í summun førum eisini bátar millum 5-15 BT/BRT, eru skrásettir í bátayvirlitinum í tí sýslu, teir hava heimstað. Verður bátur, skrásettur í bátayvirlitinum, skiftur út við nýggjan bát, verður nýggi báturin skrásettur í Skipaskrásetingini. Stuttleikabátar minni enn 5 BRT/BT eru og verða skrásettir í bátayvirlitið í tí sýslu, teir hava heimstað. Kravið um skráseting fyri 1. januar 1995 hevur givið trupulleikar, m.a. um báturin í heilatikið er skrásettur, og til hvørja nýtslu báturin er skrásettur.

Skráseting er ein trupulleiki, sum má loysast soleiðis, at øll før vera skrásett í somu skipan. Krøvini til, hvat skal skrásetast, kunnu møguliga vera ymisk fyri ymisk før. Sum eitt minsta mark mega vera skrásettar tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at umsita lógir og reglur á økinum. Skipaskrásetingin fevnir um skráseting av øðrum førum enn fiskiførum, og má tað havast í huga í hesum sambandi.

Skrásetingin átti at verið skipað soleiðis, at allar upplýsingar, so sum stødd, eigaraviðurskifti, góðkenningar, veiða, o.s.fr. vórðu skrásettar á farið. Skipini eru „kundarnir“ hjá Fiskimálaráðnum, og tí átti at verið áhugi at fylgt hesum so neyvt sum til ber, og við so greiðum skipanum sum til ber. Ein slík skipan kundi eisini hjálpt munandi um savning og samskipan av hagtølum.

# 13. Yvirlit yvir fylgiskjøl

Fylgiskjal 1. Prísútrokning

Fylgiskjal 2. Býti av tillutaðum og brúktum døgum

Fylgiskjal 3. Útrokningingargrundarlag fyri skipanina við tilfeingisgjaldi

Fylgiskjal 4. Dømi um útrokning av tilfeingisgjaldi

Fylgjskjal 5. Talva við tølum fyri bólk 5

Fylgiskjal 6. Mynd av bólki 1, veiða í mun til BT

Fylgiskjal 7. Frágreiðing frá Hans Jacob Kollslíð, ”Altjóða fiskivinnuavtalur og føroysk fiskivinnustýring”

## Fylgiskjal 1

## Prísútrokning

g = gjald pr. termin
r = rentustøði
n = tal á terminum
L = lániupphædd

*Annuitetslánsrokning:*

g = 0,5
r = 10%
n = 5
L = ?  lániupphæddin er ókend

Um tú rindar 0,5 mió. kr. hvørt ár, kanst tú fáa eitt lán uppá

$$L = g\frac{1-(1+r)^{-n}}{r} = 0{,}5 \cdot (1 - 1{,}1^{-5})/0{,}1 = 1{,}895$$

Tú kanst eisini rokna hinvegin:

L = 1,89
r = 10% = 0,10
n = 5
g = ? afturgjaldið hvørja termin er ókent

Tá bankin lænir/gevur mær 1,89 mió. í annuitetsláni, krevur/væntar hann at fáa

$$g = L\frac{r}{1-(1+r)^{-n}} = 1{,}89 \cdot 0{,}10 / (1-1{,}1^{-5}) = 0{,}499$$ mió. aftur hvørja termin.

**Fylgiskjal 2**






**Fylgiskjal 2**






# Fylgiskjal 3

Útrokning av veiðigjaldi fyri partrolarar

| Partrolarar | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 307.301 | 100 | 246.499 | 100 | 219.320 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 111.746 | 36 | 122.759 | 50 | 110.885 | 51 |
| Hýra | 132.879 | 43 | 96.929 | 39 | 89.298 | 41 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 62.676 | 20 | 26.811 | 11 | 19.137 | 9 |
| Avgjald 9% | 5.641 | 1,8 | 2.413 | 1,0 | 1.722 | 0,8 |
| Fiskidagar tilsamans | 6800 | | 6500 | | 6500 | |
| Gjald pr. dag | 830 | | 371 | | 265 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 115.130 mió.
Hýra 41% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

# Fylgiskjal 3

| Lemmatrolarar | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 187.064 | 100 | 208.108 | 100 | 189.592 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 88.997 | 48 | 91.932 | 44 | 101.122 | 53 |
| Hýra | 71.124 | 38 | 85.721 | 41 | 74.857 | 39 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 26.943 | 14 | 30.455 | 15 | 13.613 | 7 |
| Avgjald 9% | 2.425 | 1,3 | 2.741 | 1,3 | 1.225 | 0,6 |
| Tons tilsamans | 20889 | | 20388 | | 18245 | |
| Gjald pr. tons | 116 | | 134 | | 67 | |

**Skulu tons umroknast til "toskatons"?**

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 94.017 mió.
Hýra 39% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| Línuskip | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 302.868 | 100 | 317.990 | 100 | 255.141 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 100.921 | 33 | 101.745 | 32 | 107.737 | 42 |
| Hýra | 167.325 | 55 | 172.567 | 54 | 127.638 | 50 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 34.622 | 11 | 43.678 | 14 | 19.766 | 8 |
| Avgjald 9% | 3.116 | 1,0 | 3.931 | 1,2 | 1.779 | 0,7 |
| Fiskidagar tilsamans | 2527 | | 2452 | | 2452 | |
| Gjald pr. dag | 1233 | | 1603 | | 726 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 103.468 mió.
Hýra 53% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| Útróðrarbátar (4) | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 260.248 | 100 | 226.442 | 100 | 188.119 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 104.099 | 40 | 90.577 | 40 | 75.248 | 40 |
| Hýra | 135.329 | 52 | 117.750 | 52 | 97.822 | 52 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 20.820 | 8 | 18.115 | 8 | 15.050 | 8 |
| Avgjald 9% | 1.874 | 0,7 | 1.630 | 0,7 | 1.354 | 0,7 |
| Fiskidagar tilsamans | 8861 | | 8597 | | 8597 | |
| Gjald pr. dag | 211 | | 190 | | 158 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 89.975 mió.
Hýra 52% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

| Útróðrarbátar (5A) | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 81.561 | 100 | 71.689 | 100 | 63.048 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 32.624 | 40 | 28.676 | 40 | 25.219 | 40 |
| Hýra | 42.412 | 52 | 37.278 | 52 | 32.785 | 52 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 6.525 | 8 | 5.735 | 8 | 5.044 | 8 |
| Avgjald 9% | 587 | 0,7 | 516 | 0,7 | 454 | 0,7 |
| Fiskidagar tilsamans | 8685 | | 9389 | | 9808 | |
| Gjald pr. dag | 68 | | 55 | | 46 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 28.840 mió.

Hýra 52% av avreiðingarvirðinum

Bólkur 5 kann ikki nýta ein slíkan formil við núverandi skipan. Tí vildi verið einfaldast at kravt eitt gjald pr. dag útfrá hesum tølunum, sum t.d. eitt miðal tal.

| Rækjuskip | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 154.272 | 100 | 106.407 | 100 | 91.075 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 102.031 | 66 | 78.976 | 74 | 71.940 | 79 |
| Hýra | 54.400 | 35 | 34.430 | 32 | 29.872 | 33 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | -2.159 | -1 | -6.999 | -7 | -10.737 | -12 |
| Avgjald 9% | -194 | 0 | -630 | -1 | -966 | -1 |
| Fiskað tons | 11569 | | 8312 | | 6112 | |
| Gjald pr. tons | -17 | | -76 | | -158 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 84.316 mió.
Hýra 33% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| Nótaskip | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 446.066 | 100 | 367.925 | 100 | 369.841 | 100 |
| | | | | | | |
| Rakstrarkostnaður | 150.176 | 34 | 133.938 | 36 | 165.499 | 45 |
| Hýra | 140.568 | 32 | 114.711 | 31 | 112.422 | 30 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 155.322 | 35 | 119.276 | 32 | 91.920 | 25 |
| Avgjald 9% | 13.979 | 3,1 | 10.735 | 2,9 | 8.273 | 2,2 |
| Fiskað tons | 277095 | | 379252 | | 352573 | |
| Gjald kr pr. tons | 50 | | 28 | | 23 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 149.871 mió.
Hýra 31% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| Garnaskip | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 64.666 | 100 | 68.315 | 100 | 60.179 | 100 |
| | | | | | | |
| Rakstrarkostnaður | 23.517 | 36 | 21.875 | 32 | 27.524 | 46 |
| Hýra | 43.384 | 67 | 38.950 | 57 | 30.832 | 51 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | -2.235 | -3 | 7.490 | 11 | 1.823 | 3 |
| Avgjald 9% | -201 | 0 | 674 | 1,0 | 164 | 0,3 |
| Fiskað tons | 2968 | | 3768 | | 2771 | |
| Gjald kr. pr. tons | -68 | | 179 | | 59 | |

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 24.305 mió.
Hýra 58% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| Verksmiðjuskip | 2002 | % | 2003 | % | 2004 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 289.922 | 100 | 286.008 | 100 | 307.850 | 100 |
| Rakstrarkostnaður | 97.570 | 34 | 126.037 | 44 | 118.855 | 39 |
| Hýra | 126.214 | 44 | 108.567 | 38 | 118.638 | 39 |
| Olja | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 66.138 | 23 | 51.404 | 18 | 70.357 | 23 |
| Avgjald 9% | 5.952 | 2,1 | 4.626 | 1,6 | 6.332 | 2,1 |
| Fiskað tons | 10042 | | 13695 | | 10589 | |
| Gjald kr pr. tons | 593 | | 338 | | 598 | |

Her skal møguliga ein umrokning gerast til "toskatons"

Formil at nýta:

Avreiðingarvirði

Annar kostnaður 114.154 mió.
Hýra 40% av avreiðingarvirðinum

Í øðrum kostnaði - gera eina vekting av, hvussu stórur partur er olja, og hvussu nógv er annað, og so vera hesi tøl broytt soleiðis: olja eftir index á heimsmarknaðinum og annar kostnaður eftir føroyska prístalinum.

## Fylgiskjal 3

| 2004 | Nótabátar | Rækjubátar | Verksmiðjubátar | Lemmatrolarar | Partrolarar | Línuskip | Garnabátar | Útróðrarbátar | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 369.841 | 91.075 | 307.850 | 189.592 | 219.320 | 255.141 | 60.179 | 188.119 | 1.681.117 |
| | | | | | | | | | |
| Rakstrarkostnaður | 165.499 | 71.940 | 118.855 | 101.122 | 110.885 | 107.737 | 27.524 | 75.248 | 778.810 |
| Hýra | 112.422 | 29.872 | 118.638 | 74.857 | 89.298 | 127.638 | 30.832 | 97.822 | 681.379 |
| Olja | | | | | | | | | |
| Avgjaldsgrundarlag | 91.920 | -10.737 | 70.357 | 13.613 | 19.137 | 19.766 | 1.823 | 15.050 | 220.929 |
| Avgjald 9% | 8.273 | 0 | 6.332 | 1.225 | 1.722 | 1.779 | 164 | 1.354 | 20.850 |

## Fylgiskjal 4

Talva við upplýsingum um bólk 5

| | 96/97 | | 97/98 | | 98/99 | | 99/00 | | 2000/01 | | 2001/02 | | 2002/03 | | 2003/04 | | 2004/05 | | 2005/06 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | 5A | 5B | | |
| Tal á loyvum | 212 | 1100 | 240 | 1177 | 224 | 420 | 169 | 522 | 158 | 742 | 171 | 831 | 189 | 543 | 181 | 840 | 161 | 722 | 148 | 437 |
| Bátar - avreitt | 212 | | 240 | 505 | 224 | 448 | 169 | 442 | 158 | 661 | 171 | 666 | 189 | 702 | 181 | 571 | 161 | 484 | | |
| Tillutaðir dagar | 22.000 | | 27.000 | | 22.444 | | 22.444 | | 22.444 | | 22.444 | | 22.444 | | 22.220 | | 21.776 | | 21.235 | |
| Nýttir dagar | | | 7.081 | 10.682 | 5.947 | 7.630 | 6.160 | 7.495 | 9.466 | 15.166 | 8.685 | 11.894 | 9.389 | 11.828 | 9.808 | 9.806 | 8.410 | 6.883 | | |
| % veiða av toski | 11% | 9% | 10% | 8% | 10% | 6% | 8% | 5% | 12% | 13% | 13% | 10% | 14% | 10% | 11% | 7% | 12% | 5% | 9% | 4% |
| % veiða av hýsu | 10% | 7% | 9% | 6% | 8% | 4% | 6% | 3% | 8% | 5% | 8% | 4% | 9% | 3% | 11% | 3% | 11% | 3% | 13% | 5% |
| Inntøkutrygd; mió. | | | 23.322 | | 13.470 | | 12.414 | | 6.998 | | 7.304 | | 6.649 | | 8.526 | | 9.148 | | | |

**Fylgiskjal 5**

Bólkur 3 uppmáldur í BT

